**SKJAL 1**

# *FORKANNING*

## *KT-høvuðsskipan á Almannastovuni 2006-2008*

Forkanningin er umbiðin í sambandi við ætlan um at menna KT-høvuðsskipan til Almannastovuna. Forkanningin er saman við kravgreining (skjal 4) og øðrum skjølum grundarlag fyri ætlaðum uppskoti til verklagslóg at leggja fyri løgtingið.

Stýrisbólkurin var samansettur av:

Petru Johnsdóttir Joensen, stjóra, Almannastovan
Leif Abrahamsen, stjóra, Føroya Gjaldstova
Nicolai Mohr Balle, deildarleiðara, Almanna- og heilsumálaráðið

Verkætlanarbólkurin var samansettur við umboðum frá Almannastovuni umframt eksternum ráðgevum (sí s. 23 í forkanningini).

Víst verður annars til kommissorium (skjal 5).

Støða: latið leiðsluni á Almannastovuni 06.06.2006.

# Innihaldsyvirlit

**INNGANGUR** .... 5
**1. SAMANDRÁTTUR** .... 7
**2. ALMANNASTOVAN – STUTT LÝSING** .... 14
**2.1. HØVUÐSTÆTTIR Í KOMMISSORIUM** .... 14
**2.2. ALMANNASTOVAN** .... 17
**2.3. BYGNAÐUR** .... 18
**2.4. ALMANNASKIPANIR** .... 20
**2.5. FÍGGJARKARMUR 2006** .... 20
**2.6. HØVUÐSÁHUGAMÁL/INTERESSENTAR HJÁ ALMANNASTOVUNI** .... 21
**2.7. KT Á ALMANNASTOVUNI** .... 22
**2.8. SERSTAKT UM KT-TRYGD** .... 24
**2.9. SAMANUMTØKA** .... 25
**3. KT-HØVUÐSSKIPAN – INTEGRERAÐ AVGREIÐSLU- OG KUNNINGARSKIPAN** .... 27
***YVIRLIT YVIR HØVUÐSSKIPAN*** .... 29
**3.1. LÝSING AV HØVUÐSMÁLSGONGD** .... 34
**3.2. STÝRING AV ARBEIÐSGONGD (WORKFLOW)** .... 42
**4. TØRVSLÝSING** .... 49
**4.1. PORTALUR** .... 49
**4.2. VIÐSKIFTAYVIRLIT - CRM** .... 55
**4.3. VEGLEIÐINGARSKIPAN (INTRANET)** .... 55
**4.4. JOURNAL- OG MÁLSVIÐGERÐARSKIPAN** .... 56
**4.5. VEITINGAR- OG GJALDINGARSKIPAN** .... 58
***VEITINGARLÝSINGAR*** .... 59
***FORSORGARVEITINGAR*** .... 67
***PENSJÓNIR*** .... 75
***BARNAPENINGUR (ALIMENTATIÓN)*** .... 80
***RINDAN FYRI LÆKNAVÁTTANIR*** .... 82
***AVGREIÐSLU- OG ÚTGJALDSMANNAGONGD*** .... 83
***VIÐBÓT TIL ÁVÍSAR PENSJÓNISTAR*** .... 92
***HEILIVÁGSSTUÐUL*** .... 93
***MARKAMÓT TIL FSL ÚTGJALDSSKIPAN*** .... 96
***MARKAMÓT TIL FSL HØVUÐSBÓKHALD*** .... 99
**4.6. GOYMSLU- OG LÁNISKIPAN HJÁ HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐINI** .... 102
**4.7. KREDITORSKIPAN FYRI VIÐSKIFTAKREDITORAR** .... 103
**4.8. DEBITORSKIPAN** .... 104

**4.9. HAGTALSGRUNNUR (DÁTUVØRUHÚS)...................................................................106**
**4.10. DÁTAMARKAMÓT OG ELEKTRONISKUR DÁTAFLUTNINGUR...............................110**
**4.11. IKKI-FUNKTIONELL KRØV TIL SKIPANINA .....................................................122**
**5. SKIPANAR- OG RAKSTRARLOYSN OG VERKÆTLANARTILGONGD..........................124**
**5.1. VAL AV SKIPAN.......................................................................................................124**
**5.2. VAL AV RAKSTRARUMHVØRVI.............................................................................132**
**5.3. VERKÆTLANARLÝSING OG TÍÐARÆTLAN..........................................................135**
**5.4. KOSTNAÐARMETING ..............................................................................................141**
**5.5. VÁÐAMETING...........................................................................................................141**
**5.6. UPPSKOT TIL VERKLAGSLÓG ...............................................................................148**
**6. SKJØL.........................................................................................................................153**
**SKJAL 1. ALMANNASKIPANIR.......................................................................................154**
**SKJAL 2. KT-BAKSÝNI OG TILGONGD ..........................................................................157**
**SKJAL 2.1. FRÁGREIÐING TIL FÍGGJARNEVNDINA .....................................................162**
**SKJAL 3. ARBEIÐIÐ HJÁ KT-BÓLKINUM.......................................................................183**
**SKJAL 4. KRAVGREINING (SJÁLVSTØÐUGT SKJAL)**
**SKJAL 5. KOMMISSORIUM (SJÁLVSTØÐUGT SKJAL)**

# Inngangur

Ein nýggj KT-høvuðsskipan á Almannastovuni verður ment við støði í Visjón 2015, har málið er ein miðvís talgilding av almennu fyrisitingini soleiðis, at borgarin avgreiðir øll síni viðurskifti við tað almenna elektroniskt.

Almannastovan leggur stóran dent á, at ein nýggj telduskipan hjá stovninum, umframt at vera ein avgreiðsluskipan, samstundis er ein góð og lætt atkomulig kunningarskipan hjá politiska myndugleikanum, politisku fyrisitingini og hjá politikkarum sum heild.

Ein slík kunningarskipan stuðlar uppundir eina munabetri fyrisitingarliga og demokratiska tilgongd, har politiska viðgerðin og støðutakanin byggja á nágreiniliga, fullfíggjaða og dagførda vitan.

Aðalmál við nýggju KT-høvuðsskipanini á Almannastovuni eru m.a., at:

- øll týðandi viðurskifti á almannaøkinum verða skrásett, og at alt skrásett skal kunna viðgerast við atliti til at lýsa ymisk almannapolitisk viðurskifti
- hon skal gerast mest týðandi keldan til løgtingsfíggjarlógararbeiðið á almannaøkinum
- hon skal kunnu brúkast til at gera simuleringar, prognosur og nágreiniligar útgreiningar av almannaviðurskiftum
- hon skal geva møguleika fyri samvinnu millum ymsar skipanir á almannaøkinum
- hon skal lýsa og máta virksemið á Almannastovuni, og harvið geva møguleika fyri betri eftirliti við stovnsrakstrinum.

Við hesum fáa politikkarar og politiska fyrisitingin eitt amboð, sum ger tey betri før fyri at taka grundaðar og góðar avgerðir, ið byggja á kunnleika og vitan um veruliga støðuna.

Hetta ger tað eisini møguligt at føra ein meiri miðvísan almannapolitikk, sum bæði byggir á royndir og á greiðar og álítandi lýsingar av framtíðarímyndum (scenario) og rákum. Politiska skipanin kann sostatt verða fyrireikað til framtíðar almannapolitiskar avbjóðingar bæði tá ið talan er um ítøkilig almannaviðurskifti og fíggjarstýring.

Skipanin skal eisini hjálpa til betri at kunna siga frammanundan, hvørjar avleiðingar lógarbroytingar hava, og geva betri innlit í og førleika til at taka støðu til skipan og umskipan av almannaøkinum.

Somuleiðis verður Almannastovan før fyri at fylgja við í og gera vart við gongdir ella komandi hendingar á almannaøkinum, sum kunnu hava almennan og politiskan áhuga, ella sum kunnu krevja politiska støðutakan.

Harumframt skal skipanin gera Almannastovuna til fremsta vitanarsavn í sambandi við gransking á almannaøkinum. Stovnurin skal kunna gera umfevnandi hagtalsyvirlit, sum nøkta krøvini um slík, ið eru galdandi í okkara grannalondum til tess at veita eitt haldgott samanberingargrundarlag.

Nýggja og framkomna KT-høvuðsskipanin skal m.a. við støði í umfevnandi automatiseringum, sjálvavgreiðsluskipanum og elektroniskum dátaflutnings-samskifti við skipanir hjá triðja pørtum fremja munandi effektiviseringar á Almannastovuni, ið bæði koma umsiting og viðskiftafólki til góða.

Høvuðsendamál í hesum sambandi eru m.a., at:

- flest møguligar av verandi manuellum mannagongdum verða automatiseraðar
- mest møgulig nytta fæst burturúr starvsfólkatilfeinginum og rakstrarjáttanini hjá stovninum
- umsitingarligu kjarnuøkini hjá Almannastovuni verða munandi styrkt
- aðrar neyðugar stovnsfunktiónir verða skipaðar eitt nú miðvís hagtals- og evnisútgreiningarvirksemi og granskingarluttøka
- rættartrygdin hjá tí einstaka viðskiftafólkinum verður tryggjað
- sosialfakliga vegleiðingin og ráðgevingin bæði til almenning og til viðskiftafólk verður styrkt og tryggjað
- málsviðgerðin verður einsháttað, skjótari, rættari og bíligari
- upplýsingar um viðskiftafólk verða skipaðar og gagnnýttar samsvarandi tørvi
- skapa nøgdsemi og fakligan trivnað á stovninum.

Nýggja KT-høvuðsskipanin veitir starvsfólkunum á Almannastovuni eitt og sama talgilda arbeiðsumhvørvið – í dag eru 8 ymisk. Tað verður sostatt meira einfalt at røkja sítt arbeiði.

Skipanin styðjar somuleiðis alla málsviðgerðina eitt nú við sjálvvirkandi dátainnheintingum, sjálvvirkandi útrokningum, endurnýtslu av dáta, fullfíggjaðum málsyvirlitum og forritaðum vegleiðarum (wizards). Sum amboð verður høvuðsskipanin við til at tryggja rættari og skjótari málsviðgerð. Hetta stuðlar eisini undir fakliga trivnaðin og nøgdsemið millum starvsfólkini.

Nýggja KT-høvuðsskipanin hjá Almannastovuni er ambitiøs og visjóner í øllum lutum. Hon er ein strategisk íløga í almannaverkið. Hon verður høvuðsamboð í øllum almannapolitikkinum framyvir. Hon er neyðug at fremja.

# 1. Samandráttur

Henda forkanning lýsir uppskot til nýggja KT-høvuðsskipan á Almannastovuni. Talan er um at menna eina integreraða heildarskipan, sum skal fevna um alt kjarnuvirksemið hjá Almannastovuni, og sum skal skapa fortreytir fyri effektivisering av umsitingini.

Skipanin í uppskoti er ikki bert eitt arbeiðsamboð til umsitingina hjá Almannastovuni, men gevur eisini atgongd til eitt nú viðskiftafólk og stovnar at avgreiða ymisk viðurskifti sjálvi, umframt at skipanin verður íbundin aðrar skipanir í sambandi við elektroniskan dátaflutning.

Í tátti 2 verður í umsitingarliga økið hjá Almannastovuni lýst í stuttum. Almannastovan umsitur nógvar almannaveitingar við støði í ymsum lóggávum. Harumframt umsitur Almannastovan fleiri stovnar á forsorgar-, barnaforsorgar- og barnaverndarøkinum, og samlaða játtanin í 2006 til alt lógarøkið íroknað stovnsrakstur táttar í tær 900 mkr.

Greitt verður somuleiðis frá arbeiðinum við at menna KT-skipan á Almannastovuni undanfarnu árini, og hví løgtingið nú hevur biðið Almannastovuna um at gera hesa forkanning. Ynski løgtingsins er m.a., at tað nú verður gjørd ein heildarætlan fyri KT-ætlanirnar hjá Almannastovuni. Í viðmerkingunum til lógaruppskotið um játtan til hesa forkanning verður nevnt, at KT-skipanin á tryggum grundarlagi skal avgreiða allar sosialar veitingar hjá Almannastovuni, og at skipanin eisini skal kunna veita almennu umsitingini og politiska myndugleikanum neyðuga dáta-grundarlagið.

Nomið verður eisini stutt við høvuðstættir í kommissorium, sum er arbeiðsgrundarlagið fyri hesi forkanning, arbeiðstilgongdini í sambandi við forkanningina, og serlig viðurskifti í sambandi við KT-trygd. Í kommissorium verður m.a. víst til Visjón 2015, har ásannað verður, at tað almenna hevur týðandi uppgávur, tá ið tað snýr seg um at menna nýtsluna av kunningar- og samskiftistøkni. Eitt av málunum er, at fyrisitingin miðvíst skal talgildast, so at borgarar og virki kunnu avgreiða síni viðurskifti við tað almenna elektroniskt, og at allir føroyingar í hesum sambandi skulu kunna fáa talgilda undirskrift. Uppskotið í hesi forkanning til nýggja KT-høvuðsskipan til Almannastovuna byggir á og styðjar øll hesi málini.

Táttur 3 lýsir høvuðsskipanina yvirskipað. Skipanin er grundað á visjón um eina munandi øðrvísi Almannastovu enn hana, vit kenna í dag, og sum er møgulig at fremja fyrst og fremst við støði í teimum effektiviseringum, nýggja skipanin veitir. Miðað verður eftir at automatisera meginpartin av verandi manuellu arbeiðsgongdunum á Almannastovuni. Almannastovan skal komandi árini tí ikki bara avgreiða veitingar, men skal í alt størri mun leggja dent á vitan og handfaring av vitan. Sum vitanardepil skal

Almannastovan eitt nú savna og viðgera upplýsingar um virkisøki, tvs. at dáta, sum verða innsavnað í sambandi við málsavgreiðslu, onnur innanhýsis og uttanhýsis dáta og kunning, verða gagnnýtt í leiðslukunning, forsagnum, útgreiningum og granskingarvirksemi á almannaøkinum v.m.

Vitan og vitanarhandfaring eins og effektivitetsvinningurin gera tað eisini møguligt at veita viðskiftafólki eina betri og fjøltáttaða sosialfakliga tænastu. Almannastovan fær eisini betri møguleikar at hava neyvt eftirlit við virksemi og avrikum, og stovnurin kann í størri mun enn nú eftirmeta allar veitingar og tryggja, at tær halda ásett dygdar- og tænastukrøv. Eftirlitið við og tillutan av útreiðslum og tilfeingi verður eisini betri.

Sum heildarskipan fyri alt virksemið hjá Almannastovuni skal høvuðsskipanin nýtast av øllum brúkarum, tvs. umframt starvsfólkum á Almannastovuni og stovnum undir Almannastovuni eisini av viðskifta-fólkum, arbeiðsgevarum og ymsum samstarvsfelagum. Allir brúkarar samskifta við høvuðsskipanina umvegis ein portal, sum fremur eintýðuga eyðmerking av brúkarum, fyrisiting av individuellum rættindum og atgongd, og fyrisiting av verkgongdum.

Grundhugsanin undir høvuðsskipanini byggir á hesar meginreglur:

- Eindarskipan, tvs., at allir brúkarar hava felags inngongd til skipanina og verða eyðmerktir á sama hátt, og at nýtsla av øllum funktiónum í høvuðsskipanini og undirliggjandi fakskipanum fer fram eftir einum felags leisti.
- Prosess-orienterað, tvs., at brúkarin skal kunna fremja allar funktiónir frá byrjan til enda uttan at skula fara í aðrar skipanir eftir upplýsingum og styðjandi funktiónum.
- Sjálvavgreiðsla, tvs., at høvuðsskipanin skal vera opin at nýta fyri øllum endabrúkarum sambært egnum tørvi í virkisøkjunum hjá Almannastovuni.
- Endurnýtsla av dáta frá øðrum skráum, tvs., at aðrar dátaskráir verða endurnýttar við beinleiðis íbinding millum høvuðsskipanina hjá Almannastovuni og hesar skráir.
- Endurnýtsla av øðrum almennum skipanum, tvs., at aðrar almennar skipanir verða endurnýttar, og at Almannastovan varðveitir ræðisrættin á teimum upplýsingum, sum verða lagdar inn í hesar skipanir.
- Gjøgnumskygni, tvs., at allir endabrúkarar skulu kunna síggja og í mest møguligan mun umsita tey dáta, sum viðvíkja teimum.
- Fleksibilitet, tvs., at høvuðsskipanin skal kunna tillagast til broytt viðurskifti í mestan mun við at gera broytingar í systemdáta, so at tørvurin á sermenning í høvuðsskipanini verður so lítil sum møguligt.

Ein portalskipan heldur skil á øllum brúkarum og brúkararættindum. Portalskipanin inniheldur eisini uppseting av verkgongdum. Verkgongdirnar verða nýttar til at gera elektronisk oyðibløð og avgreiðslur annars til starvsfólk, til viðskiftafólk og serfrøðingar. Portalurin hevur samband við

eina røð av generiskum undirliggjandi fakskipanum, sum verða nýttar til at røkja fakligu ábyrgdirnar í sambandi við umsitingina. Talan er um hesar høvuðspartar:

- CRM-skipan (viðskiftayvirlit), sum veitir eitt samlað yvirlit yvir viðskiftafólk.
- Vegleiðingarskipan, sum veitir eitt samlað yvirlit yvir allar heimildir, lógir og vegleiðingar.
- Journal- og málviðgerðarskipan, sum verður nýtt til at skjalfesta øll mál, har metingar eru partur av málsviðgerðini.
- Veitingarskipan, sum gevur eitt yvirlit yvir øll sløg av veitingum, og allar veitingar og mótveitingar, sum Almannastovan hevur ábyrgd av at lata til viðskiftafólk.
- Gjaldingarskipan, sum er íbundin gjaldsskipanina hjá Gjaldstovuni, og sum gevur eitt samlað yvirlit yvir allar gjaldingar.
- Kreditorskipan, sum gevur eitt samlað yvirlit yvir allar kreditorar.
- Debitorskipan, sum verður íbundin innkrevjingar- og bókhalds-skipanina hjá Toll- og Skattstovuni og høvuðsbókhaldsskipanina hjá Gjaldstovuni, og sum gevur eitt samlað yvirlit yvir øll debitorkrøv til triðjapartar.
- Viðskiftakreditorskipan, sum er ein avgreiðsluskipan vegna viðskiftafólk, og sum kann samanberast við eina heimagreiðslu.
- Hagtalsskipan, sum er eitt samlað dátavøruhús, og sum verður nýtt til at gera standard- og ad hoc-rapportir og til simuleringsmodellir.
- Skipanir til at taka sær av samskifti við skipanir hjá triðjapørtum (elektronisk on-line dátaflutningsíbinding).

Miðleingjan í skipanini er høvuðsmálsgongdin, sum er sett saman av hesum pørtum: journal, avgreiðsluskipan, útrokning av veitingum, og út- og inngjald. Í hesum skipanarpartinum fer øll málsavgreiðsla fram. Høvuðs-málsgongdin fevnir um málsviðgerð, sum verður stýrd av eini elektroniskari arbeiðsgongd (workflow). Málsviðgerðin verður stuðlað av beinleiðis atgongd til ymsar skráir, sum lata stam- og satsdáta til málsviðgerðina. Fleiri av hesum skráum kunnu verða dagførdar við beinleiðis elektroniskum dátaflutningssambandi við uttanhýsis samstarvspartar.

Allir lutir í høvuðsmálsgongdini og stýring av arbeiðsgongdini (elektronisk workflow) verða lýstir neyvari í tátti 3.

Táttur 4 lýsir nærri teir ymsu partarnar av høvuðsskipanini, sum nevndir eru omanfyri, og sambondini teirra millum. Her verður stutt tikið samanum nakrar teirra.

Portalurin er eitt webmarkamót við undirliggjandi ritbúnaði, sum gevur brúkarum og starvsfólkum atgongd til kunning, KT-skipanir og ymsar KT-tænastuveitingar, og sum ger tað møguligt at hava sjálvavgreiðslu. Við sjálvavgreiðslu um portalin meinast eitt nú við, at:

- Viðskiftafólk fylla út elektronisk oyðibløð og senda umsóknir on-line.
- Arbeiðsgevarar fylla út inntøkuváttanir í sambandi við dagpening, og arbeiðsviðurskifti í sambandi við vart starv og endurbúgving.
- Læknar senda inn læknaváttanir elektroniskt.
- Samskiftið millum kommunurnar og Almannastovuna er um portalin.
- Viðskiftafólk fáa atgongd til egnar journalupplýsingar.

Atgongdin hjá viðskiftafólkum og áhugabólkum annars verður skild sundur alt eftir tí tørvi og máli, ið viðkomandi hevur á Almannastovuni. Alt elektroniskt samskifti millum viðskiftafólk og skipanina verður skipað við talgildum signaturi. Tvs., at tørvurin til portalin er ymiskur alt eftir, hvør bólkur av endabrúkarum, talan er um.

Journal- og málsviðgerðarskipanin skal vera ein styðjandi skipan til veitingarskipanina. Skilt verður millum vanlig journalmál, sum verða viðgjørd manuelt av málsviðgera, og elektronisk fíggjarmál, sum verða umsitin og avgreidd elektroniskt í veitingarskipanini. Mett verður, at tað einans er neyðugt at stovna og stjórna málum, tá talan er um veruliga málsviðgerð. Í førum, har talan er um avgreiðsluspurningar, sum kunnu validerast maskinelt, verður veitingarskipanin nýtt – her verður í høvuðsheitum hugsað um vanlig mál innan dagpening, barnapening og fólkapensjónir, sum ikki hava serlig frábrigdi, ið krevja ítøkiliga málsviðgerð. Í málum, har upplýsingar ikki kunnu fyrisitast maskinelt (automatiskt) í veitingarskipanini, verður journal- og málsviðgerðarskipanin nýtt.

Veitingarskipanin er tvíbýtt – sjálv veitingarskipanin, sum fyrisitir útrokning og fremjan av veitingum, og gjaldingarskipanin, sum eftir føstum reglusemi skapar gjaldingar og gjaldsáheitanir.

Gjøllig lýsing er av grundarlagnum undir veitingarútrokningunum í mun til ymsu veitingarnar (t.d. dagpening, pensjón, forsorg v.m.). Hetta gevur yvirlit yvir innihald og hvørji atlit, sum skulu takast fyri at fremja útrokningarnar. Allar upplýsingar frá veitingarútrokningum verða eftir felags leisti uttan mun til, hvat slag av veitingum talan er um. Hetta merkir, at stórt sæð somu felags forrit kunnu nýtast til allar uppgávur eftir, at útrokningin er gjørd.

Útgjaldsmannagongdin verður eisini lýst frá tí, at brúkarin avgreiðir útgjøld og til útgjøldini eru flutt og avgreidd til FSL útgjaldsskipanina og FSL høvuðsbókhaldið. Í teirri loysn, ið verður lýst, er talan um flytan av upplýsingum umvegis fílar, ið síðani verða lisnar inn í skipaninar á Gjaldsstovuni. Fyri Almannastovuna er ein loysn við beinleiðis samskifti millum skipaninar betri, tí hetta hevði økt um møguleikarnar at validera upplýsingar, áðrenn hesar vóru fluttar til FSL skipanirnar.

Kreditorskipanin fyri viðskiftakreditorar er eitt slag av einari heimagreiðslu fyri viðskiftafólk, har til ber at fremja vanligar flytingar, og at stovna, broyta og strika fastar flytingar, sum viðskiftafólk hevur, og sum Almannastovan skal rinda. Í sambandi við umsiting og málsviðgerð rindar ella endurrindar Almannastovan fyri skjøl, tól og tænastur til eitt nú læknar og tannlæknar, serfrøðingar, viðgerðarfólk og viðgerðarstøð, almennar stovnar, fyritøkur, kommunur og arbeiðsgevarar.

Eisini í hesum partinum av skipanini skal skiljast millum útgjaldsmál, sum ikki krevja stórvegis málsviðgerð, og viðgerðarmál, sum kunnu krevja málsviðgerð. Heimildirnar í skipanini skulu tí lagast til hetta.

Debitorskipanin hevur umvegis eitt markamót samband við innkrevjingar- og bókhaldsskipanina á Toll- og Skattstovuni. Almannastovan stovnar og umsitur krøv og fyrning, meðan Toll- og Skattstovan innheintar krøvini og sendir upplýsingar aftur til skipanina hjá Almannastovuni um inngjøld, eftirstøður, incasso v.m. Í debitorskipanini verður útistandandi hjá Almannastovuni skrásett eins og inngjøld verða bókað og dagført dagliga.

Krøv verða í summum førum stovnað automatisk t.d. í sambandi við gjald av barnapengum og dagpengum. Onnur krøv kunnu vera uppkrav fyri tryggingargjald til sjálvbodnu dagpeningaskipanina, afturgjaldsavtalur t.d. í sambandi við latan av avlamislánum, vanlig afturgjaldsskylda av forsorgarhjálp og endurgjald fyri útgjald av útlendskari pensjón.

Hagtalsskipanin – ella dátavøruhúsið – byggir á avgreiðsludáta, sum eru goymd í einum ella fleiri dátagrunnum, men neyðugt er eisini at knýta uttanhýsis dáta inn í dátavøruhúsið. Dátuvøruhúsið er somuleiðis støði undir framleiðslu av rapportum og hagtalsgreiningum umframt framsagnum (simuleringum), og tískil sera týdningarmikil liður í dygdargóðum leiðslukunningararbeiði, fíggjar- og lógararbeiði, gransking og almennari kunning um almannamál sum heild. Brúkarar av dáta úr dátuvøruhúsinum eru fyrst og fremst leiðsla á Almannastovuni, politiska skipanin, granskarar, fjølmiðlar, almenningurin v.m.

Skipanir til íbinding í skráir og skipanir hjá triðjapørtum – eitt nú hjá Toll- og Skattstovuni, Apoteksverkinum, Landsfólkayvirlitinum, Gjaldstovuni og ALS, skulu gera, at arbeiðsgongdin ikki verður drúgvari enn neyðugt, at neyðugir og rættir upplýsingar sjálvvirkandi verða fluttar í skipanina hjá Almannastovuni eins og tað kann skunda undir avgreiðsluna, at koyringar kunnu avgreiðast elektroniskt og helst on-line. Gjøllig lýsing er av teimum dátamarkamótum, sum Almannastovan hevur við aðrar skipanir og skráir, og hvussu íbindingin og elektroniski dátaflutningurin best fer fram.

Í tátti 5 verða ymsir møguleikar fyri vali av skipan og rakstri viðgjørdir. Harumframt verður gjørd ein váðameting og uppskot til verkætlanartilgongd víðari í sambandi við menningina av nýggju høvuðsskipanini.

Víst verður serliga á tveir møguleikar í sambandi við vali av skipan, sum best nøkta tann samlaða tørvin til KT-høvuðsskipanina. Annar møguleikin er at menna eina nýggja høvuðsskipan, sum so vítt gjørligt byggir á standardskipanir og standardkomponentar. Hin møguleikin er at byggja á eina lidna heildarskipan, sum er í brúki og undir støðugari víðarimenning, og er ment serliga ætlað umsiting í almannaverkinum og av almannaveitingum. Dømi um slíkt val er tann heildarloysn, sum KMD (fyrr Kommunedata) í Danmark veitir.

Fyrimunirnir við hesum báðum møguleikunum eru eitt nú, at skipanirnar eru virknar og vælroyndar umframt tøkniliga og funktionelt sera framkomnar. Eisini er talan um veitarar við sera sterkari menningarkompetansu, sum tryggjar eina áhaldandi víðarimenning og uppstiging av skipanunum, ið eisini eru fult integreraðar.

Týðandi fyrimunur við KMD-skipanunum er harafturat, at tær hava almannaveitingar sum ítøkiligt kjarnuvirksemisøki. Mett verður, at skipanirnar hjá KMD nøkta alla yvirskipaða funktiónstørvin hjá Almannastovuni, so sum hann er lýstur í hesi forkanning, men skulu tær sjálvandi tillagast føroysk viðurskifti og detailkrøv annars.

Rakstrarumhvørvið hevur í sjálvum sær lítla og onga ávirkan á ítøkiligu nýtsluna av fakskipanini, men hevur stóran týdning fyri KT-umsitingina á stovninum sum heild. Mælt verður til, at funnin verður ein heildar-rakstrarloysn við greiðum ábyrgdarbýti millum uttanhýsis veitara/-r og stovnin. Henda loysn fevnir m.a. um menning og hosting av fakskipan, veiting og umsiting av undirstøðukervi, víðarimenning av undirstøðukervi og fakskipan, og KT-trygdararbeiði.

Til tess at avmarka bindingina til ávísan veitara, tryggja at ábyrgdin fyri dáta liggur á stovninum, og at førleikar eru á stovninum at samvirka við veitara/-r, er tað av alstórum týdningi, at umsitingin og gagnnýtingin av fakskipanini í mest møguligan mun er á Almannastovuni. Umsiting av fakskipan vil her siga umsiting av brúkarum, skráum og satsskráum, upplæring av brúkarum, gagnnýting av dáta í skipanini (hagtøl), luttøka í og stýring av víðarimenning av og broytingum í fakskipan og KT-trygdararbeiði.

Ein loysn sum henda krevur, at Almannastovan hevur eitt høgt KT-førleikastøði, sum fyrst og fremst miðar ímóti at gagnnýta allar tættirnar í nýggju fakskipanini fult út.

Í tátti 5 verður eisini lagt fram uppskot um, hvussu framhaldandi verkætlanin best verður skipað og sett í verk. Mett verður av alstórum týdningi, at verkætlanin í øllum lutum og í allari menningartilgongdini er væl og virðiliga kjølfest á Almannastovuni. Mett verður, at samlaða menningartilgongdin í sambandi við nýggju KT-skipanina fer at taka 3 ár.

Váðametingin lýsir í stuttum teir vandar, ið kunnu væntast at ávirka verksetingina av eini KT-verkætlan sum teirri, ið er lýst í hesi forkanning.

Stóra vavið og mongu krøvini til hesa nýggju KT-høvuðsskipanina í huga verður mælt til, at skipanin verður ment av einum sterkum høvuðsveitara.

Í fyriliggjandi forkanning er ítøkilig kostnaðarmeting ikki gjørd. Hon verður gjørd av øðrum enn KT-bólkinum, sum skrivað hevur hesa forkanning.

Síðst í tátti 5 er orðað eitt uppskot til løgtingslóg um keyp av KT-høvuðsskipan til føroyska almananverkið. Talan er um uppskot til verklagslóg, ið gongur yvir 3 fíggjarár.

Forkanningin, sum lýsir tørvin til KT-skipan, er grundarlag undir kravgreiningini, sum er hjáløgd sum skjal 4.

# 2. Almannastovan – stutt lýsing

Hesin táttur lýsir stutt Almannastovuna sum stovn og tað virksemið, sum stovnurin hevur og varðar av. Eisini verður í stuttum greitt frá arbeiðinum at menna verandi KT-skipan umframt útbyggingarætlanunum, sum hava verið undanfarnu árini.

Fyrst verða tó høvuðstættir í kommissorium, sum er grundarlag fyri hesari forkanning, lýstir. Tað samlaða kommissorium er hjálagt hesi forkanning sum skjal 5.

## 2.1. Høvuðstættir í kommissorium

Í innganginum til kommissorium verður m.a. víst til Visjón 2015. Ein grundarsteinur undir Visjón 2015 er kunningar- og samskiftistøkni, har ásannað verður, at nýtslan av kunningar- og samskiftistøkni í einum samfelagi hevur stóran týdning fyri produktivitetin og harvið eisini fyri búskaparvøksturin. Tað almenna hevur tí týðandi uppgávur, tá ið tað snýr seg um at menna nýtsluna av kunningar- og samskiftistøkni.

Í hesum sambandi verður víst til ítøkiligar ætlanir um, at útbreiðslan av breiðbandi við árslok í 2008 skal verða millum fimm tær bestu í OECD, at fyrisitingin miðvíst skal talgildast, at borgarar og virki kunnu avgreiða síni viðurskifti við tað almenna elektroniskt, at allir føroyingar í 2006 skulu hava høvi til ókeypis at ogna sær eina talgilda undirskrift, og at í minsta lagi 30 % av øllum føroyingum skulu hava útvegað sær talgilda undirskrift í 2007.

Serligur dentur verður tí lagdur á, at ætlaða nútímansgerðin av KT-skipanini hjá Almannastovuni byggir á og styðjar øll hesi málini.

Í kommissoriinum verður nevnt, at neyðugt er at nýmenna verandi KT-skipan m.a. tí, at KT-skipanin er ófullkomin á tann hátt, at ein partur av málsviðgerðini ikki kann fara fram í eini og somu meginskipan. Hetta tarnar avgreiðsluni og ger, at ringt er at halda fyrisitingarlig krøv, sum m.a. eru ásett í kunngerð um KT-trygd. Trupult er at laga verandi skipanir til nýggj virkisøki, trupult er at framleiða hagtøl, og trupult er at fremja simuleringar um broytingar á lóggávuøkinum.

Nevnt verður sum ein høvuðstreyt, at ein nýmenning av verandi KT-skipan ikki skal forða fyri miðspjaðing av fyrisitingini. Men lagt verður aftrat, at uttan mun til hvør fremur fyrisitingina, og hvar hendan fyrisiting fer fram, so skal hon fara fram innan karmarnar av einari miðsavnaðari skipan, sum einsháttar alla kompetensu, funktionalitet og grunddáta. Tað merkir, at miðspjaðing av fyrisitingini skal fremjast við umsiting av miðspjaddum brúkarum við einari miðsavnaðari KT-skipan.

Nýmenningin av KT-skipanini fer tó fram soleiðis, at leiðslan á Almannastovuni hevur fullan ræðisrætt á skipanini, og at øll víðarimenning av skipanini fyrst og fremst tekur hædd fyri tørvinum hjá stovninum.

Í kommissoriinum verða eisini lýst eydnukrøv fyri Almannastovuna og fyri nakrar av teimum persónum og stovnum, sum hava samskifti við Almannastovuna. Millum hesi krøv kunnu nevnast:

*Eydnukrøv fyri viðskiftafólk*
Røtt málsviðgerð, góðir kunningarmøguleikar, skjótari avgreiðsla og møguleiki fyri sjálvavgreiðslu.

*Eydnukrøv fyri starvsfólk*
At skipanin styðjar undir galdandi mannagongdir, at starvsfólk hava lætta atgongd til vegleiðingar og hava ávirkan á víðarmenning av skipanini.

*Eydnukrøv fyri leiðsluna á Almannastovuni*
Møguleikar fyri innaneftirliti og framleiðslumátingar. At leiðslan fær hagtals- og simuleringsamboð á strategiskum stigi, møguleikar at gera greiningararbeiði og forsagnir í sambandi við fíggjarlógararbeiðið. Skipanin skal vera fleksibul og ikki í sínum skapi verða ein forðing fyri broytingum í sosialari lóggávu, tvs. at skipanin skal lættliga kunna tillagast til nýggj virkisøki.

*Eydnukrøv fyri aðalráð og politiskar myndugleikar*
Skipanin skal lata kunning til stýring av almannaøkinum t.d. í sambandi við umsiting, fíggjarlóg, útgreiningar og innsavnan av hagtølum. Skipanin skal í mest møguligan mun vera samskipað við og skal samvirka við aðrar skipanir hjá Almanna- og heilsumálaráðnum.

Í kommissoriinum verða eisini lýst eydnukrøv fyri aðrar uttanhýsis stovnar, t.d. kommunur, Gjaldstovuna, Landsgrannskoðaran, Toll- og Skattstovuna, Hagstovuna og fyri veitarar av upplýsingum.

*Høvuðsskipan*
Í kommissoriinum verður dentur lagdur á at menna eina høvuðsskipan til málsviðgerð og av avgreiðslu av veitingum. Krøvini til hesa skipan eru millum onnur, at øll málsviðgerð á Almannastovuni kann skipast eftir einum felags leisti; at øll málsviðgerð so vítt gjørligt gagnnýtir somu dáta; at upplýsingar í mest møguligan mun verða innheintaðir elektroniskt og sjálvvirkandi, og at somu upplýsingar frá borgarum verða gagnnýttir og ikki innheintaðir fleiri ferðir.

Harumframt skal skipanin skapa møguleika fyri *tíðar- og virksemisskráseting* og *fíggjarstýring*. Í sambandi við nýmenningina verður ment ein sjálvstøðug *debitor- og kreditorskipan* (markamót móti m.ø. Toll- og Skattstovuni og Gjaldstovuni).

Skipanin skal gera tað møguligt at gera útgreiningar og framskrivingar (simuleringar). Miðað verður eftir, at øll avgreiðsla og málsviðgerð fer fram í einum *portali* (portalloysn).

Í sambandi við menningina av eini høvuðsskipan skulu sambært kommissoriinum atlit takast til:

1. Málsbygnað og -gongd.
2. Innsavnan og endurnýtslu av dáta.
3. Validering av dáta.
4. Útrokningar.
5. Sjálvvirkandi dagføringar og ávaringar.
6. Úttøk og upplýsing til viðskiftafólk.
7. Web-funktionalitetur til brúkarar (ikki einans til starvsfólk).
8. EDI (elektroniskur dátaflutningur) til samstarvsfelagar.
9. Arkivering og burturbeining.
10. Innaneftirlit.
11. Klassifiseringar í samsvari við krøv um KT-trygd og onnur formlig viðurskifti.

Í sambandi við menning av eini *útgjaldsskipan* skulu eisini krøv til markamót móti Gjaldstovuni lýsast.

*Dátadepil*
Í kommissoriinum verður biðið um eina lýsing av dátadepli, sum skal nýtast til at kunna fáa nøktandi støðumyndir av virkseminum á Almannastovuni, og fáa eitt haldgott grundarlag fyri greining av virkseminum á Almannastovuni yvir styttri og longri tíðarskeið.

*Val av skipan*
KT-bólkurin skal útgreina viðurskiftini fyri vali av skipan. Í hesum sambandi verður mælt til, at metingar verða gjørdar, sum lýsa ymisk sløg av kostnaðum, so sum teldukostnaðir, lisensar, tímakostnaðir o.s.fr., spurningin um veitingartrygd, skiftisføri, bindingar til veitarar og onnur viðurskifti av týdningi. Støða eigur eisini at takast til í hvønn mun ein KT-skipan skal rekast við útveiting (Outsourcing) ella um raksturin skal fara fram í egnari KT-deild.

*Skjøl*
Í kommissoriinum verður nevnt, at KT-bólkurin, sum úrslit av sínum metingum og kanningum, skal lýsa sítt arbeiði og niðurstøður í hesum skjølum:

1. Tørvsuppgerð
2. Yvirskipað kravfesting av høvuðsskipan.
3. Lýsing av scenarium – skipanir og rakstrarumhvørvi.
4. Projektætlan við tíðarætlan í KT-verkætlan.
5. Kostnaðarætlan.
6. Kritiskir faktorar í KT-verkætlan.

## 2.2. Almannastovan

Almannastovan umsitur flestu sosialu útgjaldsskipanirnar á almanna-økinum. Harumframt veitir Almannastovan kunning, ráðgeving og vegleiðing til almenningin og til einstaklingar sambært kunngerð um ráðgevingar- og vegleiðingarskyldu sambært forsorgarlógini.

Almannastovan umsitur hesar lógir:

- Lóg um almenna forsorg (undantikið heimarøkt, serforsorg, stuðulsskipan fyri vaksin v.m.)
- Lóg um almannapensjónir o.a.
- Lóg um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima
- Lóg um viðbót til ávísar pensjónistar
- Lóg um uppihald á stovni
- Lóg um barnagjald til einsamallar uppihaldarar o.o.
- Lóg um stuðul til uppihaldspening
- Lóg um dagpening í sambandi við sjúku v.m.
- Lóg um ásetan og javning av almannaveitingum.

Somuleiðis umsitur Almannastovan ávísar ásetingar í:

- Lóg um barnavernd
- Lóg um almenna sjúkratrygging
- Lóg um útreiðslur sjúkrakassanna til heilivág og afturbering lands-kassans.

Almannastovan umsitur eisini *Konvention om Social Sikring* frá 15. juni 1992, sum kom í gildi í Føroyum tann 4. juli 1994. Sáttmálin fevnir um pensjónir, dagpening v.m. Føroya løgting hevur 20. apríl 2005 samtykt nýggjan sáttmála um almannatrygd. Eisini *Nordisk Konvention om Social Bistand og Sociale Tjenester* frá 14. juni í 1994 er sett í gildi í Føroyum, og hevur sum høvuðssetning at javnseta allar norðurlendskar borgarar á forsorgarøkinum.

Við støði í omanfyri nevnda regluverki er skjótt at staðfesta, hvussu fjøltáttað, umfevnandi og týdningarmikið virksemið á Almannastovuni er bæði fyri tað einstaka viðskiftafólkið og fyri samfelagið sum heild.

Harumframt viðgerð og umsitur Almannastovan árliga umleið 12.000 persónsmál, sum í alt fevna um uml. 800 mkr. í lógarbundunum veitingum. Tað er tí eyðsæð, at málsmongdin og samlaða játtanarstøðið í sjálvum sær seta sera stór umsitingarlig krøv til Almannastovuna. Hesi viðurskifti endurspeglast eisini í teimum krøvum, sum sett verða KT-skipanunum hjá stovninum.

## 2.3. Bygnaður

Mynd 1 niðanfyri sýnir stovnsbygnaðin á Almannastovuni, sum hann sær út nú. Talan er bæði um tær deildir, ið eru partar av sjálvari Almannastovuni, og teir stovnar, sum umsitingarliga eru undir Almannastovuni við egnari rakstrarjáttan á løgtingsfíggjarlógini.




*Mynd 1: Bygnaður Almannastovan*

Kjarnuvirksemið á Almannastovuni er, sum høgra síðan av myndini eisini vísir, skipað í fýra økisdeildir, tvær serdeildir og eina veitingardeild.

Økisdeildirnar í Tórshavn, Eysturoy, Norðoyum og Suðuroy veita sosiala ráðgeving og vegleiðing, upplýsa um rættindi sambært sosiallóggávuni, hjálpa við at fylla út umsóknarbløð, taka ímóti umsóknum og taka avgerð um ávísar veitingar. Økisdeildirnar eru sostatt høvuðsportrið hjá viðskiftafólkunum til veitingar og tænastur frá Almannastovuni.

Tær báðar serdeildirnar, Arbeiðsmarknaðardeildin og Serdeildin fyri børn og vaksin, veita eftir ávísing frá økisdeildunum ráð og vegleiðing til fólk, sum hava brúk fyri serligum fyriskipanum orsakað av varandi sjúku, breki ella serligum sosialum trupulleikum. Arbeiðsmarknaðardeildin tekur eitt nú avgerð í øllum málum um endurbúgving, vart starv og fyritíðarpensjón. Serdeildin fyri børn og vaksin tekur avgerð í málum um endurgjald fyri mista arbeiðsinntøku til persónar, sum heima uppihalda barni við likamligum ella sálarligum breki ella sjúku umframt í málum um endurgjald fyri útreiðslur í sambandi við serligar viðgerðarfyriskipanir.

Veitingardeildin umsitur og stendur fyri útgjalding av øllum rættarbundnum veitingum, t.d. pensjónum, sjúkradagpeningi, barnapeningi o.ø.

Umsitingarligar deildir á Almannastovuni, tvs. stápurin, eru Stjórarskrivstovan (skrivst.), Stjórnardeildin (løgfr.), Tænastudeildin (journ.), Fíggjardeildin (rokns.) og Vitanardeildin (KT).

Hjálpartólamiðstøðin veitir ráðgeving, vegleiðing og stuðul til hjálpartól, avlamisakfør og húsaumbyggingar hjá fólkum, ið eru avlamin ella hava onnur varandi brek sambært forsorgarlógini. Hjálpartólamiðstøðin er stovnur undir Almannastovuni við egnari rakstrarjáttan á løgtingsfíggjarlógini

Vinstra síða á myndini vísir teir barnaverndar- og barnaforsorgarstovnar hjá landinum, sum Almannastovan umsitur. Talan er um hesar stovnar, sum allir hava egna rakstrarjáttan á løgtingsfíggjarlógini:

- Dagstovnurin Reiðrið, sum er fyri fjølbrekað børn undir 18 ár (forsorgarlógin)
- Serdagstovnur fyri børn upp til 7 ár við atferðar- og tilknýtingarórógvi (barnaverndarlógin)
- Samdøgurstovnurin Føroya Barnaheim, sum er sjálvsognarstovnur, men børn og ung verða inn- og útskrivað sambært barnaverndarlógini
- Samdøgurstovnurin Rókin, sum er fyri børn 7-13 ár (barnaverndarlógin)
- Samdøgurstovnurin Slóðin, sum er fyri ung 13-18 ár (barnaverndarlógin)
- Stuðulsfólkaskipanin fyri børn, sum skal veita stuðul til børn undir 18 ár, sum vegna virkistarn, umlættingartørv hjá foreldrum v.m. í sambandi við varandi sjúku ella brek, hava tørv á stuðli.

Í sambandi við nýggju barnaverndarlógina er sett á stovn ein Høvuðsbarnaverndarnevnd. Skrivstova hennara er løgd undir Almannastovuna við sjálvstøðugari rakstrarjáttan á løgtingsfíggjarlógini.

Í samlaða bygnaðinum eru umleið 180 fulltíðarstørv.

## 2.4. Almannaskipanir

Í skjali 1 verður stutt lýsing givin av ymsum almannaskipanum, sum Almannastovan umsitur, herímillum dagpeningaskipanini, forsorgar-skipanini, fólkapensjón- og fyritíðarpensjónsskipanunum umframt øðrum fyriskipanum so sum stuðuli til barnagjald, stuðuli til uppihaldspening og samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima. Eisini verður lýst, hvussu nógvir persónar fáa ymsu veitingarnar. Víst verður til skjal 1.

## 2.5. Fíggjarkarmur 2006

Á løgtingsfíggjarlógini fyri 2006 eru játtaðar hesar upphæddir til ávíkavist lógarbundnu almannaveitingarnar og umsiting hjá Almannastovuni og stovnum undir Almannastovuni.

Lógarbundnu útreiðslurnar sambært løgtingsfíggjarlógini 2006 eru hesar:

| | |
|---|---|
| Stuðul til uppihaldspening | 8,2 mkr. |
| Barnagjald (netto) | 0,5 mkr. |
| Dagpeningur | 58,4 mkr. |
| Ansingarsamsýning | 11,8 mkr. |
| Forsorg | 119,4 mkr. |
| Fólkapensjón | 372,0 mkr. |
| Fyritíðarpensjón | 201,3 mkr. |
| Viðbót til ávísar pensjónistar | 19,2 mkr. |
| **Samanlagt** | **790,8 mkr.** |

Harumframt umsitur Almannastovan stuðulsjáttan til umsorgararbeiði. Játtanin til umsorgararbeiði á løgtingsfíggjarlógini 2006 er 5,3 mkr.

Útreiðslur til rakstur á Almannastovuni og stovnum undir Almannatovuni sambært løgtingsfíggjarlógini 2006 eru hesar:

| | |
|---|---|
| Almannastovan | 34,9 mkr. |
| Høvuðsbarnaverndarnevndin | 1,0 mkr. |
| Hjálpartólamiðstøðin | 5,3 mkr. |
| Føroya Barnaheim | 7,1 mkr. |
| Rókin | 3,2 mkr. |
| Slóðin | 2,9 mkr. |
| Reiðrið | 2,3 mkr. |
| Serdagstovnur | 2,3 mkr. |

| | |
|---|---|
| Stuðulsfólkaskipan fyri børn | 16,8 mkr. |
| **Samanlagt** | **75,8 mkr.** |

## 2.6. Høvuðsáhugamál/interessentar hjá Almannastovuni

Niðanfyri er yvirlit yvir høvuðsáhugamál/interessentar hjá Almannastovuni og nakrar av týdningarmestu veitarunum av upplýsingum og tænastum:

| **Persónur/stovnur** | **Áhugamál/veiting/tænasta** |
|---|---|
| Viðskiftafólk | Almannaveitingar, ráðgeving og vegleiðing |
| Løgtingið/landsstýrið | Lógir og kunngerðir<br>Fíggjarlógin |
| Almanna- og heilsumálaráðið | Lógir og kunngerðir<br>Fíggjarlógin<br>Hagtøl |
| Toll- og Skattstova Føroya | Inntøkuupplýsingar<br>Innheinting |
| Landsfólkayvirlitið | Persóns- og bústaðarupplýsingar |
| Apoteksverkið | Endurgjald fyri heilivág |
| Læknar | Læknaváttan |
| Arbeiðsgevarar | Arbeiðsgevaraváttan |
| Kommunur | Dagstovnar, barnavernd |
| Stovnar í almanna- og heilsuverkinum | Upplýsingar um stovnsuppihald<br>Heilsuupplýsingar<br>Veitingar og gjald fyri veitingar |
| Føroya Gjaldstova | Roknskaparhald |
| Postgirostovan | Útgjald |
| Dátueftirlitið | KT-trygd<br>Persónsupplýsingar<br>Skráir |
| Landsgrannskoðanin | Grannskoðan |

## 2.7. KT á Almannastovuni

*Baksýni og tilgongd 2004-2006*
Verandi viðskiftafólkaskipan (VFS) á Almannastovuni er ment í tíðarskeiðnum 1998-2000, og var upprunaliga ætlað at vera ein heildaravgreiðsluskipan, sum skuldi avgreiða tey flestu av veitingarsløgunum, sum Almannastovan umsitur.

Viðskiftafólkaskipanin varð tó ongantíð liðug, tí at játtan var ongin til menningina av øllum tættunum í skipanini. VFS er sett saman av journal- og málsviðgerðarskipan og eini útgjaldsskipan fyri umsiting av fólka- og fyritíðarpensjónum, meðan umsitingin av dagpengum, forsorg og barnapengum antin bara partvís alla als ikki er partur av VFS.

Á heysti 2004 var roynt at fáa gongd á aftur at gera VFS lidna. Í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg fyri fíggjarárið 2005 vórðu 2 mkr. settar av til at víðka VFS til eisini at fevna um dag- og barnapening. Mett varð, at nevnda upphædd rakk til fyrsta stigið, og at tað verður neyðugt við meirjáttan til endamálið tey næstu árini.

Peningurin varð tó ikki játtaður. Løgtingið ynskti at fáa eina heildarætlan fyri samlaða EDV-kervið hjá Almannastovuni. Á vári 2005 samtykti løgtingið 800.000 kr. í eykajáttan til Almannastovuna at gera tørvsmeting og kravfesting av eini heildarskipan. Endamálið er at gera eitt forprojekt, sum kann nýtast til at gera uppskot til eina verklagslóg.

Sí annars skjal 2 og skjal 2.1, sum lýsa omanfyri nevndu tilgongd meira ítøkiliga.

Tá forarbeiðið skuldi byrja, kom upp, at Almannastovan helst í ov lítlan mun hevur gjørt sær greitt, hvat stovnurin væntar av eini telduskipan, tá ið hugt verður eini 5-10 ár fram í tíðina. Almannastovan setti sær tí fyri at lýsa tann politikk og tey mál, sum stovnurin hevur við eini KT-skipan.

Stýrisbólkur varð settur at gera viðmerkingar til eitt kommissorium, sum leiðslan á Almannastovuni saman við einum uttanhýsis ráðgeva orðaðu. Í stýrisbólkinum hava sitið Petra Johnsdóttir Joensen, stjóri á Almannastovuni, Nicolai Mohr Balle, KT-leiðari á Almanna- og heilsumálaráðnum, og Leif Abrahamsen, stjóri á Gjaldstovuni.

Í september 2005 arbeiddi leiðslan á Almannastovuni saman við uttanhýsis ráðgevanum við at lýsa framtíðar tørv og krøv til Almannastovuna og til KT-skipan í hesum sambandi, og har hugt var 5-10 ár fram í tíðina. Síðani arbeiddu leiðslan á Almannastovuni og uttanhýsis ráðgevin saman við omanfyri nevnda stýrisbólki við at orða eitt kommissiorium fyri

fyrireikingararbeiðið í sambandi við gerð av uppskoti til verklagslóg um KT-íløgur hjá Almannastovuni tíðarskeiðið 2006-2008.

Í kommissorium (skjal 5) verður staðfest, at endamálið við verklagslógini er:

- At fremja eina langtíðar KT-verkætlan, sum skal nútímansgera KT-skipanirnar á Almannastovuni, við tí fyri eygað at betra um tænastuna til borgararnar og at skapa fortreytir fyri effektivisering av fyrisitingini.

- Í øðrum lagi skal hendan verkætlan medvirka til, at Almannastovan kann gerast ein sosialur vitanardepil í Føroyum, so at hon kann átaka sær ein virknari leiklut í mun til politiskar myndugleikar, kommunur, altjóða myndugleikar og onnur, ið hava áhuga fyri sosialpolitiskum viðurskiftum. Hetta verður gjørt við m.a. at kunna veita neyv hagtøl og ráðgeving um sosial viðurskifti í Føroyum.

Sum næsta stig í hesum fyrireikingum varð ein KT-bólkur settur at fremja tað í verki, sum er niðurfelt í omanfyri nevnda kommissorium. Bólkin mannaðu Erhard Jacobsen, leiðari á Vitanardeildini, Tummas E. Djurhuus, leiðari á Veitingardeildini og Fíggjardeildini, Tummas Y. Simonsen, KT-fulltrúi á Vitanardeildini, og Jónsvein Joensen, uttanhýsis ráðgevi. Erhard Jacobsen varð settur sum bólkaleiðari.

Ætlanin var, at forkanningin skuldi verða liðug við ársenda 2005. Hetta eydnaðist ikki. Trupulleikar stungu seg upp, og semja var ikki um arbeiðið í KT-bólkinum ei heldur í KT-stýrisbólkinum.

Í desember 2005 tók stjórin á Almannastovuni tí avgerð um, at Jóan Petur Hentze, leiðslusamskipari á Stjóraskrivstovuni, skuldi inn í KT-bólkin at leiða og samskipa arbeiðið og fáa tað liðugt. Leif Abrahamsen valdi um árskiftið at taka seg úr KT-stýrisbólkinum.

Nýggj tíðarætlan varð løgd fyri arbeiðið. Í hesum sambandi varð Hjørleif Hjaltalin, konsulentur frá Sam-teld, settur at luttaka í arbeiðinum at gera tann partin av útgreiningini, sum snýr seg um veitingar- og gjaldingarskipanina.

Jónsvein Joensen, uttanhýsis ráðgevi, hevur ongan lut havt í arbeiðinum eftir hálvan februar 2006. Tummas Y. Simonsen fór úr starvi á Almannastovuni 1. apríl 2006, og fór tá samstundis eisini úr KT-bólkinum. Teir tríggir Jóan Petur Hentze, Erhard Jacobsen og Tummas E. Djurhuus hava síðan mannað KT-bólkin.

Útkast til forkanningina og tilhoyrandi kravgreining varð síðst í mars 2006 løgd fyri deildarleiðslunum á Almannastovuni og KT-stýrisbólkinum, har tey høvdu høvi at viðgera tilfarið, gera viðmerkingar v.m. KT-bólkurin arbeiddi síðani víðari við forkanningini. Millum annað varð KMD boðið til

Føroya at kunna KT-bólkin, leiðsluna á Almannastovuni og KT-stýrisbólkin um tær KT-heildarskipanir, sum KMD veitir serliga donsku kommununum á almannaøkinum. Eisini varð vitjað í Microsoft Danmark. Leiðslan á Almannastovuni viðgjørdi somuleiðis forkanningina á seminari 17.-18. mai 2006.

Sí annars skjal 3, sum lýsir aðrar tættir í arbeiðinum hjá KT-bólkinum nærri, serliga fundarvirksemi í sambandi við savnan av upplýsingum v.m.

## 2.8. Serstakt um KT-trygd

Í frágreiðing frá Landsgrannskoðanini, *Frágreiðing latin løgtings-grannskoðarunum* (mars 2005), verður víst til eina gjøgnumgongd av EDV-skipanini á Almannastovuni í juli 2000, sum endaði við, at Landsgrannskoðanin sendi landsstýrismanninum eina frágreiðing, ið vísti á, at EDV-viðurkiftini á Almannastovuni vóru ikki nóg trygg. Landsgrann-skoðanin mælti til, at ábøtur vórðu gjørdar (s. 110).

Í hesum sambandi varð víst m.a. á trygdarskipanir, sum ikki vóru í lagi, góðkenningar av búskaparskipan, sum ikki vóru fingnar til vega, og at neyðugt var at fara undir eina menning av VFS-skipanini, so hon nøktaði lógarásett krøv.

Í hesi nýggju frágreiðingini frá 2005 vísir Landsgrannskoðanin á, at bøtt er um viðurskiftini á summum økjum, men á týðandi økjum eru framvegis ikki framdar nøktandi ábøtur samsvarandi tilmælunum frá juli 2000 (s. 114). Landsgrannskoðanin sigur tað vera neyðugt, at Almannastovan straks fer undir eina skipaða tilgongd (s. 114).

Landsgrannskoðanin vísir í nýggju frágreiðingini eisini á, at VFS-skipanin, sum varð tikin í nýtslu 1. januar 2000, ikki var góðkend av Fíggjarmálaráðnum sambært § 4, stk. 5 í Roknskaparkunngerðini: *Kunngerð nr. 114 frá 22. august 1996 um roknskaparverk landsins o. a.*

Í skrivi dagfest 20. juni 2003 um hesi viðursifti sigur Gjaldstovan, at soleiðis sum verandi avgreiðsluskipan á Almannastovuni er ment, so er hetta at byrja á skeivum grundarlagi, og at loysnin uttan iva hevði verið ein onnur, um Almannastovan hevði fylgt ásetingunum í roknskaparkunngerðini (s. 114).

Landsgrannskoðanin mælir í sama viðfangi til, at Almannamálaráðið í samstarvi við Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovuna orðar ein EDV-politikk viðvíkjandi menning av lokalskipanum á stovnum undir ráðnum, herímillum eisini á Almannastovuni, áðrenn støða verður tikin til, um VFS-skipanin skal verða ment víðari (s. 114).

Í váðameting av KT-kervinum hjá Almannastovuni, sum Grannskoðara-felagið Rasmussen & Weihe hevur gjørt eftir umbøn frá Almannastovuni,

verður víst á, at nógvir váðar hótta upplýsingakervið hjá Almannastovuni, og at byrgt er upp fyri einum týðandi parti av hesum, men at enn eru vandar, sum ikki er byrgt upp fyri.

Tað kann vera, at ein partur av hesum váðum ikki beinleiðis viðvíkja, hvørjar telduskipanir Almannastovan brúkar, men í váðametingini verður m.a. víst til ”grovar veikleikar í HP3000-skipanunum (Dagpengar, Alimentatión og Lønir)”, og hesir veikleikar kunnu í hvussu er setast í samband við telduskipanir í brúki - telduskipanir, sum ikki eru tíðarhóskandi longur. (*Bræv (Viðv.: Váðametingini) frá Rasmussen & Weihe til Almannastovuna dagf. 13. september 2005*).

Frágreiðingin hjá Landsgrannskoðanini eins væl og váðametingin hjá Rasmussen & Weihe snýr seg fyrst og fremst um trygdar- og góðkenningarspurningar. Hesir eru í sjálvum sær ikki orsøk til at fara undir at menna nýggja KT-skipan á Almannastovuni.

Hinvegin er sannlíkt, at arbeiðið at fremja øll trygdarkrøv og laga verandi skipanir til ásett lógarkrøv, kann fara at gerast so kostnaðarmikið sum frá líður, at hesir trupulleikar heilt ella lutvíst eiga at verða tiknir við sum týðandi partur av menningini av eini nýggjari avgreiðslu- og kunningarskipan á Almannastovuni.

Almannastovan hevur søkt Dátueftirlitið um at leingja tillagingartíðina til freistina í trygdarkunngerðini. Í umsóknini er tilskilað, at trygdartiltøk og ábøtur, ið krevja stórar umleggingar og eru kostnaðarmiklar, verða tikin við í menningina av nýggju KT-skipanini. Hetta tryggjar, at nýggja KT-skipanin, tá ið hon verður sett í verk, lýkur øll neyðug trygdarkrøv. Tað er tó ein treyt, at Almannastovan fær serstaka fígging til KT-trygdararbeiðið, sum higartil hevur verið mett kostar 1,5 mkr.

## 2.9. Samanumtøka

Hóast KT-trygdarspurningar ikki eru tað einasta, ið talar fyri at fara undir at menna eina nýggja avgreiðslu- og kunningarskipan á Almannastovuni, so eru KT-trygdarviðurskiftini týðandi orsøk til, at farast má undir eina nýmenning av verandi KT-skipan á Almannastovuni. Fyri hesum talar eisini, at KT-trygdarkrøvini eru munandi herd, síðan verandi skipan var tikin í nýtslu í 2000.

Tað er vert at gera vart við, at Almannastovan er samd við Landsgrannskoðanini, tá ið sagt verður í teirra *Frágreiðing latin løgtingsgrannskoðarunum* í mars 2004, at enn er langt á mál, áðrenn EDV viðurskiftini á Almannastovuni eru í lagi.

KT-trygdarásetingar, herundir krøv til telduskipanir sambært *løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum* við seinni

broytingum og *kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum*, eiga tí at verða tiknar við sum eitt av høvuðskrøvunum til eina nýggja avgreiðslu- og kunningarskipan á Almannastovuni.

Politiski myndugleikin hevur givið til kennar, at KT-skipanin á Almannastovuni á tryggum grundarlagi skal kunna avgreiða allar sosialar veitingar, ið stovnurin hevur ábyrgdina av. Harumframt skal ein KT-skipan á Almannastovuni kunna veita stovninum, almennu umsitingini og politiska myndugleikanum neyðug hagtøl og upplýsingar, sum eru partur av vanligu leiðslukunningini. Politiski myndugleikin hevur eisini gjørt vart við, at ein komandi KT-skipan á Almannastovuni skal halda galdandi ásetingar um búskaparskipanir.

Tað er eisini nevnt omanfyri, at verandi KT-skipanir á Almannastovuni eru ótíðarhóskandi ella í hvussu er ikki eru nøktandi, tá ið hugsað verður um nútíðar tørv á trygd og krøv um effektivitet og tænastustøði.

Almannastovan hevur í arbeiðinum við fyrireiking av nýmenning av KT-skipanini á Almannastovuni havt framtíðar krøv í huga, soleiðis at skipanini verður tryggjað eina longri livitíð, og at hon fær ein funktionalitet og fleksibilitet, ið svarar til tað, sum fæst við nútíðar tøkni.

Avgreiðslu- og kunningarskipanin á Almannastovuni verður ment sum ein høvuðsskipan við møguleikum fyri virksemisskráseting og fíggjarstýring og við eini sjálvstøðugari debitor- og kreditorskipan. Saman við hesum verður mentur ein dátadepil (dátaware-house) ella ein hagtalsgrunnur, sum gevur eina greiða mynd av virkseminum hjá Almannastovuni yvir eitt longri tíðarskeið. Dátavøruhúsið kann nýtast í ætlanunum at gera Almannastovuna til ein sosialan vitanardepil í Føroyum, og verður somuleiðis ein týðandi liður í leiðslukunningini.

Ein nýment KT-skipan skal eisini gera tað lættari at halda ásetingarnar í fyrisitingarlógini.

Fyri at fáa sum mest nyttu burtur í kunningarmøguleikunum í eini nýmentari KT-skipan, og fyri at tryggja eitt gott KT-arbeiðsumhvørvi á Almanna-stovuni, gott samskifti við uttanhýsis samstarvsfelagar og við viðskiftafólk hjá Almannastovuni, eigur KT-skipanin, sum skotið upp í omanfyri nevnda kommissorium, í mest møguligan mun at vera ein sonevnd portalloysn.

Skjøl táttur 2

1. Almannaskipanir
2. Játtanarumbøn 2004 og tilgongdin fram til eykajáttan 2005
2.1. Frágreiðing til fíggjarnevndina (dagfest 29. apríl 2005)
3. Arbeiðið hjá KT-bólkinum

# 3. KT-høvuðsskipan – integrerað avgreiðslu- og kunningarskipan

KT-bólkurin sær fyri sær eina Almannastovu, sum komandi árini ikki bara fer at avgreiða veitingar, tvs. leggja dent á málsavgreiðslu og dáta, men sum eisini í alt størri mun fer at leggja dent á vitan og handfaring av vitan. Hetta umskiftið fer at eyðkenna alt virksemið hjá stovninum framyvir.

Vitan og vitanarhandfaring fer at gera tað møguligt hjá stovninum at veita viðskiftafólki og øðrum holla ráðgeving og kunning. Stovnurin fer at kunna hava neyvt eftirlit við virksemi og avrikum. Stovnurin fer eisini í størri mun enn higartil at verða førur fyri at eftirmeta allar veitingar og at tryggja, at tær halda ásett dygdar- og tænastukrøv. Stovnurin fer at kunna hava betri eftirlit við útreiðslum og tilfeingi, nakað sum fer at gera, at tilfeingið verður brúkt á besta hátt og har, sum brúk er fyri tí, og har tað munar mest.

Sum vitanardepil fer Almannastovan at savna og viðgera upplýsingar um sítt virkisøki, tvs. at dáta, sum verða innsavnað í sambandi við málsavgreiðslu, onnur innanhýsis og uttanhýsis dáta og kunning, kunnu verða gagnnýtt í leiðslukunning, forsagnum, útgreiningum og granskingarvirksemi á almannaøkinum.

Skal Almannastovan røkka einum máli sum hesum krevst, at hon hevur eina góða og nútímans avgreiðslu- og kunningarskipan. Eina skipan, sum avgreiðir mál skjótt og væl, har sjálvvirkandi málsavgreiðsla verður nýtt í mest møguligan mun, og har ein greið málsgongd, sum er grundað á skilagóðar elektroniskar arbeiðsgongdir, ger, at arbeiðs- og ábyrgdarskipanir eru greiðar og effektivar.

Til tess at skapa bestu fortreytir fyri munandi umsitingarligum effektiviseringum er eitt av høvuðsmálunum við nýggju skipanini at automatisera meginpartin av núverandi manuellu arbeiðsgongdunum. Til dømis verður alt útrokningararbeiðið á forsorgarøkinum í dag gjørt manuelt umvegis vanlig excel-rokniørk, sum koyra uttanfyri veitingarskipanina, og allar innøkuupplýsingar frá Toll- og Skattstovuni verða inntøppaðar manuelt. Sjálvavgreiðsla, workflow-skipan og on-line íbindingarskipan við triðjapartar eru onnur øki, har munandi effektivisering er møgulig við støði í automatiseringum.

Niðanfyri verður teir ymsu tættirnar í eini nútímans avgreiðslu- og kunningarskipan lýstir. Mett verður, at skipanin fer at nútímansgera arbeiðsgongdir á stovninum og veita eitt munadygt dátagrundarlag, sum skal vera støði undir teimum meira vitanarkrevjandi arbeiðsuppgávunum hjá stovninum.

Í tilknýti til avgreiðslu- og kunningarskipanina verður eisini lýst ein debitor- og kreditorskipan, elektroniskan dátaflutning við viðskiftafólk, veitarar o.o.,

hagtalsgrunnin (dátuvøruhús), eina skipan til mál- og avriksstýring og portalurin.

*Avgreiðslu- og kunningarskipanin*
Tørvur er at hava eina avgreiðslu- og kunningarskipan, sum skal avgreiða øll veitingarsløg, sum Almannastovan umsitur, í eini og somu integreraðu KT-høvuðsskipan, har lætt er at broyta verandi veitingarsløg til broytingar í galdandi regluverki, og skjótt skal vera at stovna nýggj veitingarsløg, tá ið tørvur er á tí. Skipanin verður ment sum ein heild.

Arkitekturin byggir á tríbýtið: *dátagrunnur*, *middleware og internet/portal*.

*Millumgonguútbúnaður* (middleware) verður í dag nógv nýttur at knýta samband og avgreiða samskifti millum ymiskan KT-útbúnað, KT-skipanir og ymsar brúkarar ella ymsik sløg av brúkarum/tænastum. Sambandið byggir ofta á tað sonevnda OLTP (On-Line Transaction Processing) og hugtakið SOA (Service Oriented Architecture). Millumgonguútbúnaður verður nú eisini nógv brúktur í skipanar- og brúkaraumsiting, tá ið talan er um miðspjatt KT-umhvørvi. Millumgonguútbúnaður hevur serliga tikið seg fram sum KT-arkitekturur í sambandi við at kunning nú ofta er skipað eftir frammanundan ásettum formatum, t.d. XML. Avgreiðslu- og kunningar-skipanin á Almannastovuni byggir á nevnda KT-arkitektur.

Fyri starvsfólkini, viðskiftafólkini, leiðslu, serfrøðingar, stovnar undir Almannastovuni og aðrar týðandi brúkarar er tørvur á einari portalloysn, har nevndu interessentar hava somu brúkaraflatu og logga seg á alt eftir tí profili, persónarnir hava. Tørvurin er eyðsýndur av tí orsøk, at alt arbeiðið í, atgongdin til og samskiftið við nýggju avgreiðslu- og kunningarskipanina fer fram um portalin. Hetta merkir eisini, at stórur partur av elektroniska dátaflutningssambandinum verður avgreitt við nútímans portaltøkni, í hvussu er so langt um samskiftismøguleikarnir og trygdarásetingar loyva tí.

Mest týðandi parturin í eini nútímans avgreiðslu- og kunningarskipan er *málsavgreiðslu- og útgjaldsskipanin*, sum avgreiðir allar veitingar- og veitingarsløg, sum Almannastovan umsitur. *Workflow-amboð* stýra og stuðla bæði fakligum og umsitingarligum tilgongdum í allari málsviðgerðini.

Haraftrat koma sum nevnt aðrar skipanir so sum *hagtalsgrunnur* (datawarehouse) og *mál- og avriksstýriskipan*. Ein *debitor- og kreditorskipan* er, sum skal halda skil á ágóða og gjaldsskyldum hjá Almannastovuni, t.d. innheinting gjøgnum Toll- og Skattstovuna, og sum eisini er við í útgjaldspartinum av *málsavgreiðslu- og útgjaldsskipanini* og *elektroniska dátaflutningsmarkamótinum* við aðrar uttanhýsis veitarar av upplýsingum, skjølum og tænastum.

Týdningarmikið er, at atlit verður tikið fyri roknskaparreglugerðina og persónsdátalóggávuna, tá arbeitt verður við at gera skipanina.

*Mynd 2* niðanfyri lýsir høvuðspartarnar í avgreiðslu- og kunningarskipanini.

### *Yvirlit yvir høvuðsskipan*

Høvuðsskipanin er ein heildarskipan fyri alt virksemið hjá Almannastovuni. Høvuðsskipanin skal nýtast av øllum brúkarum, tvs. umframt starvsfólkum eisini viðskiftafólkum, arbeiðsgevarum og samstarvsfelagum í t.d. Sjúkrahúsverkinum, Heimarøktini og Serforsorgini, Apoteksverkingum og øðrum stovnum.

Allir brúkarar samskifta við høvuðsskipanina umvegis ein portal, sum hevur til endamáls at fremja:

- Eintýðuga eyðmerking av brúkarum (Single sign-on).
- Fyrisiting av rættindum, sum gevur brúkarum individuella atgongd til yvirlit, dáta og funktiónir.
- Fyrisiting av verkgongdum (process management), so brúkarar ikki hava tørv á at vita, at fleiri skipanir verða nýttar til at fremja eina verkgongd.

Høvuðsskipanin skal gagnnýta dáta og funktiónir úr øðrum skipanum. Høvuðsskipanin er soleiðis at rokna sum ein miðstøðuskipan (middleware) millum ymisk sløg av brúkarum í ávísum arbeiðsstøðum, og fleiri fakskipanir. Sí mynd 2 á næstu síðu.

*Mynd 2: Yvirlit yvir høvuðsskipan*


Viðskiftafólk
Starvsfólk
Leiðsla
Serfrøðingar
Aðrir týðandi brúkarar
User management single sign-on
Verkgongdir
Output management
Portalur
Viðskiftayvirlit
Viðskiftayvirlit (CRM)
Lógargrundarlag
Kærunevndar-avgerðir
Vegleiðingar
Vegleiðingarskipan (intranet)
Standard verkgongdir
Málsviðgerð
Avgerð
Arkivering
Journal- og málsviðgerðarskipan
Veitingarskipan
Veitingarfrymil
Veitingarsløg
Útgjalding
Viðskiftakontur
Gjaldingarskipan
Viðskiftakreditorar
Kreditorskipan
Hjálpartólamiðstøðin
Goymslu- og lániskipan
Debitorumsiting
Debitorskipan
Kreditorumsiting
Kreditorskipan
Stand. hagtøl
Simu-lering
Rapport-gene-rator
Dátavøruhús
Hagtalsskipan
Skipanir hjá triðjapørtum
Støðu- og tímaskráseting
Lønarumsiting
Starvsfólkaumsiting
IK-skipan Toll- og Skattstovan
FSL Útgjald
FSL Finansbókhald
ALS/Barsilsskipan
LFY fólkayvirlit
Toll- og Skattstovan inntøkuviðurskifti
Apotek heilivágs-yvirlit og -keyp
Talgild heilsuskipan
Aðrir partar (t.d. útland)
Avriksstýring
Persónsdáta
Málsupplýsingar
Dáta frá triðja-pørtum (EDI-dáta)
Innaneftirlit
Gerðabók
Debitorupplýsingar
Veitingar-upplýsingar
Skipanarumsiting
Brúkaraumsiting
Grunddáta

Myndin skal lesast soleiðis:

Ein brúkari – tað veri seg starvsfólk á Almannastovuni, viðskiftafólk, uttanhýsis serfrøðingur ella leiðsla – innrita seg í eina portalskipan. Portalskipanin heldur skil á øllum brúkarum og brúkararættindum. Í hesum sambandi tekur portalskipanin sær av at stýra útdáta til brúkarar fyri at tryggja, at alt útdáta í elektroniskum formi og pappírsformi verður miðlað á rættan hátt.

Portalskipanin inniheldur eisini uppseting av verkgongdum. Við hesum verður tryggjað, at allir brúkarar uppliva at talan er um eina prosess-orienteraða skipan. Verkgongdirnar verða nýttar til at gera elektronisk oyðibløð og avgreiðslur annars til starvsfólk, til viðskiftafólk og serfrøðingar.

Portalurin hevur samband við eina røð av generiskum undirliggjandi fakskipanum, sum verða nýttar til at røkja fakligu ábyrgdirnar í sambandi við fyrisitingina. Talan er um hesar høvuðspartar:

- *Viðskiftayvirlit (CRM-skipan)* – eitt samlað yvirlit yvir viðskiftafólk, sum fær upplýsingar frá øllum øðrum skipanum. Við hesum verður tryggjað, at ein brúkari, sum hevur tørv á at síggja støðu og upplýsingar fyri eitt viðskiftafólk, kann fáa hetta á einum staði. Viðskiftayvirlitið verður íbundin til aðrar skipanir so sum Landsfólkayvirlitið.

- *Journal- og málsviðgerðarskipan* – ein samlað journal- og málsviðgerðarskipan, sum verður nýtt til at skjalfesta øll mál, har metingar eru partur av málsviðgerðini. Málsviðgerð endar við einari avgerð, sum ”føðir” eina veiting. Øll mál skulu viðgerast við atliti til hóskandi einsháttan og til arkivering.

- *Vegleiðingarskipan* – eitt samlað yvirlit yvir allar heimildir, lógir og vegleiðingar, sum almannaøkið í Føroyum verður leiðrættað eftir.

- *Veitingarskipan* – eitt yvirlit yvir øll sløg av veitingum og allar veitingar (og mótveitingar) sum Almannastovan hevur ábyrgd av at lata til viðskiftafólk. Skipanin kann samanberast við produkt generator og fakturaumsiting í størri ERP-skipanum.

- *Gjaldingarskipan* – eitt samlað yvirlit yvir allar gjaldingar frá Almannastovuni umvegis Gjaldstovuna. Skipanin er íbundin til gjaldsskipanina hjá Gjaldstovuni.

- *Debitorskipan* – eitt samlað yvirlit yvir øll debitorkrøv, sum Almannastovan hevur til triðjapartar. Debitorskipanin verður íbundin til innkrevjingar- og bókhaldsskipanina hjá Toll- og Skattstovuni og høvuðsbókhaldsskipanina hjá Gjaldstovuni.

- *Kreditorskipan* – eitt samlað yvirlit yvir allar kreditorar, sum Almannastovan hevur skyldur yvir fyri.

- *Láni- og goymsluskipan* – umsitingarliga skipanin hjá Hjálpartólamiðstøðini (HTM). Verður nýtt til at umsita goymslu og útlán av hjálpitólum frá Almannastovuni. Miðað verður eftir at nýta verandi skipan hjá HTM.

- *Viðskiftakreditorskipan* – ein avgreiðsluskipan vegna viðskiftafólk. Skipanin kann samanberast við eina heimabankaskipan, har gjøld til kreditorar, sum hava krøv mótvegis viðskiftafólki hjá Almannastovuni, verða umsitin.

- *Hagtalsskipan* – eitt samlað dátavøruhús hjá Almannastovuni, sum verður nýtt til standard- og ad hoc-rapportir, og til simuleringsmodellir.

- *Skipanir* til at taka sær av samskifti við skipanir hjá triðjapørtum *(elektronisk dátaflutningsíbinding)* – høvuðsskipanin skal í mest møguligan mun gagnnýta dáta frá øðrum dátakeldum, og goyma hesi dáta í samlaða dátavøruhúsinum hjá Almannastovuni.

- *Innanhýsis fyrisitingarligar skipanir* hjá Almannastovuni – stovnar undir Almannastovuni skulu kunna verða stovnssettir og broyttir, uttan at skula útvega nýggjar og kostnaðarmiklar skipanir. Hetta merkir, at Almannastovan skal kunna veita umsitingarliga tænastu til allar stovnar undir Almannastovuni. Talan er um bókhald, løn, starvsfólkaumsiting v.m.

Tað er greitt, at nýggja høvuðsskipanin er munandi meira umfevnandi og framkomin á øllum økjum enn verandi skipanir á Almannastovuni – tað verið seg umsitingarliga, tøkniliga og funktionelt.

Mynd 3 er ein skuggamynd av nýggju høvuðsskipanini (mynd 2) samanborið við støðuna í dag, tvs. við verandi skipanir á Almannastovuni.

Myndin skal lesast á tann hátt, at tað, sum er í gráum, lýsir tær skipanir, ið eru í dag, og sum tørvur eisini verður á framyvir. Tær skipanir, sum eru kámar, er nýggja høvuðsskipanin (mynd 2). Pílarnir, ið vísa sambandið til skipanir hjá triðjapørtum, eru gjørdir við prikkum til tess at vísa á, at í dag er talan ikki um on-line samband ella íbinding. Teir myrkagráu kassarnir eru skipanir, sum í dag eru uttanfyri verandi veitingarskipan, men sum skulu verða integreraðaðir partar av teirri nýggju høvuðsskipanini.

*Mynd 3: Yvirlit yvir verandi KT-skipanir á Almannstovuni samanborið við nýggju høvuðsskipanina í uppskoti*


Viðskiftafólk
Starvsfólk
Leiðsla
Serfrøðingar
Aðrir týðandi brúkarar
User management single sign-on
Verkgongdir
Output management
Portalur
Viðskiftayvirlit
Viðskiftavvirlit (CRM)
Lógargrundarlag
Kærunevndar-avgerðir
Vegleiðingar
Vegleiðingarskipan (intranet)
Standard verkgongdir
Málsviðgerð
Avgerð
Arkivering
Journal- og málsviðgerðarskipan
Veitingarskipan
Veitingarfrymil (tó bert pensjónir)
Veitingarsløg (pensjónir, uppihaldspengar og forsorg)
Útgjalding
Viðskiftakontur
Gjaldingarskipan
Viðskiftakreditorar
Kreditorskipan
Hjálpartólamiðstøðin
Goymslu- og lániskipan
Debitorumsiting
Debitorskipan
Kreditorumsiting
Kreditorskipan
Alimentatións-skipan
Dagpeningaskipan
Stand. hagtøl
Simu-lering
Rapport-gene-rator
Dátavøruhús
Hagtalsskipan
Skipanir hjá triðjapørtum
Støðu- og tímaskráseting
Lønarumsiting
Starvsfólkaumsiting
IK-skipan Toll- og Skattstovan
Postgirostovan
FSL Útgjald
FSL Finansbókhald
ALS/Barsilsskipan
LFY fólkayvirlit
Toll- og Skattstovan inntøkuviðurskifti
Apotek heilivágs-yvirlit og -keyp
Talgild heilsuskipan
Aðrir partar (t.d. útland)
Avriksstýring
Persónsdáta
Málsupplýsingar
Dáta frá triðja-pørtum (EDI-dáta)
Innaneftirlit
Gerðabók
Debitorupplýsingar
Veitingar-upplýsingar
Skipanarumsiting
Brúkaraumsiting
Grunddáta

Tá samanborið verður millum hesar báðar myndirnar er týdningarmikið at gera vart við, at eitt nú verandi veitingarskipan er avmarkað til bert at fevna um pensjónsveitingar. Harumframt koyra alimentatiónsskipanin og dagpeningaskipanin uttanfyri VFS-skipanina sum sjálvstøðugar skipanir. Eingin skipan er til forsorgarveitingar, har simpul excel-rokniørk eru høvuðsamboðið í dag. Málsviðgerðaskipanin, tvs. ScanJour, er ein lutvíst integrerað skipan við veitingarskipanina, og fevnir um allar veitingar á Almannastovuni. Harumframt eru sum nevnt eingin on-line íbinding til dátuskráir ella skipanir hjá triðjapørtum.

Tó at mynd 3 ikki kann lýsa allar munir á funktionalitetum v.m. samanborið við mynd 2 – eitt nú automatiseringar og aðrar effektiviseringsfunktiónir – so er í nýggju høvuðsskipanini stórur dentur lagdur á at skapa eina integreraða heildarskipan, har allar deilskipanir hanga saman hvør við aðra, og har allar neyðugar skipanir og funktiónir eru tiknar við, skal Almannastovan lúka øll tey mongu krøvini til umsiting og vitan framyvir.

## 3.1. Lýsing av høvuðsmálsgongd

Miðleingjan í avgreiðslu- og kunningarskipanini er *høvuðsmálsgongdin*, sum er sett saman av hesum pørtum: *journal*, *avgreiðsluskipan*, *útrokning av veitingum* og *út- og inngjaldspartinum*. Í hesum sjálvstøðuga skipanar-partinum fer øll málsavgreiðsla fram.

Høvuðsmálsgongdin fevnir um málsviðgerð, sum verður stýrd av eini elektroniskari *arbeiðsgongd* (workflow). Málsviðgerðin verður stuðlað av beinleiðis atgongd til ymsar *skráir*, sum lata input (stam- og satsdáta) til málsviðgerðina. Fleiri av hesum skráum kunnu verða dagførdar við beinleiðis elektroniskum dátaflutningssambandi við uttanhýsis samstarvs-partar.

*Veitingarsløg*
Eitt aðalhugtak í skipanini er veitingarslagið. Veitingarslag staðfestir, hvat slag av veiting er til viðgerðar, men staðfestir eisini, hvussu tann veitingin, sum er staðfest sum eitt ávíst veitingarslag, skal handfarast í skipanini – t.d. hevur eitt ávíst veitingarslag bara ein útrokningarhátt, í hvussu er soleingi hesin nøktar útrokingarkrøvini til hetta ávísa veitingarslagið. Hinvegin kann sami útrokningarháttur brúkast til ymisk veitingarsløg, um tað er í samsvar við ásettar mannagongdir.

Yvirlit yvir tey veitingarsløg, sum Almannastovan umsitur í løtuni, er viðlagt sum skjal 1 aftast í kravgreiningini (sum er skjal 4 í forkanningini).

Hóast veitingarsløgini í hesum yvirlitinum eru bólkað í nakrar og 20 høvuðsbólkar, so vil hvør høvuðsbólkur innihalda í minsta lagi eitt ella upp til fleiri veitingarsløg, sum skjótt kunnu gerast fleiri hundrað í tali. Kortini vil tað vera rætt at halda fast við høvuðsveitingarsløgini og so bólka

undirveitingarsløgini í hesar. Hetta serliga fyri at kunna gera eitt skilagott hagtalsbýti.

Høvuðsmálsgongdin er lýst niðanfyri í mynd 4. Øll liðini í høvuðsmáls-gongdini verða síðan lýst neyvari.

Endamálið við tí komandi er ikki at lýsa eina KT-skipan, tvs. eina tekniskt veruleikakenda skipan, men heldur at lýsa meginhugtøkini, sum eiga at vegleiða tey, sum kravfesta og smíða eina veruliga heildarskipan.

Lýsingin av høvuðsmálsgongdini byggir í stóran mun á verandi arbeiðsgongdir á Almannastovuni, m.a. soleiðis sum hesar verða avgreiddar í VFS-skipanini. Tað eru tó frávík m.a. tí, at øll veitingarsløg nú verða umsitin í eini og somu KT-skipan, og at mett verður, at mannagongdir og málsgongdir annars kunnu optimerast og effektiviserast við nýggju skipanini.

*Mynd 4: Høvuðsmálsgongd*


Høvuðsmálsgongd
24. maj 2006
Lógir, kunngerðir, reglur, avtalur og vegleiðingar
Manna-gongdir
Persóns- og familju- og kontoupp-lýsingar
Inntøku-upplýsingar
Móttøka av umsóknum og skjølum
Umsókn/Skjøl
Útgjalds- ella viðgerðarmál
Útgjaldsmál
Viðgerðarmál
Validering
Upprættan av máli
Tørvslýsing
Kæra
Avgerð
Sýtan
Veiting
Veitingarslag
Frádráttir/ kreditorar
Útgjalds-grundarlag
Útrokning
Satsir
Útgjøld
Ogn/ skuld
Útgjald
Útgjaldsslag
Endi og arkivering

*Høvuðsmálsgongd*
*Lógir, kunngerðir, reglur, avtalur og vegleiðingar*
Her verður meint við tað regluverk, sum eru tann heimild, sum Almannastovan avgreiðir mál eftir.

*Mannagongdir*
Her er talan um tulking og útgreining av regluverkinum við tí fyri eyga at umsita lógarøkið. Mannagondir kunnu verða til sum persónlig vitan, uppgávulýsing, skjøl, men kunnu eisini vera innbygdar í KT-skipanina. Mannagongdir áseta, hvørji atlit skulu takast í málsviðgerðini, og hvørjar treytir eru fyri at veiting kann játtast.

*Stovnan av máli*
Tann, sum stovnar mál, avgerð, hvat málið snýr seg um. Málsviðgerðin byrjar við stovnan av máli. Høvið til at stovna mál kann verða móttøka av útfyltum oyðiblaði, brævi, umsókn og í onkrum føri læknaváttan. Málið verður stovnað við støði í innkomnum skjølum og upplýsingum og persónsdátaskránni. Innkomudagur verður skrásettur, tá ið mál verður stovnað.

Skipanin ger skilnað millum *útgjaldsmál*, sum verða viðgjørd sjálvvirkandi við støði í innkomnum elektroniskum skjølum og tískil fara beinleiðis til avgerð, og *viðgerðarmál*, sum verða viðgjørd sum vanlig mál.

Í sambandi við stovnan av máli, verður *málsánari* staðfestur. Málsánari (knýttur at deild og við starvsheiti t.d. leiðari/sosialráðgevi/málsviðgeri) kann verða, men nýtist ikki at vera málsviðgeri.

*Sjálvvirkandi arbeiðsgongd* (workflow-skipan) er knýtt at stovnan av máli og ásetan av málsánara.

Undir stovnan av máli, verður persónur (umsøkjari) knýttur at standardfamilju.

Mál kann vanliga bara verða stovnað, um stamdáta, t.d. persónsdáta, eru tøk. Fyribilsstovnan av máli kann tó koma fyri, fyri at rættur innkomudagur kann verða staðfestur.

*Skráir*
*Umsókn/skjøl*
Innskannað skjøl, umsóknir, brøv, úttalilsir, læknaváttanir v.m. Eisini skjøl, sum koma beinleiðis í skipanina uttanhýsis frá, t.d. umsókn frá viðskiftafólki, lækna- og arbeiðsgevaravváttan v.m.

*Persóns-, familju og kontuupplýsingar*
Stamdáta við persónsdáta (føðingardagur, bústaður, kyn, sivilstøða), familjuupplýsingar og kontuupplýsingar til veitingar og ymisk útgjøld. Skráin kann eisini innihalda upplýsingar um onnur enn viðskiftafólk: t.d. starvsfólk, kreditorar, arbeiðsgevarar o.tl.

Í skránni eru eisini *tjóðskapar- og bústaðarupplýsingar*, upplýsingar um persónar, sum hava búð ein part av teirra vaksna lívi uttanfyri Føroyar/ríkið. Hetta eru upplýsingar, sum verða brúktir í sambandi við útroknan av sonevndu brøkpensjónini.

*Inntøkuupplýsingar*
Upplýsingar um inntøku, ognir v.m. Hesar upplýsingar skulu í flestu førum vera tøkar, um tørvslýsing skal kunna gerast.

Tað hevur týdning at inntøkuupplýsingar eru býttir sundur í inntøkusløg, t.d. A-inntøka, B-inntøka, rentuinntøka, pensjón, arbeiðsloysisstuðul og annar stuðul (t.d. ÚS). Somuleiðis er brúk fyri at hava skattligar ognarupplýsingar tøkar.

Omanfyri nevndu skráir kunnu víðkast við skráum, sum innihalda almennar ella felags málsupplýsingar. T.d. hevur Hjálpartólamiðstøðin sína egnu skrá yvir hjálpartól og útlan av hesum hjálpartólum. Týðandi latarar av upplýsingum og dáta til omanfyri nevndu skráir eru: Landsfólkayvirlitið, Teldutøka Heilsuskráin, Apoteksverkið, Toll- og Skattstovan, kommunur, læknar, serfrøðingar o.o.

*Tørvslýsing*
Tørvslýsingin byrjar við ásetan av veitingarslagi. Talan er um meting við støði í mannagongdum, kravdum og tøkum upplýsingum. Serligur dentur verður lagdur á heilsu og inntøkuupplýsingar. Upplýsingar til tørvslýsingina kunnu eisini fáast til vega við vitjan og við úttalilsum frá serfrøðingum.

Í tørvslýsingini verður inntøkugrundarlagið ásett.

Tørvslýsingin verður broytt t.d. í sambandi við broyting ella varandi broyting í inntøkugrundarlagnum og broytingum í heilsu-, arbeiðs-, og sivilstøðu. Aðrar almannahendingar kunnu vera, at børn gerast 18 ár, at hjúnafelagi gerst fólkapensjónistur, at fyritíðarpensjónistur gerst fólkapensjónistur, at viðskiftafólk flytir á stovn, doyr o.s.fr.

Í onkrum føri (t.d. í sambandi við veiting av hjálpar- og røktarviðbót), kann viðbótin fella burtur fyribils ella varandi, um onnur veiting verður veitt (t.d. at fyritíðarpensjónistur fær ansingarhjálp, verður lagdur inn á sjúkrahús o.tl.).

Metingin kann í onkrum føri verða send uttanhýsis parti til viðgerðar.

Í summum málum, t.d. útgjaldsmálum, tá ið rættur er staðfestur, fyriliggur eingin verulig tørvsmeting, men ein validering, sum í onkrum føri kan viðføra, at útgjaldsmál verður broytt til viðgerðarmál.

Tørvslýsingin letur input til útgjaldsgrundarlagið (sí niðanfyri).

Ein ella fleiri málsviðgerar kunnu verða settir at avgreiða málið, tó skal skilnaður verða millum játtan og ávísing.

*Avgerð*

Avgerðin er grundað á, at málið er nóg væl lýst og skjalfest. Um grundgeving og í tí sambandi tilvísing til rættarreglur avgerðin er grundað á sí § 23 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg.

Avgerðarheimildin kann liggja á ávísum ábyrgdarstøði á stovninum, og kann vera ásett í mun til veitingarslag, upphædd og viðskiftafólk (deildir).

Fylgd verður ein avgerðarverkagongd (workflow), t.d. kunnu verða hildnir avgerðarfundir at taka støðu til avgerðarupprit.

Avgerðartilgongdin kann fara fram við kravi um at nýta fastar skabelónir.

Millum avgerðarmøguleikarnar eru: a) biðið verður um fleiri upplýsingar, b) nøktandi upplýsingar ikki tøkir. Málið dettur tí møguliga burtur, c) játtan (veiting) ella d) sýtan. Avgerð kann eisini liggja til grund fyri eini eingangsveiting, tíðaravmarkaðari veiting ella varandi veiting.

*Sýtan*

Boð til umsøkjara um at umsóknin verður ikki gingin á møti.

*Veiting*

Staðfesting av einari avgerð um játtan. Heimilar og setir eina transaktión (t.d. útgjald) í gongd. Kann eisini vera lán av hjálpartólum t.d. HTM.

Almannahendingar, sum verða skrásettar, kunnu eftir frammanundan ásettum reglum føra til, at veitingarstatus verða broytt, t.d. at veiting steðgar, (eitt nú tá ið viðskiftafólk doyr, kemur fyri seg aftur, fær arbeiði, ella at fyritíðarpensjónistur ikki fær hesa veiting, tá ið hann ella hon fyllir 67 ár o.s.fr.,) ella at veiting automatiskt verður beind til nýggja tørvsmetan.

*Kæra*

Umsøkjari nýtir rættin av kæra eina avgerð, sum Almannastovan hevur tikið. Kæra kann føra til at tørvslýsing má gerast av nýggjum ella at mannagongdir mugu endurskoðast. Um kæruvegleiðing sí § 24 í løgtingslóg nr. 132 frá 10. juni 1993 um fyrisitingarlóg.

*Veitingarslag*

Veitingarslag verður stovnað við støði í mannagongdum. Talan er um ein lista við veitingarsløgum, sum málsupprættarar og/ella málsviðgerarar kunnu velja. Veitingarslag verður altíð knýtt at eini veiting og er avgerandi fyri, hvussu veitingin verður viðgjørd, t.d. útroknað, útgoldin v.m.

Talan kann vera um eina ella fleiri transaktiónir, sum t.d. eru tíðaravmarkaðar, tíðaróavmarkaðar, eingangsveiting, nærri ásett tal av útgjaldingum ella ávirkaðar av hendingum/broytingum.

Veitingarslag kann verða skipanarliga avmarkað á ymsan hátt. Ávaringar gera vart við, um sama veitingarslag kann gjaldast tvær ella fleiri ferðir samstundis til sama persón, ella at eitt veitingarslag ikki kann latast sama persóni samstundis sum viðkomandi fær annað veitingarslag.

Við vali av veitingarslagi verða eisini feilfráboðanir aktiveraðar, um dátagrundarlagið ikki er hóskandi til valt veitingarslag o.s.fr.

Veitingarslag er høvuðsluturin í tíðar-, máls-, tilfeingis- og avriksstýring. Veitingarslag er bindilið millum mál og veiting t.d. verða parametrarnir avgreiðslutíð og tyngd av málum ásettir í sambandi við stovnan av veitingarslagi.

Veitingarsløg verða stovnað, broytt ella niðurløgd av skipanarumsitara.

*Útrokning*
Frammanundan forritað tilgongd í sjálvari skipanini knýtt av ávísari veiting (veitingarslagi). Kann vera sett saman av einari ella fleiri útrokningar-tilgongdum.

Parametrar verða virðissettir við dáta, ið verða ásett í veitingarslagnum, í satsskráum (t.d. satsir í mun til inntøkustøði) og í útgjaldsgrundarlagnum. Í sambandi við útrokning fer eftirlit fram (validering). Umframt at útrokna upphædd, útskrivar tilgongdin eisini feilistar, feilboð og ávaringar.

Fyri fleiri veitingarsløg er tó ikki talan um nakra veruliga útrokning, men um at áseta eina upphædd, møguliga nær og hvussu ofta upphæddin skal gjaldast og á hvørja kontu.

Hesin skipanarparturin skal eisini kunna eftirrokna veitingar, tá ið rætt uppgjørdu upplýsingar, t.d. inntøkuupplýsingar, eru tøkir, t.d. eftirrokning av pensjón og umrokning av pensjón og forsorg.

*Útgjaldsgrundarlag*
Útgjaldsgrundarlagið verður partvíst staðfest og ásett í tørvsmetingini og viðhvørt uttan tørvsmeting. Útgjaldsgrundarlagið kann verða broytt í sambandi við nýggja málsviðgerð, umrokning ella eftirrokning.

Útgjaldsgrundarlagið inniheldur bæði dáta, sum verða brúkt í útrokningum og dáta, sum stýra t.d. útgjaldi, útskriving av gjaldsváttan v.m. Tað verið seg kontunummar, frádráttir, frádrátt fyri skatt o.s.fr. Í útgjaldsgrundarlagnum verður eisini útgjaldsskeið (tíðaráseting á rokning) ásett, upplýsingar um veitingarslag og ID fyri hvørt útgjaldsslag.

Í sama útgjaldsgrundarlagi kunnu eisini verða tikin við útgjøld til kreditorar, t.d. útgjald til húsaleigu saman við veiting til forsorgarviðskiftafólk.

*Satsskrá*
Ymsir satsir, m.a. teir, ið verða ásettir í ásetingarlógini. Eisini yvirlit yvir skattasatsir (lands- og kommuskattasatsir), skattligar frádráttir (t.d. barnafrádrátt), gjøld til tryggingar, frítíðarpening, eftirløn, barsilsgrunn, ALS o.tl.

Skráin verður umsitin av skipanarumsitara.

*Útgjald*
Útgjald er vanliga ein peningaflyting. Kann í summum føri vera bóking av upphædd, sum ikki verður útgoldin. Útgjøld verða bókað sum út- ella inngjøld, ogn ella skuld í eini debitor-/kreditor skipan.

Útgjaldsskipanin skal hava eina samanteljing av útgjøldum, so hvørt sum tey eru aktiveraði sum partur av næstu koyring. Hendan upphæddin kann nýtast í sambandi við upplýsing um komandi gjaldføristørv.

Gjaldsupplýsingar til skipan (nøkur eyðkend dømi):
- dagfesting
- koyrings-ID (bekt nr.)
- transaktións-ID
- bókingarperioda
- bókingarár
- bókingarkonta
- gjaldsdagur
- móttakari (viðskiftafólk, lækni, kommuna, stovnur)
- p-tal
- a-tal
- veitingarslag
- upphædd (viðhvørt býtt sundur í fleiri upphæddir: t.d. grundarupphædd fólkapensjón, forsorgarveiting – møguligir frádráttir)
- frádráttir fyri gjald til ALS og til Barsilsskipanina, ov nógv/ov lítið útgoldið í veiting v.m.
- skattur
- frádráttir fyri kreditorar sambært avtalu
- kontunummar
- fyrningartíð á afturgjaldsskyldu.

*Útgjaldsslag*
- útgjaldsavgreiðari (svarandi til markamót móti t.d. Gjaldstovuni, Toll – og Skattstovuni og Apoteksverkinum)
- skattskyldugt útgjald
- ikki-skattskyldug veiting
- ikki-skattskyldugt endurgjald
- endurgjaldsskylda

- afturgjaldsskylda
- krav
- kontant gjald (sum verður bókað).

## 3.2. Stýring av arbeiðsgongd (Workflow)

Stýringin av arbeiðsgongd snýr seg serliga um at áseta støður í skipanini, brúkarar og brúkaraheimildir, virksemi og uppgávur og lógarkravdan funktiónsskilnað. Í avgreiðslu- og kunningarskipanini verður roknað við 6 støðum, men tær kunnu saktans verða væl fleiri í eini veruligari virknari skipan.

Í teirri dagligu arbeiðsgongdini eru:

Í *málsupprættan:* 1 støða. Virksemi og høvuðsuppgávur eru í hvussu er 8 (í veruleikanum møguliga fleiri). Heimildin (málsupprættari) endar við, at mál er upprættað. Sí mynd 5 niðanfyri.

*Mynd 5: Upprættan av máli*

**Málsgongd**

# Upprættan av máli

Støða 1



Í *málsviðgerðini* eru 2 støður. Í øðrum føri endar støðan við uppskoti til veiting, og í seinna førinum endar støðan við antin játtan og víðariavgreiðslu av veiting ella við sýting. Heimildirnar eru tvær: onnur er málsviðgerð og hin er avgerð um játtan ella sýting. Virksemi og høvuðsuppgávur eru skiftandi, viðhvørt fleiri og viðhvørt færri. Sí mynd 6 niðanfyri.

*Mynd 6: Viðgerð av máli*


Málsgongd
Viðgerð av máli
Støða 2-3
Heintan av upprættaðum máli
Lýsing av máli
Kravdir upp-lýsingar tøkir
Innheinta fleiri upplýsingar
Uppskot um veiting
Støða 2
Útgjaldsmál
Játtan av veiting
Sýtan
Bræv til móttakara
Játtan
Ásetan av veiting
Útgjaldsgrundarlag
Bræv til móttakara
Veiting
Støða 3

Í *útrokning/útgjald* eru 3 støður. Tann fyrsta er meira ella minni automatisk, har koyringin kann steðga í sambandi við útskriving av feillista, sum skal viðgerast, áðrenn koyringin kann halda fram. Í øðrum føri endar støðan við, at útgjald er greitt til útgjaldingar. Í triðja føri verða boð givin um koyring og avgreiðslu og bóking av gjøldum v.m.

Heimildirnar kunnu vera fleiri: málsviðgerð, eftirlit við feillistum, vanligt eftirlit, og leysgeving av koyringum til avgreiðslu.

Virksemi og høvuðsuppgávur eru fleiri, men tilgongdin er í stóran mun automatiserað. Sí mynd 7 niðanfyri.

*Mynd 7: Útrokning/útgjald*


Málsgongd
Útrokning/útgjald
Støða 4-6
Veiting
Innlesing í útrokning
Validering
Feillisti (Manna-gongdir viðv. rættingum)
Støða 4
Ger útrokningar-grundarlag
Satsir
Útrokning
Formlasavn/Forrit
Samlað útgjaldsupp-hædd í koyring
Útgjald/ útgjaldsslag
Útgjaldari
Eftirlitslistar
Støða 5
Boð um koyring
Fráboðan til útlíkning av koyring
Gjaldsflyting
Avgreiðsla av útgjaldi (koyring)
Bókingar
Fráboðan til gjaldsmóttakara
Støða 6

Stýring av arbeiðsgongd er nú vorðið standardpartur av flestu framkomnu journal- og dátugrunnaskipanum. Stóra takið við hesum partinum av skipanini er ikki tað teldutekniska, men heldur at fáa staðfest eitt skilagott uppbýti av heimildum, uppgávum og *timing* (at fáa uppgávurnar at flyta seg effektivt gjøgnum tilrættaløgdu arbeiðsgongdina) o.s.fr., og at tryggja sær, at øll starvsfólk skilja týdningin av hesi partinum í eini málsviðgerðarskipan.

Arbeiðsgongd (workflow) kann eisini knýtast at mál- og avriksstýring og hagtalsuppgerðum.

Umframt tað stýring og effektivisering, sum liggur í skipaðari arbeiðsgongd (workflow), kann avgerandi effektivitets- og produktivitetsøking eisini fáast við, at einstakar arbeiðsprosedurur ella ávísar arbeiðsuppgávur (t.d. upprættan av máli og veiting) verða lutvís automatiseraðar við vegleiðarum ella sonevndum *wizards* í KT-skipanini.

Fyrimunir við slíkum skipanum ella mannagongdum, har wizards eru við til at stýra arbeiðsgongdini, eru, at størri vissa fæst fyri, at tann formelli parturin av málsviðgerðini verður nøktandi avgreiddur, áðrenn málsviðgerðin endar, t.d. at reglur verða fylgdar, kravdir og neyðugir upplýsingar verða fingnir til vega, at brøv og fráboðanir verða send út, at upplýsinga- og hoyringsskyldan er hildin, at freistir eru hildnar v.m. Talan er um eitt skipað samskifti millum starvsfólk og KT-skipan, sum átti at skundað undir málsavgreiðsluna.

Slíkar skipanir kunnu eisini verða við til at stuðla uppundir rættari málsviðgerð, tvs. at eisini tann materielli parturin av málsviðgerðini heldur ásettan standard. Harumframt tryggja slíkar skipanir størri einsháttan í málsviðgerðini og rættlag í arbeiðnum.

Eitt úrslit av hesi effektivitetsøking kann vera, at málsviðgerar og sosialráðgevarar fáa stundir til at arbeiða meira miðvíst við sosialfakliga partinum av arbeiðinum, tvs. vegleiðing, ráðgeving v.m., sum í dag í ov stóran mun liggja á láni vegna vantandi orku.

# 4. Tørvslýsing

Í hesum tátti verða ymsu partarnir av høvuðsskipanini og sambondini teirra millum lýstir nærri.

## 4.1. Portalur

Í hesi forkanning verður sum aðalgrundarlag fyri nýggju skipanini mælt til, at Almannastovan nýtir eina portalloysn til at umsita alt atgeingið til allar funktiónir í skipanunum. Endamálið er at einrætta virkisháttin í brúkaramarkamóti fyri á hendan hátt at gera tað so einfalt sum gjørligt fyri allar brúkarar at nýta skipanirnar.

Í øðrum lagi skulu onnur enn starvsfólk og leiðsla á Almannastovuni í mest møguligan mun hava atgongd til at nýta skipanina. Á hendan hátt verður skipanin ikki bert eitt innanhýsis amboð á Almannastovuni, men gerst ein miðdepil fyri trygga handfaran av sosialum dáta hjá øllum teimum pørtum, sum hava ábyrgd og áhuga í hesum dáta.

*Almennur tørvur til portalin*
Í breiðum týdningi eru hesir høvuðspartar í portalloysnini:

- *Viðskiftaportalur* – har viðskiftafólk á Almannastovuni kunnu logga á og samskifta við skipanir og málsviðgerðir á Almannastovuni um egin viðurskifti.

- *Starvsfólkaportalur* – har starvsfólk á Almannastovuni kunnu logga á til allar verkgongdir, sum starvsfólk eru partar av. Starvsfólkaportalurin gevur atgongd til starvsfólk sambært skilmarkaðum leiklutum, hesi hava á Almannastovuni.

- *Leiðsluportalur* – har leiðslan á Almannastovuni og onnur leiðsla – fyrst og fremst Almanna- og heilsumálaráðið – kunnu logga á fyri at fáa atgongd til góðkenningarverkgongdir, hagtøl og onnur virkisøki, sum eru viðkomandi á leiðslustigi.

- *Serfrøðingaportalur* – har serfrøðingar uttanfyri Almannastovuna og onnur uttanhýsis starvsfólk kunnu logga á fyri at fáa atgongd til einstøk mál, og at kunna veita skjøl til mál.

Ein høvuðshentleiki í portalinum er møguleikin fyri Single sign-on, tvs., at tú loggar teg á skipanina við teimum rættindum og samleika, sum tær eru tillutað. Hetta merkir, at brúkarin verður eyðmerktur og hevur samsvarandi atgongd til bæði kunningartilfar, KT-arbeiðsskipanir, hagtalsgrunnar (dátuvøruhús), KT-tænastur so sum teldupost v.m.

Trygdartørvurin er, at tey dáta, ið nýtt verða, verða goymd á browsaraniveau og ikki á lokal teldu. Tørvur er á brúkaraumsitingarskipan, sum umsitir allar brúkarar og rættindini hjá brúkarunum við einum Single sign-on. Neyðugt er, at trygdin er í lagi við, at alt samskiftið er bronglað. Heimaarbeiðspláss skulu hava VPN-samband (Virtual Private Network) við arbeiðsplássið.

Portalurin er eitt webmarkamót við undirliggjandi ritbúnaði, sum gevur brúkarum og starvsfólkum atgongd til kunning, KT-skipanir og ymsar KT-tænastuveitingar, og sum ger tað møguligt at hava sjálvavgreiðslu.

Við *sjálvavgreiðslu* meinast t.d. við, at :

- viðskiftafólk fylla út elektronisk oyðibløð og umsóknir on-line
- arbeiðsgevarar fylla út inntøkuváttanir á portalinum í sambandi við dagpening og arbeiðsviðurskifti í sambandi við vart starv og endurbúgving
- læknar senda inn læknaváttanir til Almannastovuna elektroniskt
- samskiftið millum kommunurnar og Almannastovuna fyrigongur um portalin
- viðskiftafólk fáa atgongd til egnar journalupplýsingar um portalin.

Tá viðskiftafólkið hevur sent síni dáta og upplýsingar inn um portalin, skal skipanin sjálvirkandi senda kunning til viðskiftafólkið um móttøku av dáta, og um umsóknin er enda í játtan, sýtan ella skal viðgerast manuelt. Tann sjálvvirkandi fráboðanin um játtan ella sýtan er møgulig í teimum málum, sum kunnu automatiserast so sum dagpeningur og fólkpensjónir.

*Tørvur til viðskifta- og áhugaportalin*
Atgongdin hjá viðskiftafólkunum og áhugabólkunum skal skiljast sundur alt eftir tí tørvi og máli, ið viðkomandi hevur á Almannastovuni.

Alt elektroniskt samskifti millum viðskiftafólk og skipanina skal skipast við *talgildum signaturi*. Viðskiftafólk skal kunna fylla út og senda inn oyðibløð on-line, og møguligt skal vera hjá viðskiftafólki at kanna, hvussu langt umsóknin um t.d. fyritíðarpensjón er komin, um læknin ella arbeiðsgevarin hevur sent inn váttan um sjúku og inntøkuviðurskifti í sambandi við umsókn um dagpening ella at lesa kontuavrit umvegis eina E-boksskipan.

Ein FAQ-listi (”oftast settir spurningar”) kann verða partur av portalinum bólkaður eftir evni, so at viðskiftafólk kunnu fáa skjót svar uppá almennar spurningar. Harumframt ein skipan, har til ber at rokna dømi um útrokningar av veitingum, sum byggja á inntøppað dáta frá viðskiftafólki.

Arbeiðsgevarar skulu kunnu senda arbeiðsgevaraváttan um portalin t.d. í sambandi við inntøkuváttan um dagpening. Elektroniskar læknaváttanir skulu kunnu yvirførast um portalin. Elektroniska samskiftið um portalin við læknar, sálarfrøðingar, fysioterapeutar, kriminalforsorg, barnaverndar-

nevndir, sosialar deildir skal kunna sporast í einari ”journalisering” av samskiftinum.

Serfrøðingar skulu hava atgongd til skipanina um portalin, og skulu kunna inntøppa ymiskar fakligar “standard” metingar og frágreiðingar í sambandi við málsviðgerð. Standard frágreiðingar og støðumetingar hjá ymiskum stovnum og felagsskapum sum t.d. Heimarøktin og Serforsorgin, Blindastovnurin, Deyvahúsið, ALV, Sernámsdepilinum, miðnámsskúlum í Føroyum og Danmark, viðgerðarstovnum í Føroyum og Danmark, danskar kommunur, skulu kunna inntøppast um portalin.

Kreditorar hjá Almannastovuni skulu eisini kunna síggja kontuavrit (E-boksskipanin), og skulu somuleiðis kunna senda elektroniskar rokningar til Almannastovuna um portalin.

Av øðrum áhugapørtum kann nevnast Almanna- og heilsumálaráðið, sum skal kunna leita upp hagtøl um portalin, t.d. hagtøl fyri tal av pensjónistum, ið ikki fáa viðbót ella vavið at læknaváttanum í dagpeningi. Tá tað kemur til áhugapartarnar er týdningarmikið, at áhugabólkarnir bert fáa relevant hagtøl innan áhugaøkið – hagtølini skulu tó anonymiserast og ikki skal verða loyvt at fara longur niður enn ein massa á 10-20 individir. Hetta verður nærri ásett í skipanini við dátavøruhúsi.

Portalurin kundi eisini havt “starvsprofil”-dátagrunn til fyritøkur og arbeiðsgevarar í Føroyum í sambandi við endurbúgving o.l. Harumframt eina vøru- og goymsluskrá hjá Hjálpartólamiðstøðini.

Á portalinum skal tú kunna tú samskifta, tú skalt útinna arbeiðsuppgávur, samstarva um arbeiðsuppgávur, heinta kunning um ymiskt (t.d., at starvsfólk hava skjóta atgongd til mannagongdir, vegleiðingar og leiðslukunning).

*Tørvur til starvsfólkaportalin*
Portalurin skal verða arbeiðsumhvørvið hjá starvsfólkunum og í ávísan mun hjá samstarvspartnarum – her kann talan verða um elektroniskt samskifti millum kommunurnar og Almannastovuna í sambandi við t.d. brekmál.

Atgongdin til portalin skal differentierast ella skiljast sundur alt eftir innihaldi og arbeiðsuppgávu hjá starvsfólkunum. Tað er týdningarmikið, at atlit verða tikin fyri funktiónsskilnaði, tvs., at sami persónur ikki skal hava møguleika fyri bæði at játta, vátta og samstundis ávísa eina veiting, og at starvsfólkini bert skulu kunnu arbeiða við mál, sum er innan teirra starvsøkið.

Tørvur er eisini á at portalurin yvirfyri starvsfólkunum skal kunna innihalda eitt *grafiskt workflow*, sum stuðlar undir verkagongdir hjá starvsfólkum, og sum gevur atgongd til internu- og eksternu elektronisku skjølini. Grafiska workflowið gevur starvsfólkunum møguleika fyri at fylgja einari málsgongd

(í teimum førum, at tað er stovnað eitt mál) og svara fyrispurningum hjá viðskiftafólkum, hvussu langt málið er komið í gongdini.

Portalurin skal fyri starvsfólkunum kunna veita yvirlit yvir stamdáta pr. persón, øll mál pr. persón, málsfamiljuna og standardfamiljuna hjá viðskiftafólkinum, allar veitingar pr. persón og allar gjaldingar pr. persón. Harumframt yvirlit yvir allar eksternar áhugabólkar (relevantar í mun til starvsøkið), og atgongd til dáta hjá teimum um hyperlink.

Skipanin skal automatiskt generera skriv til viðskiftafólkini í sambandi við játtan/sýtan/avgerð.

Í sambandi við málsviðgerð skal skipanin sjálvvirkandi innlesa viðkomandi dáta úr dátabasuni hjá Toll- og Skattstovuni – hetta er eitt nú inntøkuupplýsingar fyri ávíst tíðarskeið, ognarviðurskifti, avlopsskattaviðurskifti og frítíðarlønarviðurskifti. Hetta merkir, at tá málsviðgeri t.d. skal viðgera eitt forsorgarmál, so skal skipanin kenna, hvørjar inntøkupplýsingar eru neyðugar til ta ítøkiligu viðgerðina og útrokningina, og hesar upplýsingar skulu verða tøkar samstundis, sum málsviðgerin byrjar málsviðgerðina. Hetta er við til at tryggja eina rættari og munandi skjótari málsviðgerð.

Alternativt kann hetta skipast á annan hátt við, at portalurin hevur eina skermmynd, sum ger tað møguligt hjá starvsfólkunum at velja við at klikkja av, hvat slag av inntøku, ið skipanin skal trekkja út úr dátabasuni hjá Toll- og Skattstovuni. Henda manuella arbeiðsgongd økir tó um vandan fyri skeivum útrokningargrundarlagi.

Graduering av atgongd til felagsupplýsingar t.d. inntøku, læknaváttan, og andlát skal møguliga gerast.

Í sambandi við eftirlit skal fulltrúin/deildarleiðarin hava atgongd til úrskrift av bókingarlistum, feillistum og frádráttarlistum í sambandi við peninga-koyringar, og dagslistar í sambandi við dagligum eftirlitið.

Grafiskar skermmyndir skulu tillagast til starvsfunktión og rættindir hjá starvsfólki.

*Tørvur til starvsfólkaportalin, sum er serstakur hjá sosialráðgevum á Serdeildini (brek) og Arbeiðsmarknaðardeildini*

Deildirnar á Almannastovuni eru ikki eins, og serliga serdeildirnar hava størri og tyngri tørv á upplýsingum og málsviðgerð. Hesar deildir hava tørv á skipaðum dáta, sum geva eitt yvirlit yvir allar upplýsingar og avgerðir í einum máli (Viðskiftayvirlitið CRM). Her eru somuleiðis nógv egin upprit og uttanhýsis metingar frá serfrøðingum. Í CRM skulu tí fyriliggja øll elektronisk oyðubløð og elektronisk skjøl so sum heimildarváttan og kvittan. Møguleiki skal vera at eftirkanna stamdáta og elektronisk skjøl, og atgongd skal vera til inntøkuskráir hjá Toll- og Skattstovuni viðvíkjandi inntøkuviðurskiftum hjá viðskiftafólki. Møguleiki skal harumframt vera fyri

at leita eftir, flokka og samanbera líknandi mál, veitingarstøði og avgerðir. Atgongd til vøruskrá hjá Hjálpartólamiðstøðini.

Út frá avgerðini hjá sosialráðgeva skal skipanin generera eitt skriv til viðskiftafólkið og leggjast í málið elektroniskt.

Tørvur er á viðkomandi hagtølum til ad hoc-rapportir v.m.

*Tørvur til starvsfólkaportalin, sum er serstakur fyri Fíggjardeildina*
Í sambandi við fíggjarlógararbeiði og arbeiðið á fíggjardeildini er neyðugt, at portalurin nøktar fylgjandi tørvir:

Rokningar við afturvirkandi kraft skulu kunnu bókast til rætta gjaldstíðarskeiðið og gjaldsárið (periodisering), t.d. rokningar fyri undanfarið ár, men sum verða bókaðar í januar og februar. Tað skal vera møguligt at avstemma kreditorar niður á eindarkostnað.

Læknaváttanir í ikki avgjørdum pensjónsmálum skulu kunna gjaldast úr skipanini. Allar lógarbundnar útreiðslur skulu gjaldast í skipanini, eisini apotekini og sjúkrahúsini o.a. Um játtan fyriliggur til rokningar frá apotekunum og sjúkrahúsunum, skal skipanin automatiskt gera eina validering, um veiting vs játtan er røtt.

Í sambandi við andlát skulu gjøld og rokningar hjá deyðum persónum kunnu útgjaldast.

Starvsfólkamál verða stýrd í starvsfólkaskipan, sum er knýtt at málsviðgerðarskipanini. Í sambandi við starvsfólkaumsiting skal sambinding gerast millum lønarmodulið og klokkustempulskipanina (í dag TRM). Rætting í lønarmodulið viðvíkjandi útgoldnum/mótroknaðum tímum skal automatiskt rættast í TRM. Tað skal vera møguligt at útskriva samlað yvirlit yvir útgoldna løn og ávíst tíðarskeið, og útgoldna løn pr. persón og ávíst tíðarskeið. Lønarmodulið skal kunna generera setanarskriv, og lønarkotur skulu geva útslag (løn, starvsaldur, fakfelag, pensjón og alt neyðugt) í setanarskrivinum.

Øll stuðulsfólk hjá Stuðulsfólkaskipanini fyri børn skulu innlimast í lønarskipanina hjá Almannastovuni, og alt samskiftið skal fara fram elektroniskt. Stuðulsfólkamál verða stýrd í málsviðgerðarskipanini við standardskrivum. Fyri at lætta um er hent, um tað ber til at sleppa frá at tøppa p-tal hjá starvsfólki/stuðulsfólki hvørja ferð, tað verður skift mynd og skipan á portalinum. Satsir, t.d. tímaløn og tímasatsir, eru partar av lønarskipanini.

Fíggjardeildin hevur stóran tørv á neyvum hagtølum bæði fyri rakstur hjá Almannastovuni og stovnum hennara og fyri lógarbundnar útreiðslur.

*Tørvur til portalin fyri stovnarnar undir Almannastovuni*
Fleiri stovnar eru lagdir undir Almannastovuna, og í framtíðini kunnu nýggjar umsitingarligar broytingar hugsast at henda á almannaøkinum. Tað er tí neyðugt, at menningin av portalinum kann gerast lætt, so at portalurin støðugt kann tillaga seg tann tørv og treytir, ið nýggir stovnar krevja av einari skipan á Almannastovuni.

Fyri stovnarnar undir Almannastovuni er tað nakrir serligir tørvir, ið portalurin skal lúka.

Fyri Hjálpartólamiðstøðina er goymslustýring høvuðstáttur, og tí skal vera eitt uppfylgingarmodul fyri útlán og endurnýtslu av hjálpartólum.

Stovnar undir Almannastovuni skulu kunna verða stovnssettir og broyttir, uttan at skula útvega nýggjar og kostnaðarmiklar skipanir. Hetta merkir, at Almannastovan skal kunna veita umsitingarliga tænastu til allar stovnar undir Almannastovuni. Talan er um bókhald, løn, starvsfólkaumsiting v.m.

Eisini fyri stovnararnar skulu viðkomandi standard og ad hoc hagtøl kunna heintast.

*Tørvur til portalin, sum er serstakur fyri leiðsluna*
Fyri leiðsluna er tørvurin á einum meiri strategiskum stigi serstakliga hvat hagtølum viðvíkur. Her skal portalurin m.a. nýtast til at máta mál og avrik í málsviðgerini á stovninum. Harumframt at hava yvirlit og taka støðu til mál í eftirstøðu – deildarleiðari skal kunna síggja vavið av øllum málum, sum eru í eftirstøðu fyri hansara deild (deildarniveau og pr. persón). Veita hagtøl yvir miðalavgreiðslutíð fyri ymiskar málsbólkar og økir, og krav um, at skrásett verður eftir hvørji heimild, ið veiting er útgoldin eftir – ofta er tað kanska fleiri, men so høvuðsheimild og so eitt felt til aðrar heimildir.

Leiðslan hevur somuleiðis tørv á skjótum og altíð dagførdum virksemisyvirlitið fyri teirra avvarðandi økið. Slíkt virksemisyvirlit, sum skal vera greitt og lættatkomuligt fyri leiðaran, skal fevna um framleiðsluna, avgerðir, veitingar v.m. á deildini og hjá tí einstaka starvsfólkinum. Virksemisyvirlitið skal somuleiðis fevna um veitingarslag, upphæddir, øki í landinum (evt. býtt á kommunur) v.m. Virksemisyvirlitið skal bæði kunna vísa støðuna dags dato og søguliga gongd, eitt nú dagliga, vikuliga, mánaðarliga, ársfjórðing osfr.

*Tørvur til portalin fyri fulltrúar*
Fyri t.d. fulltrúar ella onnur við serstøkum heimildum, er tørvur á víðkaðum brúkaraheimildum sum t.d. atgongd til dagslistar, sum skulu nýtast í sambandi við eftirlit av málsviðgerð.

Harumframt atgongd til at gera peningakoyringar, og atgongd til at gera stakroyndir av koyringum fyri at vita, um alt er farið rætt fram – talan kann her vera um dupulteftirlit av p-tali vs kontunummari, persóni vs p-tali,

volumen av peningi, tal av persónum, veitingum og slag av veitingum v.m. Eftirlitið fevnir eisini um kanning av, um heimildirnar av málsviðgerum er í lagi, tvs. ávísingarheimild, heimild til játtan av veiting v.m.).

Funktiónsskilnaðurin av heimildum til at játta, vátta og ávísa pening skal gerast tekniskt í skipanini, men møguleiki skal vera fyri manuellari yvirstýring til frávik og í undantaksføri.

## 4.2. Viðskiftayvirlit - CRM

Ein týðandi partur av virkseminum hjá Almannastovuni viðvíkur samskiftinum við viðskiftafólk. Tørvur er tí á einum eintýðugum yvirliti yvir viðskiftafólkið (flokking av viðskiftafólki), har starvsfólk á einari skermmynd hava møguleika á ein skjótan og einfaldan hátt at fara djúpari niður í smálutir, sum eru knýttir til ávísa viðskiftafólkið.

Tað skal vera møguligt at leita við fríteksti eftir viðskiftafólki. Navnaupplýsingar skulu í høvuðsheitum vera sambært góðkendum navnalista (Landsfólkayvirlitið), men við drilldown til fyrrverandi nøvn, um viðskiftari hevur framt navnabroyting. Harumframt skulu vera yvirlit yvir núverandi telefon- og fartelefonnr., teldupost- og postadressu, og eyðmerkjan av bólkum, sum viðskiftafólkið er knýtt til – dømi um bólk er ”málsfamilja” (t.d. hjún og børn í somu málsfamilju).

Eisini skal vera yvirlit yvir tilknýti til málsviðgera-/r, yvir aktuell mál, yvir aktuell veitingarsløg, sum viðskiftari fær frá Almannastovuni, yvirlit yvir allar inn- og útgjaldingar millum viðskiftafólkið og Almannastovuna, og yvirlit yvir aktuell lyklatøl fyri viðskiftafólkið.

## 4.3. Vegleiðingarskipan (intranet)

Almannastovan skal veita eina skjóta tænastu og eina rætta og einsháttaða viðgerð. Fyri at hesi krøv skulu effektiviserast er neyðugt við einari vegleiðingarskipan. Talan er um eina skipan, sum skal vera ein integreraður partur av portalinum. Skipanin sjálv skal innihalda hjálpitekstir til starvsfólk. Skipanin kann samanberast við Windows On-line Help (F1).

Til hvørt stig í einari verkgongd skal bera til at sláa upp í vegleiðingarskipanini og fáa kontekstbundna hjálpivegleiðing. Allir fastsettir veitingarsatsir skulu kunnu finnast skjótt. Tá eitt mál verður stovnað við gildisdegi aftur í tíðina, skal skipanin finna fram vegleiðingar, sum vóru galdandi tá. Møguleiki skal vera fyri at stovna nýggjar útgávur av vegleiðingum, og gamlar útgávur av vegleiðingum skulu kunna finnast aftur umvegis eitt drilldown.

Eitt avmarkað tal av ritstjórnarum kunnu sleppa at stovna og broyta vegleiðingar. Onnur starvsfólk kunnu sjálvi skjóta upp broytingar í hjálpivegleiðingum til ritstjórn umvegis skipanina. Harumframt aðrar hentleikar sum innanhýsis kjakforum og onnur elektronisk starvsfólkafora.

## 4.4. Journal- og málsviðgerðarskipan

Í sambandi við nýggju KT-skipanina verður arbeitt við hugtøkunum:

- Vanligt journalmál – mál viðgjørt manuelt av málsviðgera.
- Elektroniskt fíggjarmál – mál umsitið og avgreitt elektroniskt í veitingarskipanini.

Journal- og málsviðgerðarskipanin skal vera ein styðjandi skipan til veitingarskipanina. Tá upplýsingar ikki kunnu fyrisitast í veitingarskipanini, verður journal- og málsviðgerðarskipanin nýtt.

Serskild krøv eiga at verða til, nær eitt mál verður stovnað. Mett verður, at tað einans er neyðugt at stovna og stjórna málum, tá talan er um veruliga málsviðgerð.

Í førum, har talan er um avgreiðsluspurningar, sum kunnu validerast maskinelt, eigur journal- og málsviðgerðarskipanin ikki at verða nýtt – her verður í høvuðsheitum hugsað um vanlig mál innan dagpening, barnapening og fólkapensjónir, sum ikki hava serlig frábrigdi, ið krevja ítøkiliga málsviðgerð.

*Almennur tørvur til journal- og málsviðgerarskipan*
Tað skal vera møguligt at innlesa verandi journalplan hjá Almannastovuni. Harumframt skal vera møguligt at innlesa fleiri ymiskar kotur á mál. Hetta ger, at tað ber til at framleiða betri hagtøl, og at verður lættari at finna týðandi mál.

Møguleiki skal vera fyri, at mál bert verða upprættaði í einari elektroniskari record – t.d. at dagpengar verða avgreiddir elektroniskt í veitingar- og gjaldingarskipanini, og tí ongantíð verður til eitt vanligt málsviðgerðar journalmál uttan so, at ítøkiligir fyrispurningar koma til einstaka málið.

*Tørvur til standardkorrespondansu*
Tørvur er á at hava eitt savn við allari útgangandi standardkorrespondansu. Standardkorrespondansar skal kunna dagførast, og tað skal í ávísum førum vera møguligt at stovna somu standardkorrespondansu í fleiri tungumálum. Tá ein nýggj versión av einum skjali verður gjørd, er neyðugt, at tað er ein verkgongd, sum tryggjar, at nýggjar útgávur av skjalinum í øðrum tungumálum eisini verða gjørdar.

Møguleiki skal vera fyri at senda standardkorrespondansu út á fleiri miðlum – tvs. sum vanligt bræv, um teldupost, E-boksskipan osfr.

Tað skal vera møguligt at leggja standardkorrespondansu afturat upplýsingum, sum verða sendar til aðrar stovnar at avgreiða – t.d. at senda standardtekstupplýsingar til FSL debitorskipan, sum verður skrivað út saman við kontuavritinum til viðskiftafólk.

*Tørvur til standardverkgongdir*

Møguleiki skal vera fyri at seta upp standardverkgongdir fyri einsháttaða málsviðgerð. Neyðugt er við verkgongd við góðkenning/leysgeving í sambandi við stovnan av standardverkgongdum.

Sambært standardverkgongd skal t.d. ávíst regluligt samskifti verða við viðskiftafólk, og høvi skal vera at seta upp ætlað samskifti – eitt nú fundir – við viðskiftafólk. Tíðarfreistir fyri hesar fundir ella samskiftið annars verður stýrt av standardverkgongdini.

Standardverkgongdir verða settar upp við standardtíðarfreistum. Tá hesar ikki verða fylgdar, verður starvsfólk sum høvuðsregla sjálvt ámint av skipanini. Dømi kann vera ein fólkpensjón, sum ikki er avgreidd eftir teimum ásettu freistunum fyri avgreiðslu av tílíkum málum.

*Tørvur í sambandi við málsviðgerðina*

Starvsfólk skulu hava dagført yvirlit yvir útistandandi uppgávur og yvirlit yvir avgreiddar uppgávur. Í hesum sambandi skulu starvsfólk eisini hava yvirlit yvir ávaringar og áminningar, sum skipanin skapar.

Starvsfólk skal hava egna gerðabók, sum vísir allar hendingar, sum starvsfólkið hevur gjørt uppá mál. Yvirlitið skal kunna sorterast eftir øllum teigum, og møguleiki skal vera fyri at leita við fríteksti.

Harumframt skal skipanin kunna skilja sundur millum bráfeingis mál (forsorgarklientur hevur ein akuttan tørv), vanlig mál (t.d. dagpengar, pensjón v.m.) og langtíðarmál (t.d. viðgerð av fyritíðarpensjón v.m.).

Í sambandi við málsviðgerð skulu viðskiftafólk umvegis teirra atgongd til portalin kunna síggja upplýsingar í egnum máli og síggja, hvussu langt málið er komið í tilgongdini til eina avgerð ella veiting.

*Tørvur í sambandi við avgerð í málsviðgerðini*

Allar avgerðir skulu innlesast í høvuðsskipanina á ein skipaðan hátt, so til ber at greina avgerðir á fyritreytir, heimildir, týðandi atlit, smálutir í avgerðini og møguligar kærur. Brúkarin skal útfylla eitt oyðiblað, har avgerðin verður lýst neyvt eftir einum felags leisti sambært ítøkiliga avgerðarslagnum. Allar avgerðir skulu skjalfestast og fastlæsast, so søgugongdin er tilgeingilig í málinum.

Við áseting av avgerð íroknað áseting av veitingarslagi og veitingarvarianti, skal skipanin sjálvvirkandi kunna mæla til, hvør standardkorrespondansa skal nýtast. Brúkarin skal tó kunna broyta hetta í somu avgerðarmyndini.

*Tørvur í sambandi við arkivering*
Tað er lagt upp til, at øll skjøl verða elektronisk. Møguleiki skal tí vera at skapa PDF-skjøl at senda til elektroniska fjargoymslu. Tað skal eisini kunna bera til at velja annað skjalaformat enn PDF í sambandi við elektroniska fjargoymslu.

Tørvur er á, at øll óvirkin mál verða elektroniskt periodiserað so hvørt. Tað skal ikki vera neyðugt hjá journalini ella málsviðgera at gera manuella handling til at arkivera mál. Skipanin skal – eftir at arkiveringin er farin fram – útskriva lista til journalábyrgdarhavaran yvir arkiverað mál.

# 4.5. Veitingar- og gjaldingarskipan

*Inngangur*
Veitingarskipanin fyrisitir útrokning og fremjan av veitingum, og gjaldingarskipanin skapar gjaldingar og gjaldsáheitanir.

Niðanfyri verða ymsu veitingarútrokningarnar lýstar. Hetta gevur eitt yvirlit yvir innihald og hvørji atlit skulu takast fyri at fremja hesar útrokningar.

Fyri at ein dagførd skipan skal virka sum ein heild, verða fleiri felags hugtøk nýtt hóast munur er smálutunum innan hesi hugtøk. Skipanin skal loysa ymsar uppgávur eftir ymsum lógum, og út frá hesari sannroynd eru inndáta og útrokningarhættir heilt ymiskir. Dagpeningagrundarlagið og útrokningar-hátturin er ein heilt annar enn t.d. grundarlagið fyri fólkapensjón. Hetta sæst so aftur í grundarløgunum í deilskipanunum, men so hvørt upplýsingar nærkast útgjaldsskipanini, verða tær meira einsháttaðar.

Ætlanin er, at allar upplýsingar frá veitingarútrokningum verða eftir einum felags leisti uttan mun til, hvat slag av veitingum talan er um. Hetta merkir, at stórt sæð somu felags forrit kunnu nýtast til allar uppgávur eftir, at útrokningin er gjørd. Hetta vil eisini betra munandi um søguligar upplýsingar og ikki minst um hagtalsgrundarlagið.

Inndátaupplýsingar til tær ymsu deilskipaninar eru ymiskar, men við at nýta somu hugtøk, t.d. útgjaldsgrundarlag, veitingarlýsingar o.l., fáa vit felags hugtøk fyri alt økið.

Í skipanini er ikki ætlanin, at brúkarin skal hava ymisk forrit til t.d. umsiting av útrokningarreglum, men einans eitt forrit til hesa umsiting. Skipanin skal út frá slag av veitingarlýsing (dagpengar, pensjón o.s.fr.), geva brúkaranum atgongd til tær myndir, ið eru neyðugar fyri at viðlíkahalda ávísu veitingarlýsingina og ávísu veitingarsløgini.

## *Veitingarlýsingar*




*Mynd 8: Felags bygnaður av veitingarlýsingum*

Stavirnir niðanfyri vísa til samsvarandi stavirnar í mynd 8.

Øll útgjaldsviðskiftafólk skulu hava eitt útgjaldsgrundarlag, ið inniheldur nakrar upplýsingar um viðskiftafólkið, og sum er knýtt til eina veitingarlýsing **d**).

Ein veitingarlýsing hevur tilknýti til lógarverk, kunngerðir o.s.fr. **a**), og eina veitingarlýsing, ið knýtur seg til eina ávísa høvuðsveitingarlýsing **b**).

Knýtt til høvuðsveitingarlýsingina eru roknifrymlar og ávísar uppsetanir, ið eru ætlaðar til útrokning av høvuðsveitingum. Satsskráir eru knýttar bæði til útrokningarfrymlar og til ”leys” veitingarsløg. Roknifrymlar og satsir verða skrásettir við valørdagfestingum (galdandi frá og til), so skipanin kann rokna og áseta veitingar út ásettari dagfesting.

Skipanin skal innihalda dagførda FSL kontuætlan **c**), og í skipanini er ætlanin at byggja bókingarprofilar, ið innihalda bókingarkontur, knýtt til veitingarlýsingar og veitingarsløg.

*Útgjaldsgrundarløg og leysar veitingar*

Útgjaldsgrundarløg og leysar veitingar skulu í høvuðsheitum góðkennast av persónum, ið hava neyðugar heimildir. Uppseting í veitingarsløgunum skal gerast, ið skilur millum, hvørji veitingarsløg krevja góðkenning og hvørji ikki krevja góðkenning, áðrenn skrásettar veitingar verða fluttar til útgjaldsavgreiðslu.

Starvsfólk skulu hava neyðugar heimildir bæði viðvíkjandi skráseting av veitingum, góðkenning av veitingum og innan hvørjar veitingarlýsingar tey hava hesar heimildir. Somuleiðis skulu starvsfólkini hava upphæddsmørk (interval) innan hvørja veitingarlýsing sær.

*Upplýsingar, ið hava týdning fyri ásetan av veitingum*




*Mynd 9: Yvirskipaðar upplýsingar í skipanini*

Hvussu og hvar hesar upplýsingar hava ávirkan, verður viðgjørt neyvari seinni.

*Dagpengar*
Útrokning og ásetan av dagpengum. *Mynd 10: Grundarlag fyri dagpengaútgjald*



Stavirnir niðanfyri vísa til samsvarandi stavirnar í mynd 10.

*Upplýsingar í sambandi við dagpengaveitingar*
**a**) Navna- og bústaðarupplýsingar út frá p-talið hjá viðskiftafólki og somleiðis upplýsingar um kontunr. í peningastovni.

Út frá a-tali hjá arbeiðsgevara (-um) verða navna- og bústaðarupplýsingar funnar um arbeiðsgevara. Upplýsingar um viðskiftafólk, arbeiðsgevarar og onnur (t..d læknar), verða funnar í eini internari individskrá (eins og tann á Gjaldsstovuni) ella við beinleiðis atgongd til FSL individskránna.

**b**) Umsókn um sjúkradagpening við upplýsingum um fyrsta og seinasta sjúkradag, sjúkraorsøk (her kundi ein felagsskrá verið við sjúkraorsøkum, ið kunnu knýtast til dagpeningaumsóknina og møguliga aðar umsóknir (forsorg og fyritíðapensjón)).

**c**) Lønarinntøka seinastu fimm vikurnar, ið skal nýtast til inntøkugrundarlag.

**d**) Slag av dagpengaveiting kemur umvegis málskipanina, og vil knýta umsóknina til ávíst slag av dagpengaveiting (sjúka, barnsburð, sjálvboðin trygging v.m.).

**e**) Um viðskiftafólkið hevur teknað sjálvbodna trygging, skulu upplýsingar um goldna trygging, karenstíð í tryggingartíð, og um hann er aktivur í hesi trygging, nýtast í sambandi við útgjaldsgrundarlagið.

**f**) Veitingartreytir verða funnar út frá høvuðsveitingarlýsing fyri útgjaldsgrundarlagið. Her er talan um treytir, útrokningarfrymlar, satsir og aðrar uppsetanir, ið eru neyðugar til at áseta veitingina.

**g**) Kalendari er neyðugur fyri at áseta veitingar fyri persónar, ið bert fáa útgoldið veitingar fyri fimm daga viku. Skipanin má kenna vikuskifti frá vanligum yrkadøgum, og taka hædd fyri hesum í sambandi við karensdagar og fyrsta/seinasta útgjaldsdag.

**h**) Føroyskir halgidagar eru neyðugir, tí veitingar verða ikki goldnir fyri halgidagar í einum sjúkraskeiði.

**i**) Um viðskiftafólkið fær aðrar sosialar veitingar, t.d. pensjón og forsorg, so kann útgjaldsgrundarlagið viðv. pensjón og forsorg verða ávirkað av dagpengaútgjaldi. Viðvíkjandi pensjón, so eigur hetta at uppsetast í veitingarlýsingini.

**j**) Tá ið ein lækni hevur skrivað eina læknaváttan og ella váttan fyri at leingja sjúkraskeiðið, skal hann hava pening rindaðan fyri læknaváttanina. Upplýsingar um p-tal/a-tal, navna- og bústaðarupplýsingar, um hann er A/B

skattskyldugur og peningakontu skulu nýtast. Samsýning fyri lækna-váttanina skal rindast óansæð, um útgjaldsgrundarlagið hjá viðskifta-fólkinum er skrásett ella ei.

**k**) Um skrásetast skulu leysar rapporteringar umframt ta maskinellu veitingina, skal veitingin knýtast til ávíst veitingarslag til endamálið. Veitingarslagið skal antin verða knýtt til dagpengalýsing ella aðra felags lýsing.

**l**) Brúkarin ásetur eina valørdagfesting (galdandi pr.), so skipanin kann finna rættan sats, um satsur er knýttur til veitingina.

**m**) Brúkarin ásetur dagfesting, nær veitinging í fyrsta lagi skal útgjaldast, og hvussu ofta ella til nær. Eisini skrásetur brúkarin í hvørjum slagi av koyringum, veitingin skal rindast, t.d. dagpeningakoyring, ad hoc koyring v.m.

**n**) Um veitingarslagið hevur fastan sats knýtt at sær, verður hesin nýttur. Um veitingarslagið hevur sats knýtt at sær, skal brúkarin velja ein sats. Er eingin satstur knýttur til veitingina, skal brúkarin áseta upphædd.

*Dagpengaumsókn*
Tá útgjaldsgrundarlagið skal skrásetast fyri ein dagpengamóttakara, eru upplýsingar bæði frá umsóknini um dagpening og upplýsingar frá internum skráum neyðugar fyri, at skipanin skal hava haldgott grundarlag fyri maskinellari ásetan av dagpengaveiting.

Út frá málsskipanini (upplýsingar um málslag v.m.) skrásetir skipanin maskinelt:

- Tilknýti til navnaskrá
- Tilknýti til mál (og møguliga akt) í málsskipan
- Finnur veitingarlýsing og ásetur dagpengaslag (og harvið) eginleikar út frá
    - Málsskipan
    - Um persónur er sjálvboðin
    - Um persónur er pensjónistur
    - Etc.

Frá umsóknini skal skrásetast
- Fyrsti sjúkradagur
- Seinasti sjúkradagur
- Meðal løn seinastu 5 vikurnar
- Karensdagar. Skipanin ásetur talið út frá veitingarslagnum, men brúkarin kann broyta talið, um veitingarslagið loyvir hesum

- Orsøk til umsókn (sjúkraorsøk ella ein bólking, ið kann nýtast til hagtøl)
- Útgjaldingarstað
- Lækni, ið hevur skrivað læknaváttanina, og sum skal hava samsýning
- Arbeiðsgevari (-ar), ið skulu rinda fyrstu sjúkradagarnar.

Møguleiki skal eisini verða at skráseta leysar rapporteringar, t.d. frádráttir ella aðrar reguleringar.

Um útgjaldsgrundarlag finst við ávísa málslyklinum, verða omanfyri nevndu upplýsingar vístir á skíggja, og brúkarin kann broyta í longu skrásettum upplýsingum.

Útgjaldsgrundarlagið skal hava eina galdandi frá og til (ella versión-stýring) soleiðis, at broytingar kunna skrásetast í útgjaldsgrundarlagnum sum nýggj útgjaldsgrundarløg fyri ávíst tíðarskeið, tvs., at søgulig útgjaldsgrundarløg eru til staðar og broytingar kunnu skrásetast, ið viðføra eftirreguleringar fyri longu avgreiddar veitingar.

*Útrokning av dagpeningi*

Tá dagpeningur verður útroknaður í sambandi við útgjald, skal skipanin altíð rokna frá fyrsta útgjaldsdegi og fram til útrokningardagin (valørdagfesting), so møguligar rættingar verða regleraðar. Stutt sagt skal skipanin rokna út, hvat viðskiftafólkið hevur rætt til fyri tíðarskeiðið, og trekkja longu útgoldnan dagpening frá. Er úrslitið negativt, verður einki úrslit goymt og viðskiftafólkið verður tikin úr koyring. Um samlaða tíðarskeiðið ikki er fullgoldið, kann hugsast, at næsta útgjaldið og harvið reguleringin verður avgreitt í seinni útgjaldskoyring.

Um ikki er møguligt at mótrokna ov nógv goldnan dagpening, skal hetta skrásetast sum krav í debitorskipanini. Inngjøld frá debitorskipanini skulu skrásetast sum leysar rapporteringar til dagpengaútgjaldsgrundarløg, so viðskiftafólkið og dagpengaútgjøldini verða niðurskrivaði við afturgjaldinum. Um og hvussu skrásetingin av afturgjaldinum í dagpengaskipanini verður bókað, verður uppsett í skipanini.

*Grundarlag og upplýsingar, ið útrokningin tørvar fyri at áseta dagpeningin.*

<u>Kanning</u>:

Í sambandi við útrokning av dagpengum, skal skipanin kanna, um viðskiftafólkið er aktivur í øðrum pørtum í skipanini, t.d. pensjón ella forsorg, og út frá dagpengalýsingini avgera, um møgulig parallell veiting er loyvd og hvussu.

Tíðarskeið:

Fyrsti- og seinasti útgjaldsdagur og samlað útgjaldsdagatal.

Út frá fyrsta og seinasta sjúkradegi verða fyrsti og seinasti útgjaldsdagur ásettir. Í hesum sambandi er neyðugt út frá veitingarlýsingini at heinta høvuðsreglur fyri veitingarlýsingina og taka fyrilit fyri m.ø. møguligt tal av karensdøgum, um talan er um 5 ella 7 daga viku, um halgidagar skulu ávirka útgjaldsdagarnar, mesta tal av døgum, sum kunnu veitast í sama sjúkraskeiði, mesta dagatal fyri fleiri sjúkraskeið fyri givið tíðarskeið (rullandi), mesta dagatal fyri pensjónistar.

Reglur viðvíkjandi sjálvbodnum, t.d. er inngoldið rættstundis og til nær, karensdagar vegna ov seint inngjald.

Út frá omanfyristandandi upplýsingum kann skipanin áseta fyrsta og seinasta útgjaldsdag, og somuleiðis samlað útgjaldsdagatal fyri sjúkraskeiðið.

Upphædd:

Skipanin roknar seg fram til eina meðal vikuløn út frá lønarinntøkuni seinastu fimm vikurnar fyri fyrsta fráverudag. Eisini skal skipanin kunna útrokna við teimum síðstu fimm arbeiðsvikunum teir síðstu tríggjar mánaðirnar og síðsta árið (hetta er neyðugt, um annað umboðandi grundarlag skal nýtast enn lønarinntøkan síðstu fimm vikurnar fyri fyrsta fráverudag). Er meðal vikulønin lægri enn ásett max gjald fyri veitingina (úr satsskránni), verður skrásetta meðal lønin nýtt sum grundarlag, annars verður max vikuupphædd frá satsskránni nýtt.

Av tí at dagpengamóttakarar skulu hava frítíðarpening av dagpengaveitingini, verður vikuupphæddin hækkað við virðinum av frítíðarprosentinum (úr satsskránni).

Vikuupphæddin verður nú deild við vikudagatalinum (úr dagpengalýsingini), og ein dagsatsur er funnin, ið skal nýtast sum grundarlag fyri útgjaldinum.

Útgjald:

Útgjaldið verður avgreitt í *felags avgreiðsluskipanini* við at velja ”dagpening” inn í útgjaldsbektina, og síðani seta avgreiðsluna í gongd.

Út frá vali (allir, úrvaldir ella bólkar), finnur skipanin dagpenga-útgjaldsgrundarløgini fram, og viðgerð av viðskiftafólkinum byrjar.

Skipanin roknar alt tíðarskeiðið av nýggjum fram til avgreiðsludagin (valørdagfesting), og somuleiðis verða galdandi satsir og galdandi útgjaldsgrundarløg brúkt. Hetta merkir, at longu avgreidd útgjøld møguliga verða reguleraði og munurin verður útgoldin. Um upp-/niðurreguleringar verða gjørdar fyri gomul tíðarskeið, skulu hesar knýtast til uppruna veitingarnar.

Um sæð verður burtur frá reguleringum, broytan av satsum o.l., er talan um útgjaldsdagar faldað við dagsatsi.

Úrslitini verða skrásett sum veitingarlinjur knýttar til ávísa veitingarslagið.

Rindan av læknaváttan:

Skipanin skal maskinelt rinda lækna pening fyri læknaváttan (satsur úr satsskránni), og rinda peningin skattskylduga veiting. Útgjald skal fara fram um kreditorskipanina antin sum A- ella B-skattskyldug veiting.

Skipanin skal skráseta, at læknaváttan er goldin.

Krøv til arbeiðsgevarar:

Skipanin skal áseta krav/krøv til arbeiðsgevarar fyri fyrstu útgjaldsdagarnar í sjúkraskeiðinum. Tal av døgum, ið arbeiðs-gevarar skulu rinda, verður skrásett í roknifrymlinum fyri dagpengar.

Tá dagsatsurin hjá viðskiftafólkinum er funnin, skal brúkarin inntøppa arbeiðsgevarar, og býtið av lønarinntøku millum arbeiðsgevarnar. Skipanin skal so áseta og goyma kravið/krøvini í serliga felags krav skrá.

Krøvini verða skrásett í debitorskipanina hjá Almannastovuni við tilvísing til málið/útgjaldsgrundarlagið.

***Forsorgarveitingar***

Her er talan um veitingar, ið verða veittar sum:

- Fyribils uppihaldshjálp
- Varandi uppihaldshjálp
- Hjálp til rímuligar stakútreiðslur
- Sjúkra- og tannviðgerð
- Barn ber likamligt ella sálarligt brek
- Stuðulsfólk

- Endurbúgving
- Hjálpartól
- Hjálparráð/heilivág

Skipanin skal stuðla málsviðgerðini, so útrokningar og tørvsmetingar verða mest møguligt automatiseraðar, og grundarløgini verða knýtt til umsóknir og knýttar til viðskiftafólkið/útgjaldsgrundarlagið, so altíð sæst, hvat grundarlagið var fyri ávísum útgjaldsveitingum og nær. Grundarløgini skulu eisini goymast í søguliga partinum, knýtt hvørjum útgjaldi sær.

Forsorgarveitingar víkja frá t.d. pensjónsveitingum við eitt nú at verða útgoldnar sum nettoveitingar, tvs., at skipanin skal taka hædd fyri ávísum viðskiftafólka útreiðslum, t.d. skatti, ALS, sjúkrakassagjaldi og øðrum útreiðslum. Nakrar av hesum útreiðslum eru staðbundnar, t.d. kommunuskattaprosent, barnafrádráttur og sjúkrakassagjald. Sum tað sæst eru nógv viðurskifti, ið gera seg galdandi, og hesi kunna verða ymisk alt eftir hvat slag av forsorgarveiting, talan er um. Tí er tørvur á einum liðiligum amboði, ið kann nýtast til at byggja myndir/skjøl til skrásetingarendamálið.

Í staðin fyri at lýsa allar veitingar og hvussu hesar verða ásettar, verður miðað ímóti at gera eina so liðiliga skipan, at allir útrokningarfrymlar til forsorgarveitingar kunna rúmast í eini uppsetingarskipan av skjølum og frymlum.

*Skjalabygnaður*
Upplegg til skjalabygnaða, sí eisini mynd 11.




*Mynd 11: Umsiting av skjølum og frymlum*

Skipanin skal hava møguleika at umsita skjøl á ein liðiligan hátt, ið kunna nýtast til at samanseta skrásetingarmyndir til ymsu sløgini av forsorgarveitingum. Umsitarin skal hava møguleika at uppbyggja eitt skjal við teimum teigum, ið eru neyðugir, og hvussu hesir teigar skulu hátta seg, tá brúkarin skal nýta skjalið.

Eitt tílíkt skjal (mynd), vil vanliga innihalda nakrar teigar, ið skipanin sjálv kann útfylla út frá upplýsingum frá útgjaldsgrundarlagnum (navn á viðskiftafólki, navn á hjúnafelaga, heimakommuna, skattaprosent, landsskattastiga o.s.fr.), inntøppingarteigar og útroknaðar teigar. Útroknaðir teigar skulu kunnu vísa til eitt ávíst veitingarslag, ið verður nýtt til útgjaldingina (veitingarlinjur).

Í frymlum fyri teigauppsetan skal verða møguligt at seta útrokningarfrymlar, vísa til neyðugar grundskráir í skipanini, og nýta upplýsingar hiðani, t.d. satsskrá, inntøkuskrá, kommunuskattaprosent, barnafrádrátt og aðrar skráir, ið á ein ella annan hátt innihalda upplýsingar, ið kunnu nýtast sum útrokningargrundarlag.

Skjalið skal einans innihalda (goyma) onnur virði enn tey inntøppaðu. Aðrir teigar og útrokningar verða útfyltir, antin tá skjalið verður víst á skíggja, ella tá tað skal nýtast sum grundarlag fyri útgjaldsavgreiðslu.

Innihaldið á einum skjali verður samansett út frá endamálinum, tað skal nýtast til, tvs., hvat slag av forsorgarveiting, talan er um.

Á næstu síðu verða upplýsingar vístar, ið kunnu innganga í eina tørvsmeting/ásetan av veiting(-um). Allar hesar upplýsingar eru ikki altíð partur av grundarlagnum, tí slagið av forsorgarhjálp er ymiskt. Hugsanin er, at skjølini/inntøppingarmyndirnar eru bygdar á ein so liðiligan hátt, at tær upplýsingar, ið skulu nýtast til ávísa tørvsmeting, eru tøkar, og verða nýttar á tí einstaka skjalinum.

*Mynd 12: Grundarlag fyri forsorgarveitingum*

**Grundarlag fyri forsorgarveitingum**



Stavirnir niðanfyri vísa til samsvarandi stavirnar í mynd 12 (fylgir ikki stavraðnum).

*Upplýsingar í sambandi við forsorgarveitingar*

**a)** Navna- og bústaðarupplýsingar út frá p-talið hjá viðskiftafólki og somleiðis upplýsingar um kontunr. í peningastovni.

**b**) Børn, fyri at áseta tal av børnum, og hjúnafelaga (sambúgvandi). Hesar upplýsingar skulu nýtast til at áseta familjutørvin.

**c**) Lønar- og ognarviðurskifti skulu nýtast sum grundarlag fyri mettum tørvi. Ognarviðurskifti eru bæði peningalig og føst ogn.

**d**) Landsskattastigin skal nýtast til at áseta nettoveiting, tvs. útroknaða veitingin er eftir, at skattur er trektur frá.

**e**) Kommunuskattaprosent og barnafrádráttur pr. barn frá heimakommunu skal nýtast til at áseta nettoveiting.

**f**) Satsur fyri dagpengamax (úr dagpengaskipanini) kann innganga í útrokningina, so at ein útroknað veiting ikki er størri enn hægsta veiting frá dagpengaskipanini, um orsøkin til umsóknina er sjúka.

**g**) Grundupphædd fyri fólkapensjón kann innganga í útrokningina, so at samlaða forsorgarveitingin ikki verður størri enn grundupphæddin fyri fólkapensjón.

**h**) Sjúkrakassagjald skal nýtast í sambandi við skrásettar útreiðslur.

**i**) Um veitingin krevur læknaváttan skulu læknaupplýsingar verða tøkir í sambandi við avrokning av læknaváttani (læknin A/B skattskyldugur og peningastovnsupplýsingar hjá lækna). Samsýningin til læknan skal avgreiðast óansæð støðu á málinum.

**j**) Um veitingin krevur læknaváttan skal henda verða til staðar, og møguliga skulu upplýsingar frá váttanini skrásetast í skipanini.

**k**) Satsskráin skal nýtast til fleiri endamál, m.a. til ”tørvslýsingarskjøl”, har fastir satsir kunnu setast av telduni, max upphæddir, prosentsatsir og aðrar ásetanir, ið eru neyðugar. Umframt til tørvsmetingina kann satsskráin verða nýtt í sambandi við leysar veitingar. Satsskráin er ”dato stýrd”, og tí vilja broytingar í satsum fáa ávirkan á tørvsmetingar og leysar rapporteringar pr. ávísan dag.

**l**) Skrásettar útreiðslur verða nýttar, tá tørvsmetingin verður gjørd. Útreiðslur skulu knýtast til eina ”útreiðsluskrá”, ið inniheldur tey sløg av útreiðslum, ið Almannastovan ynskir útgreinaði til m.a. hagtøl.

**m**) Allar útgoldnar veitingar skulu knýtast til ávíst veitingarslag, ið inniheldur ávísar eginleikar. Tá tørvsmetingin verður gjørd, skal skipanin áseta veitingarslag (-sløg) út frá tørvsmetingarskjalinum.

**n**) Ein veiting til eitt viðskiftafólk kann verða afturgjaldsskyldug. Her er hugsanin, at hesin eginleiki er knýttur til veitingarslagið, ið nýtt verður, antin tað er skrásett maskinelt ella manuelt. Eginleikarnir viðvíkjandi afturgjaldsskylduni eru skrásettir á veitingarslagnum, og um nøkur serlig viðurskifti eru galdandi fyri skylduna hjá viðskiftafólkinum, skulu hesi skrásetast saman við veitingini. Samstundis sum veitingin verður skrásett, skal skipanin skráseta eitt krav í debitorskipanini við tilvísing til málið/útgjaldsgrundarlagið.

**o**) Allar veitingar og útgjaldsgrundarløg skulu knýtast til eina lóg, reglugerð ella vegleiðing.

**p**) Skipanin skal innihalda hægstu upphædd fyri veiting av arbeiðsloysisstuðli frá ALS, og kann henda upphædd innganga í tørvsmetingina, tá talan er um stuðul vegna vantandi arbeiðsmøguleikar.

**q**) Skipanin skal innihalda upphæddir fyri ávísar fastar útreiðslur, ið eru eins fyri øll ella eins fyri bólkar av viðskiftafólkum, t.d. útvarps- og sjónvarpsgjald, sjúkrakassagjald o.l. Hesi kunnu innganga í tørvsmetingar-skjalið.

**s**) Um skrásetast skulu leysar rapporteringar umframt ta maskinellu veitingina, skal veitingin knýtast til ávíst veitingarslag til endamálið. Veitingarslagið skal antin verða knýtt til forsorgarlýsing ella aðra felags lýsing.

**t**) Brúkarin ásetur eina valørdagfesting (galdandi pr.), so skipanin kann finna rættan sats, um satsur er knýttur til veitingina.

**u**) Brúkarin ásetur dagfesting, nær veitinging í fyrsta lagi skal útgjaldast, og hvussu ofta ella til nær. Eisini skrásetur brúkarin í hvørjum slagi av koyringum, veitingin skal rindast, t.d. dagpeningakoyring, ad hoc koyring v.m.

**x**) Um veitingarslagið hevur fastan sats knýtt at sær, verður hesin nýttur. Um veitingarslagið hevur sats knýtt at sær, skal brúkarin velja ein sast. Er eingin satstur knýttur til veitingina, skal brúkarin áseta upphædd.

**y**) Um tann leysa veitingin skal rindast øðrum enn viðskiftafólkinum, skal veitingin knýtast til ein kreditor, ið inniheldur neyðugar upplýsingar fyri, at veitingin kann flytast útgjaldsskipanini. Her kann bæði verða talan um veiting í krónum ella fremmandum gjaldoyra.

**z**) Allar veitingar og útgjaldsgrundarløg skulu knýtast til eina lóg, reglugerð ella vegleiðing.

*Ásetan av forsorgarveiting*
Málsgongdin í málsskipanini verður ikki lýst her, men í stuttum er mannagongdin fylgjandi. Út frá umsóknini um forsorgarveiting, verður eitt mál stovnað og knýtt einum viðskiftafólkið, og møguligar aktir verða knýttar málinum.

Eitt útgjaldsgrundarlag verður stovnað út frá málinum. Útgjalds-grundarlagið inniheldur m.a. upplýsingar um málsslag, veitingarlýsing og aðrar yvirskipaðar generellar upplýsingar.

Frá útgjaldsgrundarlagnum kann brúkarin fáa atgongd til tørvsmetingar-skjalið, ið er knýtt júst til hetta slagið av forsorgarveiting. Skipanin útfyllur teigar út frá defineraðum frymlum, meðan brúkarin útfyllur hinar teigarnar, t.d. tíðarskeiðið skjalið er galdandi, útreiðslur o.l. Tá allar upplýsingar eru skrásettar á tørvsmetingarskjalinum, kann skipanin roknað út samlaðu veitingarnar til viðskiftafólkið, og knýta tær til ávís veitingarsløg. Upphæddirnar verða roknaðar sum mánaðarligar veitingar.

Tá tørvsmetingin er góðkend, verður tørvsmetingarskjalið nýtt sum grundarlag fyri útgjaldingum av veitingum, og skipanin skal taka hædd fyri at umrokna veitingina til dagar (30. partar), um veitingin er fyri styttri tíðarskeið enn ein mánaða.

Tað kann hugsast, at eitt viðskiftafólk t.d. ikki fær dagpengar ella fyritíðarpensjón í eitt tíðarskeið, tí viðgerðin dregur út. Í viðgerðartíðini kann viðskiftafólkið so møgululiga fáa forsorgarhjálp. Um ein avgerð um fyritíðarpensjón fær afturvirkandi gildi, kann hugsast, at mótrokning og millumrokning skal gerast millum veitingar.

Reglur og viðgerð í sambandi við millumrokningar, afturføringar o.l. skulu vera partur av skipanini.

<u>Útgjalding av forsorgarveiting</u>:

> Útgjaldið verður avgreitt í *felags avgreiðsluskipanini* við at velja ”forsorg” inn í útgjaldsbektina, og síðani seta avgreiðsluna í gongd.

Út frá vali (allir, úrvaldir ella bólkar) finnur skipanin forsorgarútgjaldsgrundarløgini fram, og viðgerð av tí einstaka viðskiftafólkinum byrjar.

Skipanin roknar alt tíðarskeiðið av nýggjum fram til avgreiðsludagin (valørdagfesting), og somuleiðis verða galdandi satsir og galdandi útgjaldsgrundarløg brúkt. Sum partur av útgjaldsgrundarlagnum verða tørvsmetingarskjølini nýtt, og hesi eru grundarløgini til tær veitingarlinjur, sum viðskiftafólkið fær tillutað. Bæði útgjaldsgrundarlagið og tørvsmetingin eru stýrd pr. galdandi til og frá dagfesting. Ein umrokning verður altíð gjørd fyri samlaða tíðarskeiðið. Hetta merkir, at longu avgreidd útgjøld møguliga verða reguleraði, og munurin verður útgoldin. Um upp-/niðurreguleringar verða gjørdar fyri gomul tíðarskeið, skulu hesar knýtast til uppruna veitingarnar.

Um sæð verður burtur frá reguleringum, broytan av satsum o.l., er talan um útgjaldsdagar faldað við dagsatsi, sum er roknaður í tørvsmetingarskjalinum. Úrslitini verða skrásett sum veitingar-linjur knýttar til ávísa lýsingarslagið.

<u>Rindan av læknaváttan</u>:

Samsýning fyri møguliga læknaváttanir í sambandi við forsorg verður avgreidd í serligari koyring.

### *Pensjónir*

Pensjónir kunnu bólkast fylgjandi:

- Fólkapensjón
  - Vanlig við møguleika fyri viðbót
  - Vanlig uttan viðbót
- Fyritíðarpensjón
  - Hægsta
  - Miðal
  - Lægsta
- Barnapengar til einsamallar uppihaldarar (er ikki pensjón, men hevur altíð verið viðgjørt í hesum høpi).

Fyri at fáa fólkapensjón skal viðskiftafólkið verða fylt 67 ár, og fyri at fáa fyritíðarpensjón skal viðskiftafólkið verða millum 18 og 67 ár. Barnapengar til einsamallar uppihaldarar verður veittur børnum, ið hava mist annað ella bæði foreldrini, og verður rindaður til børnini fylla 18 ár.

Pensjónir verða veittar forút, tvs., at pensjónin fyri januar verður útgoldin í desember í árinum fyri, pensjónin í februar verður útgoldin í januar osv.

Rætturin til pensjón er treytaður av, at tann, ið fær pensjón, hevur danskan heimarætt ella er giftur við ella seinast hevur verið giftur við einum persóni við donskum heimarætti, hevur fastan bústað í Føroyum ella hevur hýru við skipi skrásett í Føroyum, og hevur havt fastan bústað í danska ríkinum í minsta lagi 3 ár frá fylta 15. árinum til pensjónstillutan.

Ein eyðsýndur munur millum fólkapensjón og forsorgarveiting er, at møguligur hjúnafelagi hevur ávirkan á pensjónsveitingina, óansæð um hjúnaðarfelagin er pensjónistur ella ei.

Á næstu síðu er ein tekning, ið vísir atlit, sum skulu takast í sambandi við ásetan av pensjón.

*Mynd 13: Útgjaldsgrundarlag, pensjónir*

## Útgjaldsgrundarlag, pensiónir



Stavirnir niðanfyri vísa til samsvarandi stavirnar í mynd 13 (fylgir ikki stavraðnum).

*Upplýsingar í sambandi við pensjónsútrokning*

**a**) Persónsupplýsingar, t.e. p-tal, navn, bústaður, postnummar, kommuna og land.

**b**) Borgarstøða – eru upplýsingar um møguligan hjúnafelaga og børn, yngri enn 18 ár, ið viðskiftafólkið er verji hjá (egin børn ella børn hjá øðrum). Av tí at pensjónsveitingarupphæddir eru tengdar at, um viðskiftafólkið er giftur og inntøkum hjá hjúnafelaga, eru hetta týdningarmiklar upplýsingar. Um børn eru í familjuni, kunnu hesi fáa barnapening.

**d**) Inntøkuupplýsingar eru upplýsingar um inntøkugrundarlag bæði hjá viðskiftafólki og møguligum hjúnafelaga. Inntøkurnar skulu bólkast í sløg av inntøkum, so skipanin kann taka fyrilit fyri møguligum munum í viðgerðini av inntøkusløgunum. Inntøkuupplýsingarnar koma frá Toll- og Skattstovuni eftir nærri avtalu millum Almannastovuna og Toll- og Skattstovuna. Møguligt skal vera at fáa inntøkuupplýsingar fyri øll viðskiftafólk (tó bert fyri viðskiftafólk, har Almannastovan hevur brúk fyri hesum upplýsingum), bólkar av viðskiftafólkum ella ávíst viðskiftafólk. Vanliga er talan um inntøkuupplýsingar, ið Toll- og Skattstovan hevur endaliga álíknað. Hetta merkir, at inntøkuupplýsingar fyri eitt ávíst skattaár ikki eru endalig tøkar fyrr enn frá februar, og broytingar til endaliga álíkning fyri eitt viðskiftafólk kunnu í summum førum draga út. Í teimum førum kann Almannastovan velja at nýta gamla inntøkugrundarlagið ella í onkrum førum skráseta eina fyribils inntøku. Í onkrum førum velur Almannastovan at síggja burtur frá inntøkuupplýsingum frá Toll- og Skattstovan, og heldur skráseta eina (framtíðar) meting.

**e**) Tá ein lækni hevur skrivað eina læknaváttan í sambandi við fyritíðarpensjón, skal hann hava rindaðan pening fyri læknaváttanina. Upplýsingar um p-tal/a-tal, navna- og bústaðarupplýsingar, um hann er A/B skattskyldugur og peningakontu skulu nýtast.

**f**) Læknaváttan í sambandi við fyritíðarpensjón viðførir, at ein samsýning skal rindast til læknan fyri váttanina, umframt at váttanin skal knýtast til viðskiftafólkið (málskipan).

**g**) Allar veitingar og útgjaldsgrundarløg skulu knýtast til eina lóg, reglugerð ella vegleiðing.

**h**) Satsur fyri veiting frá Samhaldsfasta eftirlønargrunninum. Hetta fyri, at skipanin skal vita, hvat viðskiftafólkið fær í eftirløn úr grunninum, um viðskiftafólkið er fylt 67 ár. Inntøkan úr grunninum er ikki partur av inntøkugrundarlagnum til pensjón, men er partur av inntøkugrundarlagnum,

tá heilivágsegingjald skal ásetast. Um og hvussu inntøka úr eftirlønar-grunninum skal ávirka, skal kunna setast upp í skipanini.

**i**) Allir pensjónistar hava rætt til stuðul til ”lækna fyriskipaðan heilivág”. Í hesum sambandi skal pensjónisturin rinda eitt egingjald pr. ársfjórðing, áðrenn stuðul verður latin. Egingjaldið er í løtuni 200, 400 ella 600 kr. Egingjaldið verður ásett út frá inntøkuupplýsingum hjá viðskiftafólkinum, og tað skal verða møguligt at seta frymil upp fyri hesi ásetan. Egingjaldið og ásetanin av stuðli eru ikki partur av útgjaldsveitingum, men verður viðgjørt í serligum samskifti millum Almannastovuna og Apoteksverkið. Stuðul til heilivág verður viðgjørdur nærri seinni.

**j**) Um ein pensjónistur flytur á (bú-) stovn/ellisheim ella verður innlagdur í longri tíð, kann útroknaða veitingin broytast. Er talan um almennan stovn/ellisheim, verður veitingin broytt til lummapening og møguligur hjúnafelagi (pensjónistur), ið býr heima, verður at rokna sum stakur pensjónistur.

Um ein heimabúgvandi pensjónistur verður innlagdur í longri tíð, kann pensjónsveitingin minka tilsvarandi dagatalinum á innleggingini. Hetta eru eginleikar, ið verða knýttir til stovnin/stovnsslagið

**k**) Um ein pensjónistur doyr og hjúnafelagin eisini er pensjónistur, fær tann eftirsitandi pensjónisturin bæði egna og pensjónina hjá tí deyða í 3 mánaðir. Eftir hetta broytist upphæddin hjá tí eftirlivandi til sats fyri støk.

**l**) Um ein pensjónistur hevur búð meira enn 3 ár í einum øðrum Norðurlandi (tó ikki í Danmark og Grønlandi) í tíðarskeiðinum 15 – 67 ár, hevur hesin rætt til pensjón frá hesum landi eftir einum lutfalli í mun til bútíðina í hesum landi. Stutt merkir hetta, at pensjónsveitingar kunna verða reduseraðar í mun til uppruna satsin. Somuleiðis skal skipanin taka hædd fyri møguligum avmarkingum av veitingum, tá talan er um brotpensjón.

**k**) Lond hava í høvuðsheitum týdning í sambandi við rindan av lummapeningi. Tá talan er um lummapening í øðrum landi, er lummapengasatsurin knýttur til satsin í Føroyum. Eisini eiga frámerki um pensjónsavtalur at skrásetast á landinum (brotpensjón), og kreditorar skulu knýtast til landaskránna, og í hesum sambandi skulu gjaldoyraupplýsingar knýtast til landaskránna.

**l**) Frámerki skal vera umvegis málskipanina at seta eina støðulýsing á útgjaldsgrundarlagið, t.d. góðkent, vrakað, í bíðustøðu v.m.

**m**) Til útgjaldsgrundarlagið skal ein málsfamilja knýtast. Ein málsfamilja eru teir persónar, ið ávirka málið (útgjaldsgrundarlagið). Málsfamiljan kann

vera pensjónisturin, pensjónisturin og hjúnafelagi, ið fær pensjón. Um familjan hevur børn yngri enn 18 ár, eru hesi partur av málsfamiljuni.

**n**) Eru børn í málsfamiljuni fáa hesi barnaviðbót. Barnaviðbótin kann rindast til annað av foreldrunum (og í serligum førum til bæði foreldrini). Barnaviðbótin kann eisini flytast beinleiðis til barnið. Barnaviðbøtur skulu altíð flytast í p-talinum hjá barninum.

**p**) Allar veitingar og útgjaldsgrundarløg skulu knýtast til eina lóg, reglugerð ella vegleiðing.

**q**) Um skrásetast skulu leyasr rapporteringar umframt ta maskinellu veitingina, skal veitingin knýtast til ávíst veitingarslag til endamálið. Veitingarslagið skal antin verða knýtt til forsorgarlýsing ella aðra felags lýsing.

**r**) Um tann leysa veitingin skal rindast øðrum enn viðskiftafólkinum, skal veitingin knýtast til ein kreditor, ið inniheldur neyðugar upplýsingar fyri at veitingin kann flytast útgjaldsskipanini. Her kann bæði verða talan um veiting í krónum ella fremmandum gjaldoyra.

**s**) Um veitingarslagið hevur fastan sats knýtt at sær, verður hesin nýttur. Um veitingarslagið hevur sats knýtt at sær, skal brúkarin velja ein sast. Er eingin satstur knýttur til veitingina, skal brúkarin áseta upphædd.

**t**) Brúkarin ásetur eina valørdagfesting (galdandi pr.), so skipanin kann finna rættan sats, um satsur er knýttur til veitingina.

**u**) Brúkarin ásetur dagfesting, nær veitinging í fyrsta lagi skal útgjaldast, og hvussu ofta ella til nær. Eisini skrásetur brúkarin í hvørjum slagi av koyringum, veitingin skal rindast, t.d. dagpeningakoyring, ad hoc koyring v.m.

***Barnapeningur (alimentatión)***

Barnapeningur kann verða rindaður til uppihaldarar hjá børnum, hvørs foreldur ikki búgva saman. Talan er um pening, ið Almannastovan leggur út vegna tann gjaldsskylduga forledrapartin. Peningurin verður kravdur aftur frá tí foreldraparti, ið hevur gjaldsskyldu mótvegis barninum.

Barnapeningurin verður rindaður til uppihaldaran, men í p-talinum hjá barninum. Skipanin skal taka hædd fyri, at meira enn ein persónur kann hava uppihaldsskyldu mótvegis sama barni.

Í sambandi við barnapening verður málsfamilja samansett av uppihalds-skylduga og teimum børnum, sum uppihaldsskyldan umfatar.

Skipanin kann helst ikki áseta peningin maskinelt út frá útgjaldsgrundarlagnum, tí talan er ikki um eina afturvendandi veiting. Í staðin verður veitingin (veitingarnar) skrásett sum leys rapportering, knýtt til útgjaldsgrundarlagið hjá barninum, og við tilvísing til málið í málsskipanini. Umframt barnapening kann eisini verða talan um aðrar eingangsveitingar, t.d. fermingargjald.

Veitingarsløgini skulu innihalda eginleikar, ið m.a. skulu nýtast til at staðfesta, um veitingin skal skrásetast sum krav í debitorskipanini, og hvat kravslag skal nýtast.

Er talan um veitingar, ið skulu krevjast innaftur, skal gjaldsskyldugi knýtast til veitingina úr debitorskránni, og skipanin skal samstundis skráseta eitt krav í debitorskipanini mótvegis tí gjaldsskylduga.




*Mynd 14: Útgjaldsgrundarlag barnapeningur*

Stavirnir niðanfyri vísa til samsvarandi stavirnar í mynd 14 (fylgir ikki stavraðnum).

*Upplýsingar í sambandi við barnapening*

**a**) Upplýsingar um uppihaldara, navn, bústað og peningakontu.

**b**) Upplýsingar um barn (børn), navn, bústað og møguligar peningakontur.

**c)** Upplýsingar um uppihaldsskylduga, navn, bústað (upplýsingar úr debitor-skrá).

**d**) Upplýsingar frá Ríkisumboðnum, ið eru grundarlag fyri útgjaldi og kravi mótvegis uppihaldsskylduga.

**g/p**) Øll útgjaldsgrundarløg skulu knýtast til eina lóg, reglugerð ella vegleiðing.

**q**) Um skrásetast skulu leysar rapporteringar umframt ta maskinellu veitingina, skal veitingin knýtast til ávíst veitingarslag til endamálið. Veitingarslagið skal verða knýtt til barnapengalýsing.

**s**) Um veitingarslagið hevur fastan sats knýtt at sær, verður hesin nýttur. Um veitingarslagið hevur sats knýtt at sær, skal brúkarin velja ein sast. Er eingin satstur knýttur til veitingina, skal brúkarin áseta upphædd.

**t**) Brúkarin ásetur eina valørdagfesting (galdandi pr.), so skipanin kann finna rættan sats, um satsur er knýttur til veitingina.

**u**) Brúkarin ásetur dagfesting, nær veitinging í fyrsta lagi skal útgjaldast, og hvussu ofta ella til nær. Eisini skrásetur brúkarin í hvørjum slagi av koyringum, veitingin skal rindast, t.d. dagpeningakoyring, ad hoc koyring v.m.

Viðm.: Pkt. 3 á myndini ”Krav til pápa” eigur at vera ”Krav til gjaldskylduga”.

***Rindan fyri læknaváttanir***

Í sambandi við dagpengar, forsorg og fyritíðarpensjón kunnu læknaváttanir verða kravdar sum partur av grundarlagnum.

Fyri hvørja læknaváttan skal læknin hava eina samsýning. Skipanin skal skráseta ”Gjald fyri læknaváttan” í tilknýti til útgjaldsgrundarløg og málið í málsskipanini. Treytað av, um læknin er A- ella B-skattskyldugur, verður ”Læknaveitingin” skrásett á kreditorveitingarslag, ið antin er skattskyldugt ella ikki skattskyldugt. Tá veitingarútgjøld verða avgreidd, velur brúkarin ”Læknaváttanir”, og skipanin avgreiðir allar læknaváttanir á sama hátt sum onnur útgjøld.

## *Avgreiðslu- og útgjaldsmannagongd*

*Mynd 15: Útgjaldsmannagongd*



*Lýsing av mannagongd í sambandi við veitingarútgjøld*
Niðanfyri verður útgjaldsmannagongdin lýst frá tí, at brúkarin skal avgreiða útgjøld og til útgjøldini eru flutt og avgreidd til FSL útgjaldsskipanina og FSL høvuðsbókhaldið.

Í hesari loysn er talan um flytan av upplýsingum umvegis fílar, ið síðani verða lisnar inn í skipaninar á Gjaldsstovuni. Fyri Almannastovuna hevði ein loysn við beinleiðis samskifti millum skipaninar hóska betri, tí hetta hevði økt um møguleikarnar at validera upplýsingar, áðrenn hesar vóru fluttar til FSL skipanirnar, og somuleiðis kundi Almannastovan dagført skipanina á ein smidligari hátt, t.d. kontustreingir, navnaupplýsingar úr individskránni, og ikki minst fingið knýtt útgjaldstrans_id at útgjøldunum inni á Almannastovuni.

Í skrivandi løtu er Gjaldsstovan ikki sinnað at opna fyri beinleiðis sambandi millum skipanirnar hjá Almannastovuni og Gjaldsstovuni. Í staðin skulu upplýsingar til FSL útgjaldsskipanina og høvuðsbókhaldið flytast sum fílar, og sum síðini verða lisnar inn í markamót til endamálið. Mannagongdir um, hvussu og hvar fílarnar verða fluttar, skal avtalast við Gjaldsstovuna.

Í løtuni verða ongar upplýsingar fluttar aftur frá útgjaldsskipanini hjá Gjaldsstovuni, tá avgreiðsla er farin fram umvegis fílu. Almannastovan ynskir, at upplýsingar um goldnan skatt, ALS, barsilsgjald og avvísingar og orsøkir vóru fluttar Almannastovuni aftur elektroniskt, so møguligt var at dagføra viðskiftafólk við goldnum skatti o.ø. gjøldum, og at møguligir feilir vóru rættaðir í skipanini hjá Almannastovuni, t.d. skeivt kontunummar.

Tølini og stavirnir niðanfyri vísa til samsvarandi tølini og stavirnar í mynd 15.

*1) Stovnan av útgjaldsbekt*
Endamálið við at stovna eina útgjaldsbekt er at knýta ávísar útgjaldingar og tilknýttar upplýsingar saman, so at ein útgjaldskoyring altíð er knýtt til eina bekt. Samskiftið til aðrar skipanir, t.d. FSL útgjaldsskipan og FSL høvuðsbókhaldið, verður altíð við støði í bektini.

Bektin inniheldur allar beinleiðis og óbeinleiðs upplýsingar, ið hava samband við eina útgjaldsavgreiðslu.

Skrásetingar (**”a”**) í sambandi við stovnan av bekt, og sum verða goymdar í skránni:

- Skipanin tillutar eintýðugt bektnummar, ið er hækkandi við 1 fyri hvørja bekt.
- Brúkarin tilskilar slag av koyring (pensjón, forsorg, dagpengar, læknaváttanir, barnapening o.s.fr.).

- Brúkarin útvelur øll viðskiftafólk, viðskiftabólkar, ávísa avgreiðslu-journal (eitt nú viðbót til ávísar pensjónistar ella kreditorflytingar) ella ávísar persónar.
- Brúkarin tilskilar koyrsilstypu (ad hoc, viku- og/ella mánaðar-koyring).
- Brúkarin tilskilar valørdagfesting.
- Brúkarin tilskilar útgjaldsdagfesting.
- Brúkarin setur útrokning í gongd.
- Skipanin skrásetir eina hending, ið inniheldur upplýsingar, um nær, hvør og hendingarslag (úttrekk sett í gongd).

*2) Útrokning av veitingum*
Endamálið er at útrokna veitingar til viðskiftafólk við støði í úrvalinum í punkt 1. Grundarlagið pr. viðskiftafólk er útgjaldsgrundarlagið saman við møguligum leysum rapporteringum. Alt eftir, hvat slag av koyring talan er um, er innihaldið í útgjaldsgrundarlagnum ymiskt, t.d. inniheldur útgjaldsgrundarlagið fyri dagpengar aðrar upplýsingar enn útgjalds-grundarlagið fyri pensjón. Í stuttum kann sigast, at útgjaldsgrundarlagið inniheldur tær neyðugu upplýsingar, ið eru grundarløgini fyri, at skipanin kann áseta veitingar maskinelt, út frá tilknýttum upplýsingum, meðan leysar rapporteringar innihalda veitingar, ið longu er ásettar, antin manuelt ella maskinelt.

Ein bekt og tilknýttar hendingar kunnu ongantíð strikast.

Skrásetingar og hendingar, ið eru knýttar til útrokning av veitingum, og sum verða goymdar:

- Við støði í útgjaldsgrundarløgum (**”b”**) og leysum veitingum (**”c”**) (inntøppaðar veitingar), roknar skipanin viðskiftafólkveitingar. Alt eftir, hvat slag av koyring talan er um, verða ymsir útrokningarhættir nýttir. Grundarløgini til teir ymsu útrokningarhættirnar verða lýst aðrastaðni.
- Øll útgjaldsgrundarløg innihalda eitt tíðarskeið. Hetta merkir, at broytast upplýsingar í einum tíðarskeiði, verða antin nýtt útgjalds-grundarlag stovnað ella broytingar gjørdar í útgjaldsgrundarlagnum. Skipanin roknar (umroknar) veitingar soleiðis, at reguleringar er ein partur av útrokningini.
- Høvuðsúrslitini verða goymd í útgjaldsgrundarlagi (**”d”**) og í veitingarlinjum (**”e”**), tvs. eitt útgjaldsgrundarlag pr. persón pr. koyrsilsslag (og um fleiri a-tøl skulu nýtast, kann hetta skapa fleiri útgjaldsgrundarløg pr. persón). Fyri hvørt útgjaldsgrundarlag eru ein ella fleiri veitingarlinjur alt eftir, hvørjar veitingar, viðskiftafólkið hevur fingið játtað
- Umframt høvuðsúrslitini skulu helst fleiri (hjálpi-) skráir nýtast.
- Allar hendingar í sambandi við koyringina verða skrásettar sum sjálvstøðugar hendingar við lyklatølum, knýttar til bektina. Hvørjar hendingar, ið ein útrokning skapar, kann ikki útgreinast her, tí tað

veldst um, hvussu koyringin er uppbygd. Um útrokningin er uppdeild í fasur, kundi ein hending verið skrásett pr. fasu.

- Útrokningin endar við at dagføra bektina við lyklatølum, t.d. tal av persónum, tal av feilum, forvunnin upphædd, skattskyldug upphædd, frítíðarpeningur, fyribils bókingarupphædd (rúm skal møguliga gerast fyri útroknaðum skatti, ALS, barsilsgjaldi og upphædd til kreditorar. Hesi lyklatøl kunnu so nýtast til fyrsta part av avstemmingini, umframt sum skjalfesting av koyringum. Allar hendingar í sambandi við koyringina verða skrásettar sum sjálvstøðugar hendingar, knýttar til bektina.
- Útrokningin skal út frá slagi av veitingum (skattskyldugt/ikki skattskyldugt) skapa eina útgjaldssamling pr. slag/viðskiftafólk. Hetta merkir, at sami persónur kann fáa tvær útgjaldingar pr. koyring, nevnliga eina fyri skattskyldugar veitingar og eina fyri skattafríar veitingar.
- Við grundarlagi í útrokningarkoyringini skal verða møguligt at fáa ymsar avstemmingslistar (antin á skíggja ella á prenti). Tá rapportir verða koyrdar, skal hetta skrásetast í hendingarskránna við upplýsingum um hvør, nær, slag av rapport og lyklatal frá rapportini.
    - Útgreinslista pr. viðskiftafólk við upplýsingum um persón, slag av høvuðsveiting, lyklaupplýsingar frá útgjalds-grundarlagi, peningastovnsupplýsingar, detail veitingarlinjur við upplýsingum um slag, upphædd o.l. umframt saman-teljingar býttar á skattskyldu, forvunna upphædd og frítíðarpening.
    - Útgjaldslista pr. peningastovn.
    - Kreditorlista
    - Feillista.
    - Avstemmingarlista, ið vísir samlaða útgjaldið samanborið við bóking (samlibókingar).
    - Fyribils detailbókingarlista, ið vísir allar veitingar (viðskiftafólk) pr. kontustrong.
    - Fríar útskriftir, ið brúkarin kann samanseta út frá veitingarsløgum
- Tá koyringin er kannað og avstemmað, verður støða tikin til úrslitið. Ábyrgdarpersónur váttar koyringina ella afturførir koyringina. Hetta verður skrásett í hendingarskránna. Um koyringin verður góðkend, verður bektin læst, og ikki er møguligt at afturføra koyringina. Bektin fær tillutað eitt eintýðugt koyrsilsnummar. Í sambandi við góðkenning skal skipanin dagføra veitingar í grundarløgunum, t.d. tíðaravmarkaðar veitingar skulu strikast/teljast upp o.l. Verður avgjørt at afturføra (strika) koyringina, verða øll úrslit strikaði uttan innihaldið í bektini og hendingarskránni, og bektin verður læst.

*3) Flytan til dátuvøruhús*

Endamálið er at flyta upplýsingar í eitt dátuvøruhús, ið kann nýtast til at útvega hagtøl, lyklatøl og søguligar upplýsingar. Brúkarar av hesum

upplýsingum eru stjórn og starvsfólk á Almannastovuni, Almanna- og heilsumálaráðið, politikkarar og borgarar.

Upplýsingarnar verða skipaðar á ein hátt, so at upplýsingar kunnu heintast á eina skjótan og skilagóðan hátt. Dátuvøruhúsið (”**f**”) verður samansett av einum ella fleiri *dátamartlum*, ið skulu samansetast við *dimensjónum* og *cubum*. Alt eftir, hvørjar upplýsingar (internar/eksternar) skulu inn í dátuvøruhúsið, kann avgerast, hvussu flytingarnar skulu fara fram t.d. í sambandi við útgjaldsavgreiðslur ella dagligar/vikuligar/mánaðarligar yvirføringar.

*4) Flytan til útgjaldsskipan*
Endamálið er at avgreiða veitingar til útgaldingar umvegis FSL útgjaldsskipanina. FSL útgjaldsskipanin flytur síðani peningin antin beinleiðis til clearingar ella umvegis Toll- og Skattstovuna (skattskyldugar veitingar).

Áðrenn flyting kann gerast, skal koyringin góðkennast og frígevast av persónum við serligum heimildum, og góðkenningin verður skrásett sum ein hending.

Flytanin av útgjøldum verður flutt FSL útgjaldsskipani umvegis fílu. Ongar upplýsingar koma aftur frá FSL útgjaldsskipanini til skipanina. Um flytingar av eini ella aðrari orsøk ikki kunnu flytast frá FSL útgjaldsskipanini til avgreiðslu (óvirkið p-tal, skeiv peningakontu ella ikki virkin), verða neyðugar broytingar gjørdar á Gjaldsstovuni, so at flytingin kann avgreiðast.

Skrásetingar og hendingar í samband við flytan til FSL útgjaldsskipan:

- Skipanin bólkar útgjaldingarnar pr. viðskiftafólk sundur í skattskyldugar og skattafríar veitingar. (Her skal takast hædd fyri, at hvørki samtalið fyri skattskyldugt ella skattafrítt kann verða negativt).
- Hvør peningakonta, ið skal skuldskrivast fyri útgjaldingarnar, verður ásett í FSL útgjaldsskipanini.
- Við støði í skattafríum veitingum verður útgjaldsfíla (**”h”**) gjørd til FSL_kreditor_útgjaldsskipanina, ið m.a. skal innihalda (fílu layoutið verður lýst neyvari):
    - Byrjunarlinja (upplýsingar, ið FGJ ásetur).
    - Flytingarnummar frá Almannastovuni (eintýðugt).
    - Bekt nr.
    - Detail linjur:
        - P-tal.
        - Navn á viðskiftafólki.
        - Reg.nr. og kontunr. í peningastovni.
        - Upphædd til útgjaldingar.
        - Felagstekst fyri samlaðu útgjaldsveitingina.
        - Útgjaldsdagfesting.
        - Møgulig onnur eyðkenni, ið FGJ ynskir.
    - Enda linja (upplýsingar, sum FGJ ásetur).

- Við støði í skattskyldugum veitingum verður útgjaldsfíla (**“g”**, lønarfíla) gjørd til FSL útgjaldsskipanina. Fílan skal m.a. innihalda (fílu layoutið verður lýst neyvari):
    - Byrjunarlinja (upplýsingar, ið FGJ ásetur).
    - Flytingarnummar frá Almannastovuni (eintýðugt).
    - Bekt nr.
    - Detail linjur:
        - P-tal.
        - Navn á viðskiftafólki.
        - Reg.nr. og kontunr. í peningastovni.
        - Upphædd til útgjaldingar (forvunnin upphædd).
        - Skattskyldug upphædd.
        - Reg.nr. og kontunr. til frítíðarpening í peningastovni.
        - Frítíðarpeningur.
        - Felagstekst fyri samlaðu útgjaldsveitingina.
        - Útgjaldsdagfesting.
        - Møgulig onnur eyðkenni, ið FGJ ynskir.
    - Endalinja (upplýsingar, sum FGJ ásetur).
- Bektin verður dagførd við upplýsingum um skaptar útgjaldsfílur.
- Skapan av útgjaldsfílum til FSL skipanina verða skrásettar sum hendingar í hendingarskránni við m.ø. upplýsingum um lyklatøl (samtøl, nummar á fílu v.m.), og nær og hvør framdi hendingarnar.
- Upplýsingar um goldnan skatt o.l.
- Í sambandi við innlesing av útgjaldsfíluni bókar FSL útgjalds-skipanin á millumrokningina (samlibókingina fyri almanna-útreiðslur) og peningastovnskontu.

*5) Flytan til FSL høvuðsbókhald*
Endamálið er at bóka útreiðslur av almannaveitingum á útreiðslukontur hjá Almannastovuni í høvuðsbókhaldinum. Sum mótpostur verður samlaða upphæddin mótbókað á eina millumrokning.

Skrásetingar og hendingar í sambandi við flytan til FSL høvuðsbókhaldið:

- Skipanin skapar millumskrá, ið inniheldur bókingarlinjur, knýttar til tær einkultu veitingarlinjurnar, tvs. detilbókingar pr. viðskiftafólk og veitingarlinjur.
- Út frá detailbókingunum verða samlibókingar skaptar, tvs. ein bókingarlinja pr. bókingarkontusamanseting (møguliga eisini pr. valørdagfesting).
- Skipanin validerar bókingarlinjurnar mótvegis innanhýsis bókingar-skrá (um ikki atgongd fæst til hesa skrá í FSL skipanini).
- Brúkarin avstemmar bókingarúrslit, og um neyðugt verður bókingar-úrslitið strikað og hending verður skrásett. Neyðugar rættingar gjørdar í bókingaruppsetan. Síðani verður roynt umaftur at skapa bókingar.
- Um bókingin verður góðkend á Almannastovuni, verður bókingarfíla gjørd, og sum síðani verður send Gjaldsstovuni til innlesingar.
- Fílan (**”i”**) skal m.a. innihalda (fílu-layoutið verður lýst neyvari):

- Header við m.ø. upplýsingum um fílunummar, dagfestingar.
- Detailupplýsingar við m.ø.
  - Útreiðslubókingar.
    - Kontusegmentir (kontustreingir).
    - Upphædd.
    - Aðrir teigar, ið FGJ krevur.
  - Mótbóking(-ar).
    - Kontusegmentir (kontustreingir).
    - Upphædd.
    - Aðrir teigar, ið FGJ krevur.
- Bektin verður dagførd við lyklaupplýsingum um bókingarfíluna.
- Hending(-ar) verða skrásettar í hendingarskránna, ið innihalda lyklatøl v.m. í sambandi við skapan av bókingarfílu.
- Gjaldstovan lesur bókingarfíluna inn í markamóti (Gl_interface) og validerar fíluna í sambandi við innlesing.
- Bókingarnar verða bókaðar inn í høvuðsbókhaldið, og møguligar feilbókingar verða bókaðar á feilkontu.
- Ongar elektroniskar bókingarupplýsingar koma aftur til skipanina.

*6) Innlesing og validering, lønartransaktiónir*

Fílan við skattskyldugum útgjaldsflytingum (ein record pr. viðskiftafólk), verður flutt Gjaldsstovuni eftir nærri avtalu. Starvsfólk á Gjaldsstovuni lesa fílina inn í markamót til endamálið, og innihaldið verður validerað. Um feilir ella trupulleikar eru í sambandi við innlesing í markamótið, fær Almannastovan boð um hetta, og neyðugar rættingar verða gjørdar. Síðani verður nýggj fíla send Gjaldsstovuni. Feilir á hesum støði eru t.d. skeiv lønarfíla, manglandi upplýsingar ella stutt sagt feilir, sum ikki eiga at fyrikoma.

*7) Innlesing og validering, skattafríar veitingar (kreditorflytingar)*

Fílan við skattafríum útgjaldsflytingum (ein record pr. klient) verður flutt Gjaldsstovuni eftir nærri avtalu. Starvsfólk á Gjaldsstovuni lesa fílina inn í markamót til endamálið, og innihaldið verður validerað. Um feilir ella trupulleikar eru í sambandi við innlesing í markamótið, fær Almannastovan boð um hetta, og neyðugar rættingar verða gjørdar. Síðani verður nýggj fíla send Gjaldsstovuni. Feilir á hesum støði eru t.d. skeiv útgjaldsfíla, manglandi upplýsingar ella stutt sagt feilir, sum ikki eiga at fyrikoma.

*8) Innlesing og validering, bókingar*

Fíla við útreiðslubókingum verður flutt Gjaldsstovuni til avgreiðslu. Gjaldsstovan lesur fíluna inn í markamót (Gl.interface) til endamálið. Í sambandi við innlesing í markamótið verður fílan validerað fyri m.a., um talan er um røttu fílu (fílunr.) og annars, um layout og teigar eru rættir (Forskipanar id o.l).

*9) Til útgjaldingar*

*Skattskyldugar flytingar*

Tær skattskyldugu útgjaldsflytingarnar verða nú lisnar frá markamótinum inn í sjálva útgjaldsskipanina (lønartransaktiónir), og eru klárar til avgreiðslu. Útgjaldsflytingarnar verða nú valideraðar við m.a. at kanna, um p-talið er aktivt/rætt, skrásetingarnummar og kontunummur eru røtt, og um samsvar er millum forvunna upphædd, skattskylduga upphædd og frítíðarpening.

Útgjaldingarnar verða síðani fluttar Toll- og Skattstovuni til skattingar og víðari avgreiðslu til peningastovnarnar (clearing).

Útgjaldsskipanin bókar á millumrokningskontu og peningastovnskontur, tá útgjaldsavgreiðslan verður framd.

Eru flytingar, ið ikki kunnu avgreiðast frá Gjaldsstovuni til Toll- og Skattstovuna orsakað av feilum, verða hesar flytingar rættaðar í útgjaldsskipanini og síðani fluttar Toll- og Skattstovuni til avgreiðslu. Hetta merkir, at fluttar transaktiónir frá Almannastovuni altíð verða roknaðar sum avgreiddar, og at Almannastovan ger ongar broytingar/rættingar í skipanini eftir, at útgjaldsflytingarnar eru fluttar Gjaldsstovuni.

*Skattafríar flytingar*

Tær skattafríu útgjaldsflytingarnar verða nú lisnar frá markamótinum inn í sjálva útgjaldsskipanina (kreditorar), og eru klárar til avgreiðslu. Útgjaldsflytingarnar verða nú valideraðar við m.a. at kanna, um p-talið er aktivt/rætt, skrásetingarnummar og kontunummur eru røtt, landakota og stytting eru í lagi v.m.

Útgjaldingarnar verða síðani fluttar til peningastovnarnar (clearing) umvegis Elektron.

Eru flytingar, ið ikki kunnu avgreiðast frá Gjaldsstovuni til peningastovnarnar orsakað av feilum, verða hesar flytingar rættaðar í útgjaldsskipanini, og síðani fluttar til Toll- og Skattstovuna til avgreiðslu. Hetta merkir, at fluttar transaktiónir frá Almannastovuni altíð verða roknaðar sum avgreiddar, og at Almannastovan ger ongar broytingar/rættingar í skipanini eftir, at útgjaldsflytingarnar eru fluttar Gjaldsstovuni.

*10) Til bókingar*

Bókingartransaktiónir verða nú bókaðar í FSL høvuðsbókhaldið, og møguligir feilir (skeivir kontustreingir o.l.) verða bókaðir á ”feilkontu”.

Ongar upplýsingar verða fluttar aftur til Almannastovuna.




*Mynd 16: Samandráttur av útgjaldsavgreiðslu*

### *Viðbót til ávísar pensjónistar*

Talan er um serligan stuðul, ið verður latin pensjónistum tríggjar ferðir árliga. Pensjónistar og persónar, ið fáa varandi veiting sambært forsorgar-lógini, hava rætt til viðbót til ávísar pensjónistar o.o. Giftir pensjónistar fáa eina viðbót í felag.




*Mynd 17: Viðbót til ávísar pensjónistar*

Stavirnir niðanfyri vísa til samsvarandi stavirnar í mynd 17.

*Upplýsingar, ið hava ávirkan ella eru partur av útrokningini*
**a**) P-tal, navna- og bústaðarupplýsingar.

**b**) Um talan er um stakan ella giftan pensjónist.

**c**) At tað finst útgjaldsgrundarlag knýtt til pensjónslýsing ella forsorg, varandi veiting.

**d**) Nær umsókn um pensjón er innkomin og góðkend. Hetta hevur týdning fyri at staðfesta, um viðskiftafólkið hevur rætt til viðbótina.

**e**) Inntøkuupplýsingar og inntøkumørk fyri at finna rættan stuðulssats.

**f**) Um viðskiftafólkið býr á stovni, fær tað ikki viðbót. Er viðskiftafólkið giftur við pensjónisti, ið býr á stovni, fær tann heimabúgvandi stuðul sum stakur.

**g**) Upplýsing og eginleikar um veitingarslagið, ið skal nýtast til rindan av viðbótini.

**h**) Um viðskiftafólkið býr uttanlanda, verður viðbótin ikki veitt.

Tá viðbótin skal rindast, skal ein koyring setast í gongd, ið viðgerð øll viðskiftafólk, sum hava rætt til hesa viðbót. Skipanin skal út frá uppsettum upplýsingum útrokna og áseta viðbótina við atliti til tær upplýsingar, ið hava týdning fyri útrokningina (sí omanfyri). Úrslitini av koyringini skulu goymast í eini journal (kladdu), sum so starvsfólk á Almannastovuni kunnu kanna, og síðani antin góðkenna journalina, broyta í journalini ella strika journalina. Alt sum verður gjørt í sambandi við útrokningina, møguligar broytingar ella striking, skal loggast.

Skipanin skal nýta satsskráir, inntøkumørk og uppsetingarskráir í sambandi við útroknan av hesari viðbót, so tað er einkult at broyta útrokningar-fyritreytirnar.

**i/j**) Úrslitini frá útrokningini verða goymd sum leysar veitingarlinjur, knýttar til eina journal.

*Útgjald av viðbótini*
Tann góðkenda journalin verður síðani útvald í eini mánaðar- ella eykakoyring, og er vanligur partur av útgjaldskoyringum, antin sum støk koyring ella sum partur av størri útgjaldskoyring.

***Heilivágsstuðul***

Í skipanini skal verða møguligt at veita heilivágsstuðul eftir pensjónslógini til pensjónistar og til onnur eftir forsorgarlógini § 18 og § 17. Mannagongdin er, at Almannastovan útflýggjar Apoteksverkinum upplýsingar um viðskiftafólk, ið hava rætt til heilivágsstuðul, hvønn heilivág tey hava rætt til (§ 18 og § 17), og hvat egingjaldið er pr. ársfjórðing. Fyri pensjónistar er galdandi, at teir hava rætt til stuðul fyri allan heilivág, ið læknin skrivar teimum.

Ynskiligt er, at Apoteksverkið víðkar teirra skipan, so møguligt er at samskifta um øll sløg av heilivágsjáttanum maskinelt, og hetta samskiftið verður pr. umsókn og ikki sum í dag, har talan bert er um eina yvirskipaða játtan pr. heimild (§ 18) og einki samskifti er viðvíkjandi § 17. Neyðugt er, at alt samskifti bæði frá Almannastovuni og frá Apoteksverkinum verður elektroniskt. Apoteksverkið skal móttaka allar upplýsingar pr. umsókn, tvs. heilivág ella heilivágsbólk. Upplýsingar frá Apoteksverkinum skulu vísa til játtanina/umsóknina, ið upprunaliga er komin fra Almannastovuni, so Almannastovan hevur møguleika at kanna og góðkenna útgoldnan stuðul, samanborið við givnar játtanir.

*§ 18 og § 17*
Fyri stuðul eftir § 18 og § 17 er galdandi, at ein umsókn um stuðul skal sendast Almannastovuni frá viðskiftafólkinum, og umsóknin verður

viðgjørd av Almannastovuni og einum ráðgeva (lækna). Um umsóknin verður játtað, skal skrásetast í skipanini, hvønn heilivág játtanin umfatar, antin tann ávísa heilivágin ella ein heilivágsbólk.




*Mynd 18: Grundarlag fyri heilivágsstuðli § 18 og § 17*

Stavirnir niðanfyri vísa til samsvarandi stavirnar í mynd 18.

*Upplýsingar, ið skulu nýtast í sambandi við § 18 og § 17 stuðul*
**a**) P-tal, navna- og bústaðarupplýsingar hjá umsøkjara ella verja hjá barni.

**b**) P-tal og navnaupplýsingar hjá barni, ið skal hava stuðul eftir § 17.

**c**) Umsókn um stuðul, og hvat slag av heilivági.

**d**) Læknameting um tørv á heilivági.

**e**) Egingjald, um talan er um stuðul eftir § 18 (stuðul eftir § 17 hevur einki egingjald).

**f**) § 18 játtan av heilivági, slag av heilivági (bólking). Hvussu leingi játtanin er galdandi (frá og til dagfesting).

**g**) Um játtanin er til barn (§ 17), skal foreldur ella verji skrásetast.

**h**) Barnið, ið skal hava heilivágsstuðul eftir § 17.

**i**) § 17 játtan av heilivági, slag av heilivági (bólking). Hvussu leingi játtanin er galdandi (frá og til dagfesting).

**j**) Upplýsingar til Apoteksverkið um, hvørjir persónar skulu hava heilivágsstuðul, hvat slag av heilivági, eftir hvørji heimild (§ 18 ella § 17), og hvussu leingi játtanin er galdandi og møguligt egingjald pr. ársfjórðing.

**k)** Nýggjar játtanir verða skrásettar í Apoteksverkinum.

**l**) Broytingar til verandi játtanir verða gjørdar.

**m**) Verandi játtan verður ógildað.

*Heilivágsstuðul, pensjónistar*
Allir pensjónistar hava rætt til heilivágsstuðul fyri allan heilivág, ið er útflýggjaður umvegis lækna. Í mun til § 18 verður egingjaldið ásett út frá inntøkuni hjá tí einstaka pensjónistinum. Í løtuni eru egingjøldini 200, 400 ella 600 kr. pr. ársfjórðing. Møguligt skal tó verða at áseta egingjaldið pr. viðskiftafólk á 0 kr.



*Mynd 19: Heilivágsstuðul, pensjónistar*

Stavirnir niðanfyri vísa til samsvarandi stavirnar í mynd 19.

**a**) Persónsupplýsingar, t.e. p-tal, navna- og bústaðarupplýsingar.

**b**) Útgjaldsgrundarlag, so skipanin kann finna allar pensjónistar.

**c**) Inntøkuupplýsingar fyri at áseta egingjald. Í skipanini skal verða møguligt at seta upp, hvørjar inntøkuupplýsingar og sosialar veitingar skulu ávirka egingjaldið

**d**) Inntøka frá Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum, ið ávirkar egingjaldið.

**e**) Møguligt ásett egingjald.

**f**) Inntøkumørk fyri hjún og støk fyri at áseta egingjald.

**g**) Inntøkuupplýsingar frá Toll- og Skattstovuni og hvørjar av hesum skulu ávirka egingjaldið.

**h**) Um pensjónisturin býr á stovni/ellisheimi. Um pensjónisturin fær lummapening, fæst heilivágur frá stovninum, og tí skal Almannastovan ikki flyta játtan til Apoteksverkið.

**i**) Apoteksverkið fær síðani upplýsingar um p-tal, navn og bústað, umframt upplýsing um, hvat slag av játtan talan er um (§ 6, pensjónistjáttan), og hvat egingjaldið er. Av tí at allir pensjónistar hava rætt til stuðul, er ikki neyðugt at upplýsa um slag av heilivági.

**j**) Nýggjar játtanir verða skrásettar í Apoteksverkinum.

**k**) Broytingar til verandi játtanir verða gjørdar, í hesum føri er talan um broytan av egingjaldi.

**l**) Verandi játtan verður ógildað.

### *Markamót til FSL útgjaldsskipan*

Útgjaldingar umvegis FSL útgjaldsskipanina.

Skrásetingarnar verða fluttar umvegis fílu. Mannagongdin viðvíkjandi flytan av útgjaldsfílum skal avtalast við Gjaldstovuna. Fílan kann bæði innihalda kreditor- og lønarflytingar.

Útgjaldsfílan er bygd upp við einari byrjunarlinju, detailinjum og til seinast eini endalinju.

Niðanfyri er innihaldið lýst:

## *Byrjunarlinja*

| Feltnavn | Format, længde | Position | Valgfri Tvung. | Beskrivelse |
|---|---|---|---|---|
| RECORD_NR | num(8) | 1 | T | Record nummer. Fortløbende numrering af records i filen. |
| RECORDTYPE | char(2) | 9 | T | Recordtype. Værdi = "10" for startrecord. |
| FORSYSTEM | char(20) | 11 | T | Identifikation på forsystem. FGJ tildeler forsystemer globalt entydige id. Hver institution kan have flere forsystemer. Hvert kreditormodul i Financials har hvert sit forsystem id.<br>Vedr. kontering, har hvert forsystem egen kreditor mellemregningskonto i det centrale finanssystem. Denne konto bliver fundet udfra forsystemnummer og Xp-Xp-tabeller. |
| SENDER_DATO | char(8) | 31 | T | Dato for senders generering af fil. Format = DDMMYYYY |
| SENDER_FIL_NR | num(6) | 39 | T | Senders løbende filnummer. Der er en nummerrække pr. forsystem, se FORSYSTEM_NR |
| SENDER_NAVN | char(30) | 45 | T | Institutionsnavn hos sender, som kun er information og bliver ikke indlæst i udbet.funktionen. |

## *Detaillinjur fyri kreditorflytingar*

| Feltnavn | Format, længde | Position | Valgfri Tvung. | Beskrivelse |
|---|---|---|---|---|
| RECORD_NR | num(8) | 1 | T | Record nummer. Fortløbende numrering af records i filen. |
| RECORDTYPE | num(2) | 9 | T | Recordtype. Værdi = "51" for kreditorudbetaling detailrecord. |
| SENDER_ATAL | num(6) | 11 | T | Institutionens A-tal. Hver institution kan have flere A-tal. |
| UDBETAL_TYPE | char(15) | 17 | V | Udbetalingstype. F.eks. 'Investeringsstøtte', 'Kreditor' osv. |
| BETAL_MAADE | char(15) | 32 | T | Betalingsmåde, der kan have værdierne:<br>• 'BANK/GIRO' for bank eller giro<br>• 'BANK' for bank eller giro<br>• 'GIRO' for bank eller giro<br>• 'POSTAN' for postanvisninger<br>• 'CHECK' for check |
| KRED_TYPE | char(15) | 47 | V | Kreditortype. |
| KRED_KRED_NR | char(16) | 62 | V | Modtagers kreditornummer. |
| KRED_LBNR | num(6) | 78 | V | Modtagers id. Henviser til løbenummer LBNR i person- og virksomhedsregistret. |
| KRED_NAVN | char(60) | 84 | T | Modtagers navn. |
| KRED_ADRESSE1 | char(60) | 144 | V | Modtagers 1. adresselinje. |
| KRED_ADRESSE2 | char(60) | 204 | V | Modtagers 2. adresselinje. |
| KRED_ADRESSE3 | char(60) | 264 | V | Modtagers 3. adresselinje. |
| KRED_POSTNR | char(10) | 323 | T | Modtagers postnummer. |
| KRED_BY | char(25) | 334 | T | Modtagers bynavn. |
| KRED_LAND | char(25) | 358 | V | Modtagers land. |
| KRED_LAND_KODE | char(4) | 384 | V | Landekoder, hvor Færøerne er 'FO' og Danmark er 'DK'. Default Færøerne. |
| KRED_REG_NR | num(4) | 288 | V | Modtagers bank registreringsnummer. Skal |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | | | | udfyldes, hvis KRED_KONTO_NR udfyldes. |
| KRED_KONTO_NR | char(20) | 398 | V | Modtagers bank- eller girokontonummer. Skal udfyldes, hvis KRED_REG_NR udfyldes. |
| FORFALDS_DATO | char(8) | 418 | T | Forfaldsdato for udbetalingen. Format DDMMYYYY. |
| DOKUMENT_NR | char(16) | 426 | V | Dokumentnummer, der kommer fra kreditormoduler. |
| VALUTA_KODE | num(2) | 442 | T | Angiver valutakoden. Anvendes for at indikere hvorvidt transaktionen allerede er blevet betalt via. manuel 'fremmed-valuta' proceduren. Mulige værdier:<br>00=Indlandsk valuta, 01=Udlandsk valuta |
| VALUTA_INFO | char(10) | 444 | V | Angiver valuta (f.eks. 'KR.', 'SEK', etc.). Default anvendes 'KR.'. |
| FAKTURA_BELOEB | num(16) | 454 | T | Beløb til udbetaling (i ører). |
| FAKTURA_NR | char(30) | 470 | V | Fakturanummer fra kreditor til benyttelse på advis. |
| FAKTURA_DATO | char(8) | 500 | V | Fakturadato fra kreditor til benyttelse på advis. |
| FAKTURA_KUNDE_NR | char(16) | 508 | V | Institutionens kundenummer hos kreditor til benyttelse på advis. |
| FAKTURA_OCR | char(16) | 524 | V | OCR-kode på girokort fra kreditor. Benyttes til udbetalingsfil til Giro. |
| SPROG_KODE | num(2) | 540 | V | Sprogkode til styring af advis. Default 'Færøsk'. 01=Færøsk, 02=Dansk, 03=Engelsk. |
| ADVIS_TEKST1 | char(200) | 542 | V | Fri tekst til udskrift på advis, som FGJ udskriver. Første linje. |
| ADVIS_TEKST2 | char(200) | 742 | V | Fri tekst til udskrift på advis, som FGJ udskriver. Anden linje. |
| OPR_FAKTURA_BELOEB | num(16) | 942 | V | Fakturaens oprindelige beløb. |
| FI_KORT_TYPE | char(2) | 958 | V | |
| FI_KORT_BETALER | char(15) | 960 | V | |
| FI_KREDITOR_NR | char(8) | 975 | V | |
| DEMM_SKAT | char(4) | 983 | V | Skatteår (anvendes i DEMM) |
| VENDOR_ID | num(15) | 987 | V | Vendor Id fra kreditorsystem i Application. |

## *Detaillinjur fyri lønarlinjur*

| Feltnavn | Format, længde | Position | **V**algfri **T**vung. | Beskrivelse |
|---|---|---|---|---|
| RECORD_NR | num(8) | 1 | T | Record nummer. Fortløbende numrering af records i filen. |
| RECORDTYPE | char(2) | 9 | T | Recordtype. Værdi = "60" for lønudbetaling detailrecord. |
| SENDER_ATAL | num(6) | 11 | T | Institutionens A-tal. Hver institution kan have flere A-tal. |
| UDBETAL_TYPE | char(15) | 17 | V | Udbetalingstype. F.eks. 'Løn', 'Investeringsstøtte', 'Kreditor' osv. |
| FORFALDS_DATO | char(8) | 32 | T | Forfaldsdato for udbetalingen. Format DDMMYYYY. |
| LON_PTAL | num(9) | 40 | T | P-tal hos lønmodtager |
| LON_NAVN | char(30) | 49 | T | Modtagers navn. |
| LON_REG_NR | num(4) | 79 | T/V | Modtagers bank registreringsnummer. Skal udfyldes, hvis LON_SKATPLIGTIG eller LON_UDBETAL er udfyldt.. |
| LON_KONTO_NR | num(10) | 83 | T/V | Modtagers bank- eller girokontonummer. Skal |

| Feltnavn | Format, længde | Posi tion | Valgfri Tvung. | Beskrivelse |
|---|---|---|---|---|
| | | | | udfyldes, hvis LON_REG_NR udfyldes. |
| LON_SKATPLIGTIG | num(16) | 93 | V | Skatpligtig indtægt (i ører). |
| LON_UDBETAL | num(16) | 109 | V | Løn til udbetaling (i ører). |
| LON_FERIEPENGE | num(16) | 125 | V | Feriepenge (i ører). |
| LON_FERIE_REG_NR | num(4) | 141 | V | Udfyldes kun, hvis LON_FERIEPENGE er udfyldt. Indeholder bank-registreringsnummer, hvor feriepengene bliver overført til. |
| LON_FERIE_KONTO_NR | num(10) | 145 | V | Udfyldes kun, hvis LON_FERIEPENGE er udfyldt. Indeholder bank-kontonummer, hvor feriepengene bliver overført til. |
| LON_IDENT | num(16) | 155 | V | Evt. identifikation, som lønsystemet påsætter med det formål, at blive returneret fra T&S tilbage til lønsystemet elektronisk. |

*Endalinja*

| Feltnavn | Format, længde | Posi tion | Valgfri Tvung. | Beskrivelse |
|---|---|---|---|---|
| RECORD_NR | num(8) | 1 | T | Record nummer. Fortløbende nummerering af records i filen. |
| RECORDTYPE | char(2) | 9 | T | Recordtype. Værdi = “90” for slutrecord. |
| REC_ANTAL | num(8) | 11 | T | Total antal records i filen. |
| UDBETAL_TOTAL | num(16) | 19 | T | Total beløb til udbetaling i filen (i ører). Summen af FAKTURA_BELOEB og LON_UDBETAL |
| A_INNT_TOTAL | num(16) | 35 | V | Total A-indtægt til udbetaling i filen (i ører). Summen af LON_SKATPLIGTIG |
| FERIE_TOTAL | num(16) | 51 | V | Total feriepenge til udbetaling i filen (i ører). Summen af LON_FERIEPENGE |

***Markamót til FSL høvuðsbókhald***

*Export fílar til fíggjarstýring frá útgjaldsskipan*

Record-layoutið og innihaldið kann verða broytt, men innihaldið er í høvuðsheitum sum víst niðanfyri.

| **Fíl høvd** | | | Viðmerking |
|---|---|---|---|
| Recordnr | 9(8) | 11 | "00000001" |
| Recordtype | 9(3) | 3 | "000" |
| Forssystem_id | X(10) | 10 | Blankt ??? (Frá inst. header ???) |
| Raðtal | 9(6) | 6 | Vaksandi við "1" pr. "FORSYSTEM" |
| Skrá_dagfesting | 9(8) | 8 | DDMMÁÁÁÁ |
| Skra_klokka | 9(4) | 4 | TTMM |
| Stamdata | X(25) | 25 | "Frítt t.d. LØN LSJ" |
| | | 64 | |

| **Stovns hovd** | | | Viðmerking |
|---|---|---|---|
| Recordnr | 9(8) | 8 | Raðtal vaskandi við "1" |
| Recordtype | 9(3) | 3 | "001" |
| Stovnsnummar | 9(6) | 6 | Gjaldstovan gevur stovnsnummur |
| | | 17 | |
| **Detail record** | | | Viðmerking |
| Recordnr | 9(8) | 8 | Raðtal vaskandi við "1" |
| Recordtype | 9(3) | 3 | "100" |
| Katogori | X(15) | 15 | Gruppering, frítt |
| Filler | X(3) | 3 | |
| Periode | 9(6) | 6 | MMÁÁÁÁ ???? |
| Valutakode | X(4) | 4 | "KR." |
| Upphædd | 9(16) | 16 | " " , "-" fremst og upphædd í oyrum ??? |
| Batchnavn | X(25) | 25 | Gruppering frítt |
| Journalnavn | X(25) | 25 | Gruppering frítt |
| Tekstur | X(40) | 40 | Hvat fyri tekst ?? |
| Referencefelt 1 | X(15) | 15 | Frítt (Transaktiónsspor) |
| Referencefelt 2 | X(15) | 15 | do |
| Referencefelt 3 | X(15) | 15 | do |
| Referencefelt 4 | X(15) | 15 | do |
| Hovedkonto(seg1) | X(10) | 10 | Blankt |
| Underkonto(seg2) | X(10) | 10 | Blankt |
| Institionsnr(seg3) | X(10) | 10 | Stovnsnummar |
| Standregnkt(seg4) | X(10) | 10 | Standardroknskapskonto |
| Underspecif(seg5) | X(10) | 10 | Útgreining |
| Sted(seg6) | X(10) | 10 | Stað |
| Formål(seg7) | X(10) | 10 | Endamål |
| Segment 8 | X(10) | 10 | Segment 8 |
| Segment 9 | X(10) | 10 | Segment 9 |
| Segment 10 | X(10) | 10 | Segment 10 |
| Segment 11 | X(10) | 10 | Segment 11 |
| Segment 12 | X(10) | 10 | Segment 12 |
| Segment 13 | X(10) | 10 | Segment 13 |
| Segment 14 | X(10) | 10 | Segment 14 |
| Fleksfelt 1 | X(15) | 15 | Gruppering, frítt |
| Fleksfelt 2 | X(15) | 15 | do |
| Fleksfelt 3 | X(15) | 15 | do |
| Fleksfelt 4 | X(15) | 15 | do |
| Fleksfelt 5 | X(15) | 15 | do |
| Kontekstværdi | X(20) | 20 | do |
| Kontrolmarkering | X(1) | 1 | "=X", um upphæddin skal samanberast við útgjald ? |

| | | | |
|---|---|---|---|
| | | | Skal verða **blankt**! |
| Alias | X(15) | 15 | Blankt |
| | | 456 | |

| **Stovn enda record** | | | Viðmerking |
|---|---|---|---|
| Recordnr | 9(8) | 8 | Raðtal vaksandi við "1" |
| Record_type | 9(3) | 3 | "199" |
| Stovnsnr | 9(6) | 6 | Stovnsnummar |
| Samtal fyri stovn | 9(17) | 17 | Í oyrum ?? " ","-" |
| | | 34 | |

| **Fil enda record** | | | Viðmerking |
|---|---|---|---|
| Recordnr | 9(8) | 8 | Raðtal vaksandi við "1" |
| Record_type | 9(3) | 3 | "999" |
| Antal_records | 9(8) | 8 | Tal av linjun inc. enda record |
| | | 19 | |

*Mótbóking*
Tanna samlaða upphæddin fyri útgjaldið verður mótbókað. Detailreglan sum verður bókað, sær soleiðis út:

| **Detail record** | | | Viðmerking |
|---|---|---|---|
| Recordnr | 9(8) | 8 | Raðtal vaskandi við "1" |
| Recordtype | 9(3) | 3 | "100" |
| Katogori | X(15) | 15 | Gruppering, frítt |
| Filler | X(3) | 3 | |
| Periode | 9(6) | 6 | MMÁÁÁÁ ???? |
| Valutakode | X(4) | 4 | "KR." |
| Upphædd | 9(16) | 16 | " " , "-" fremst og upphædd í oyrum ??? |
| Batchnavn | X(25) | 25 | Gruppering frítt |
| Journalnavn | X(25) | 25 | Gruppering frítt |
| Tekstur | X(40) | 40 | Hvat fyri tekst ?? |
| Referencefelt 1 | X(15) | 15 | Frítt (Transaktiónsspor) |
| Referencefelt 2 | X(15) | 15 | do |
| Referencefelt 3 | X(15) | 15 | do |
| Referencefelt 4 | X(15) | 15 | do |
| Hovedkonto(seg1) | X(10) | 10 | Blankt |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Underkonto(seg2) | X(10) | 10 | Blankt |
| Institionsnr(seg3) | X(10) | 10 | Stovnsnummar |
| Standregnkt(seg4) | X(10) | 10 | Standardroknskapskonto |
| Underspecif(seg5) | X(10) | 10 | Útgreining |
| Sted(seg6) | X(10) | 10 | Stað |
| Formål(seg7) | X(10) | 10 | Endamål |
| Segment 8 | X(10) | 10 | Segment 8 |
| Segment 9 | X(10) | 10 | Segment 9 |
| Segment 10 | X(10) | 10 | Segment 10 |
| Segment 11 | X(10) | 10 | Segment 11 |
| Segment 12 | X(10) | 10 | Segment 12 |
| Segment 13 | X(10) | 10 | Segment 13 |
| Segment 14 | X(10) | 10 | Segment 14 |
| Fleksfelt 1 | X(15) | 15 | Gruppering, frítt |
| Fleksfelt 2 | X(15) | 15 | do |
| Fleksfelt 3 | X(15) | 15 | do |
| Fleksfelt 4 | X(15) | 15 | do |
| Fleksfelt 5 | X(15) | 15 | do |
| Kontekstværdi | X(20) | 20 | do |
| Kontrolmarkering | X(1) | 1 | "=X", um upphæddin skal samanberast við útgjald ? Skal verða **blankt**! |
| Alias | X(15) | 15 | Blankt |
| | | 456 | |

# 4.6. Goymslu- og lániskipan hjá Hjálpartólamiðstøðini

Verandi skipan á Hjálpartólamiðstøðini verður nýtt í fyrstu atløgu og íbundin til nýggju høvuðsskipanina. Talan er sostatt ikki um at útvega nýggja goymslu- og lániskipan.

*Tørvur í sambandi við goymslu- og lániskipan*
Viðskiftaskráin hjá HTM er tann sama sum í høvuðsskipanini hjá Almannastovuni. Veitingarvariantar í høvuðsskipanini skulu vísa til vørusløg á HTM. Veitingarjáttan í veitingarskipan og avgerðir í máls-viðgerðarskipan verða kendar í HTM.

Møguleiki skal vera at gera hagtøl við at nýta tøl úr HTM-skipanini, saman við tølum úr øðrum skipanum.

# 4.7. Kreditorskipan fyri viðskiftakreditorar

Kreditorskipanin fyri viðskiftakreditorar er eitt slag av einari heimagreiðslu fyri viðskiftafólk, har til ber at fremja vanligar flytingar, at stovna, broyta og strika fastar flytingar, sum viðskiftafólk hevur, og sum Almannastovan skal rinda.

Kreditorskipanin á Almannastovuni skal skráseta krøv frá kreditorum, sum síðan verða avgreidd um útgjaldsskipanina hjá Gjaldstovuni. Útgjaldsskipanin og samskiftið millum hesa og avgreiðsluskipanina á Almannastovuni er nágreiniliga lýst frammanfyri.

Í sambandi við umsiting og málsviðgerð av almannamálum rindar ella endurrindar Almannastovan fyri skjøl, tól og tænastur til m.a. hesar stovnar, feløg og virki:

- Læknar og tannlæknar
- Serfrøðingar
- Viðgerðarfólk og viðgerðarstøð
- Handlar og fyritøkur
- Landssjúkrahúsið
- Apoteksverkið
- Kommunur
- Arbeiðsgevarar

Krøvini (rokningar) verða í kreditorskipanini skrásett við:

- Faktura (skannað ella talgild faktura)
- Móttøkudegi
- Veitingarslagi
- Játtan (j.nr. og dagfesting, lógargrein)
- Viðskiftafólki, sum fær veitingina
- Kravsslagi og kravslýsing (tíðarskeiði)
- Periodu
- Navni og bústaði og p-tali/v-tali hjá kreditori
- Upphædd
- Kreditor-id
- Seinasti gjaldsdagur
- Kontustrongur til Gjaldstovuna FSL.

Koyring av kreditorum, avstemming v.m. fer fram í Fíggjardeildini á Almannastovuni, meðan Vitanardeildin tekur sær av umsiting av kreditorum og markamótum, flyting av dáta v.m.

Fleiri av teimum, sum senda Almannastovuni rokning fyri tænastur v.m., hava støðugt samband við Almannastovuna. Hetta eru eitt nú læknar, sjúkrahús, apotek, kommunur og arbeiðsgevarar. Ynskiligt er tí, at sambandið við hesar samstarvsfelagar verður automatiserað og elektroniskt í mest møguligan mun, tá ið talan er um samskifti um skjøl, upplýsingar,

játtanir og rokningar (tvs., at gjørd verða serlig markamót við hesar stovnar). Kreditorskipanin hjá Almannastovuni skal kunna handfara talgildar fakturar.

Eisini í hesum partinum av skipanini skal skiljast millum útgjaldsmál, sum ikki krevja stórvegis málsviðgerð, og viðgerðarmál, sum kunnu krevja málsviðgerð. Heimildirnar í skipanini mugu lagast til hetta.

Kreditorskipanin innheldur upplýsingar um allar avgreiðslur og kann útskiva kontukort bæði hjá veitingarmóttakara og latara av skjølum, tólum og tænastum v.m.

## 4.8. Debitorskipan

Debitorskipanin er ein skipan, sum liggur á Almannastovuni, men sum umvegis eitt markamót hevur samband við innkrevjingar- og bókhaldsskipanina á Toll- og Skattstovuni. Almannastovan stovnar og umsitur krøv og fyrning, meðan Toll- og Skattstovan innheintar krøvini og sendir upplýsingar aftur til skipanina hjá Almannastovuni um inngjøld, eftirstøður, incasso v.m. Í debitorskipanini verður útistandandi hjá Almannastovuni skrásett eins og inngjøld verða bókað.

Krøv verða í summum førum stovnað automatisk t.d. í sambandi við gjald av barnapengum og dagpengum. Onnur krøv kunnu vera uppkrav fyri tryggingargjald til sjálvbodnu dagpeningaskipanina, afturgjaldsavtalur t.d. í sambandi við latan av avlamislánum, vanlig afturgjaldsskylda av forsorgarhjálp og endurgjald fyri útgjald av útlendskari pensjón.

Í debitorskipanini verða m.a. hesi krøv umsitin:

- Endurgjald fyri goldnan barnapening (+ eykagjald)
- Konupengar
- Gjald frá arbeiðsgevara fyri 1. og 2. sjúkradag
- Tryggingargjald fyri sjálvbodnu dagpeningaskipanina
- Endurgjald frá tryggingini fyri dagpening í sambandi við skaða
- Avlamislán
- Afturgjaldsskylda í forsorg.

Debitorskipanin verður ment í samráð við Gjaldstovuna og Toll- og Skatt-stovuna.

Í sambandi við upprættan av kravi skulu í minsta lagi hesir upplýsingar vera tøkir:

- Nær krav er upprættað
- Kravsslag
- Navn, bústaður og p-tal hjá debitori
- Upphædd
- Kravs-id

- Debitor-id (um tað ikki er p-talið)
- Seinasti gjaldsdagur
- Kontustrongur til Gjaldstovuna FSL.

Umframt at stovna og røkja krøv, skal debitorskipanin eisini kunna útskriva yvirlit – t.d. tíðarfestar eftirstøður og mál farin til incasso – kontuúrrit, og lata upplýsingar til dátavøruhúsið.

Í sambandi við broytingar hjá debitori, sum ikki beinleiðis viðkoma innkrevjingini, skal skipanin upplýsa málsviðgera um møgulig krøv hjá viðkomandi debitori.

Debitorskipanin og markamótið við Toll- og Skattstovuna er lýst í myndini niðanfyri.

*Mynd 20: Debitorskipan á Almannastovuni*




## 4.9. Hagtalsgrunnur (Dátuvøruhús)

Við støði í teimum skrásetingum, sum Almannastovan ger í síni telduskipan í sambandi við málsavgreiðslu, og við støði í øðrum skrásetingum, t.d. av fíggjarviðurskiftum, ber til at fáa til vega:

- *Virksemislýsing*, nøgdarmát, viðskiftafólk, veitingar, býti av transaktiónum v.m. (production).
- *Avrikslýsing*, avrik í mun til ásettar normar, tíð og tilfeingi og avvik í mun til ásett mál, (performance).

- *Virkisøkislýsing*, hvussu háttar virkisøkið sær, í hvussu er tann parturin av almannaøkinum, sum Almannastovan umsitur, tvs. útgreining (analysa) og forsagnir (simuleringar).

Hetta eru alt lýsingar, sum kunnu gerast og leggjast fram í dátuvøru-húsinum.

Dátavøruhúsið hjá Almannastovuni fer í fyrsta lagi at byggja á avgreiðsludáta, sum eru goymd í einum ella fleiri dátagrunnum. Til tess at kunna útgreina viðurskifti, broytingar og gongdir í málsavgreiðsluni, verður eisini neyðugt at taka uttanhýsis dáta inn í dátavøruhúsið, og neyðugt verður eisini at kunna goyma og viðgera úrslit frá kanningum (survey-dáta) í dátavøruhúsinum.

Ein fyritreyt fyri at full nytta skal fáast burtur úr dátavøruhúsinum er, at øll avgreiðsludáta eru í skipanini, og at tey eru har beinanvegin tey eru skrásett (OLTP).

Høvuðssambandið í dátavøruhúsinum er millum persónar, veitingarsløg og sosialar og búskaparligar hendingar. Eitt høvuðsyvirlit, sum lýsir hetta sambandið, verður inngongdin til restina av dáta ella kunning í dátavøruhúsinum.

Øll transaktiónsdáta verða goymd við jøvnum millumbili í dátavøruhúsinum, og allar broytingar í stamdáta verða skrásettar (loggaðar), soleiðis at til ber til eina og hvørja tíð at staðfesta rørslur og broytingar í grunddáta í einum tíðarperspektivi.

Upplýsingarnir í dátavøruhúsinum eru ein støðulýsing, sum verður dagførd við jøvnum millumbili, t.d. beint eftir at koyringar eru gjørdar, soleiðis at kunningin, sum er úrtøk úr dátuvøruhúsinum, er so rættvísandi sum tilber.

Meðan avgreiðsluskipanin *avgreiðir* stakhendingar (transactional processing), so er dátavøruhúsið *ein uppgerð* yvir stakhendingar (dátasavn/anonymisering av dáta), sum síðan verður bólkað eftir eginleika (dimensjónum). Hetta er tað, sum eisini verður rópt útgreinandi dátuviðgerð (analytical processing).

*Mynd 21: Konseptdiagram/dátavøruhús*




Á myndini omanfyri síggjast ymsu partarnir í dátavøruhúsinum. Tað, sum ger dátavøruhúsið áhugavert, er, tá ið *fakta*-tabellirnar, sum innihalda øll dáta, sum viðvíkja teimum ymsu viðurskiftunum á almannaøkinum, verða skipaðar eftir *dimensjónum* fyri at lýsa ávís virkisøki ella evni (dátamartlar).

Fakta ella uppgerðir kunnu eisini verða mett í mun til ásettar *normar* (tíðarnormar, fíggarligar normar o.s.fr.). Periodisering (*søga*) tryggjar, at tað altíð ber at síggja tær umstøður, sum vóru galdandi eitt ávíst tíðarskeið t.d. aktuella útrokningargrundarlagið fyri eina veiting.

Út frá tøkum dáta verða gjørd úrtøk úr avgreiðsluskipanini, og dáta kunnu verða skipað í dátavøruhúsinum eftir t.d. hesum dimensjónum:

- Landafrøði (demo- og sociografi) (persónar kunnu t.d. verða lýstir við bústaði, kyni, aldri, sivilstøðu, tali av børnum, heilsustøðu, starvi og inntøku- og ognarupplýsingum v.m.)
- Veitingarsløg
- Veitingar (nøgdir)
- Serlig tiltøk og broytingar í veitingarmynstrinum
- Fíggjarlig viðurskifti (prísur pr. veitingareind, útgoldið fyri veitingar, hvussu nógv tilfeingi verður brúkt til at framleiða eina ávísa veiting o.s.fr.)
- Stovnsdáta
- Tíð
- Aktørar (viðgerðarstovnar og -fólk, latarar av veitingum og tænastum, arbeiðsgevarar o.tl.)
- Eftirmetingar.

Rapportir og hagtalsgreiningar verða gjørdar við, at staðfestar verða relatiónir millum omanfyri nevndu dimensiónir, og við at lýsa relatiónir internt í dimensjónunum (t.d. at gongdin í sambandinum millum veitingarsløgini verður lýst). Leitað kann verða eftir mynstrum (t.d. at ein veiting kanska seinni útloysir eina aðra veiting, ella at ein social hending førir til øking ella minking í ávísum veitingum o.s.fr.) og rákum (trends).

Standardrapportir kunnu vísa lyklatøl í sambandi við málsavgreiðslu, t.d. avgreidd mál (slag av málum), nærri útgreining av t.d. einstøkum veitingarslagi ella bólki av viðskiftafólki, hvørjar almannahendingar hava ført til veitingar og fíggjarhagtøl, t.d. sum einfaldar hagfrøðiligar greiningar (t.d. rullandi miðaltøl og grafiska lýsing av hesum).

Rapportir skulu kunnu skapast eftir tørvi í einum serligum *rapportmoduli*.

Her er talan um leiðslukunning, sum er tøk og dagførd í somu løtu, biðið verður um hana.

Onnur starvsfólk, sum hava hetta sum arbeiðsuppgávu, skulu kunnu gera meiri nágreiniligar hagfrøðiligar analysur: ymisk sløg av kross-tabuleringum, fleirdimensionellar analysur, varians- og regressións-analysur, gera útgreiningar (eitt nú staðfesta um broytingar t.d. stava frá størri tilgongd av viðskiftafólki, broytingum í satsum og/ella regluverki), tvs. tøl verða sett í kontekst. Talan er um at gera støðulýsingar, ad hoc fyrispurningar, lýsa broytingar í ávísum styttri ella longri tíðarskeiði, meta um avleiðingar, gera framskrivingar, simuleringar o.s.fr. Møguleiki skal vera at brúka bæði eksponentiellar og linierar framskrivingarhættir.

Hetta verður tískil eitt serligt *analysu- og simuleringsmodul* í dátavøru-húsinum.

Uppaftur onnur kunnu gera veruligar útgreiningar, t.d. við støði í øðrum dáta enn teimum, sum eru úrslit av virkseminum á Almannastovuni.

Brúkarar av dáta úr dátuvøruhúsinum eru fyrst og fremst leiðsla og deildarleiðarar á Almannastovuni. Harumframt eru aðrir brúkarar, sum kunnu fáa atgongd til dátuvøruhúsið eitt nú granskarar, lesandi, almenningurin, fjølmiðlar, Almanna- og heilsumálaráðið, Hagstovan, Fíggjarmálaráðið, politiska skipanin annars og The Nordic Social-Statistical Committee (NOSOSCO).

Dátuvøruhúsið letur kunning og dáta til *ársfrágreiðingina* hjá stovninum, umframt at henda kunning ella partar av henni er tøk á intranetinum og heimasíðuni hjá Almannastovuni.

Dátavøruhúsið eigur at mennast við hesum í huga.

# 4.10. Dátamarkamót og elektroniskur dátaflutningur

Almannastovan kann hava fyri neyðini, skal arbeiðsgongdin í KT-skipanini ikki verður drúgvari enn neyðugt, at fáa upplýsingar fluttar skjótt inn í skráirnar í avgreiðslu- og kunningarskipanini, eins og tað kann skunda undir avgreiðsluna, at koyringar kunnu avgreiðast elektroniskt og helst on-line. Hetta er eisini við til at tryggja eina rætta málsviðgerð.

*Føroya Gjaldsstova*
Sum er verða flestu útgjaldingar hjá Almannastovuni avgreiddar av Postgirostovuni. Sambært kommissoriinum hevur verkætlanin m.a. sum mál, at øll skráseting í fíggjarbókhaldið í FSL verður framt á slíkan hátt, at samsvar er við galdandi roknskaparkunngerð, og at øll útgjøld frá skipanini hjá Almannastovuni verða útgoldin umvegis Búskaparskipan Landsins.

Sambært § 4, stk. 5 í *kunngerð nr. 114 frá 22. august 1996 um roknskaparverk landsins o. a.* kann Gjaldstovan eftir umsókn loyva stovnum við serligum tørvi heilt ella lutvíst at nýta sínar egnu búskaparskipanir. Loyvið vil hava við sær, at búskaparskipanin skal lúka tey kunningar-, trygdar-, eftirlits- og tíðarkrøv, sum til eina og hvørja tíð eru galdandi fyri Búskaparskipan Landsins.

Í kunngerðini verður eisini staðfest, at loyvið er eisini treytað av, at dáta-samskiftið kann gerast elektroniskt ella á annan líknandi hátt um standardmarkamótið hjá Búskaparskipan Landsins. Eisini skal ein skrivlig rakstraravtala, sum nærri útgreinar treytirnar fyri dátasamskifti o.ø., gerast við Gjaldstovuna.

Í § 11 í kunngerðini eru eisini neyvar ásetingar um roknskaparligar skrásetingar, sum eisini eru galdandi fyri skrásetingar, sum verða gjørdar í eini egnari búskaparskipan, sum kemur undir reglurnar um roknskaparverk landsins.

Í § 15 í kunngerðini eru eisini ásetingar um, at allar útgjaldingar skulu fara fram yvir Búskaparskipan Landsins.

Tað er vert at gera skilnað millum vanligan stovnsrakstur og málsviðgerð. Avgreiðslu- og kunningarskipanin hjá Almannastovuni er ikki ein búskaparskipan, men ein málsviðgerðarskipan. Málsviðgerðarskipanin hevur nógvar peningaligar transaktiónir (inn- og útgjøld) við sær, og hesar skulu avgreiðast um Búskaparskipan Landsins. Somuleiðis skulu allar peningaligar transaktiónir viðvíkjandi stovnsrakstri sum higartil avgreiðast um Búskaparskipan Landsins, sum Almannastovan hevur atgongd til.

Umframt at tað hevur týdning at halda fast við funktiónsskilnaðin millum málsviðgerð og roknskaparlig viðurskifti í hesum sambandi, verður neyðugt í einum komandi samstarvi við Gjaldstovuna um roknskaparhald og umsiting av útgjaldi, inngjøldum og debitor- og kreditorbókhaldi at

fyribyrgja, at óviðkomandi fáa atgongd til møgulig viðkvom dáta, at umsitingin lýkur KT-trygdarkrøv, herímillum krøv um kryptering av dátaflutningi. Almannastovan má eisini varðveita førleika og fult innlit í egið virksemi, sum verður umsitið í Búskaparskipan Landsins.

Umframt útgjaldsskipanina eru eisini debitor- og kreditorskipan, inngjaldsskipan og lønarskipan partur av búskaparskipanini hjá Gjaldstovuni. Almannastovan brúkar sum er fleiri av hesum skipanum. Vanlingar veitingar verða avgreiddar gjøgnum VFS, útgoldnar um Postgirostovuna og bókaðar á Gjaldstovuni. Góðir møguleikar er at fylgja við bókingum v.m. í leiðslukunningarskipanini. Allur raksturin hjá Almannastovuni verður bókaður í FSL. Fleiri útgjøld frá Almannastovuni til kreditorar verða avgreidd beinleiðis gjøgnum FSL, meðan ein partur av hesum útgjøldum verður avgreiddur gjøgnum VFS. Sama er galdandi fyri útlendska pensjón sambært Nordisk konvention om social sikring.

Mett verður, at tað eru ongar forðingar fyri, at eitt markamót kann gerast í KT-skipanini hjá Almannastovuni, sum samsvarar við útgjaldsskipanina hjá Gjaldstovuni.

Eitt samstarv um útgjald og roknskaparhald við Gjaldstovuna fer at krevja, at nakrar av verandi arbeiðsgongdum verða broyttar, men neyvan fara stórur trupulleikar at standast av hesum.

Ein trupulleiki er tað tó, at tað ikki, eins og í t.d. Danmark, hjá okkum er eitt krav, at allar almannaveitingar skulu kunnu gjaldast út um eina peningastovnskontu. Í sambandi við menningina av eini nýggjari avgreiðslu- og kunningarskipan á Almannastovuni fer tað at verða eitt krav, at hon eisini skal kunna umsita talgildar fakturar.

Nágreinilig lýsing av Búskaparskipan Landsins er at finna á heimasíðuni hjá Gjaldstovuni: www.gjaldstovan.fo. Víst verður til hesa.

*Toll- og Skattstova Føroya*
*Innkrevjing*
Toll- og Skattstovan umsitur í løtuni innheinting, inn- og útgjaldan av m.a. barnapengum (ígongurættur, eykatrekk og vanligar barnapengar), konupengum, avlamislánum (HTM), 1. og 2. sjúkrafráverudag, pensjón (ov nógv útgoldin pensjón) og krøv til tryggingarfeløg í sambandi við dagpening.

Toll- og Skattstovan ynskir, at øll omanfyri nevndu krøvsløg eiga at verða umsitin í einari debitorskipan hjá Almannastovuni, sum so læs beinleiðis inn og úr innkrevjingarskipanini hjá Toll- og Skattstovuni. Henda debitorskipan kundi soleiðis virkað sum ein móðurskipan, sum Toll- og Skattstovan so alla tíðina samskifti við. Hetta vildi sambært Toll- og Skattstovuni ført við sær, at Almannastovan fekk betri yvirlit og stýring av sínum kreditorum.

Toll- og Skattstovan kundi eisini hugsað sær at fingið staðfest formligar reglur fyri samstarvinum við Almannastovuna um innkrevjingina.

*Inntøkulesing*

Mett verður umráðandi, at í nýggju málsviðgerðar- og avgreiðsluskipanini skulu allir relevantir inntøku- og ognarupplýsingar longu vera tøkir í tí webmarkamóti, sum málsviðgerin arbeiðir í. Skipanin skal sostatt sjálvvirkandi innlesa viðkomandi dáta úr dátabasuni hjá Toll- og Skattstovuni, og at hesar upplýsingar eru tøkar samstundis, sum málsviðgerin byrjar eina ítøkiliga málsviðgerð um almannaveiting.

Møguleiki skal eisini vera fyri at velja sløg av inntøkuupplýsingum, og møguliga velja at brúka inntøkuupplýsingar frá øðrum ári enn inniverandi, um tørvur var á tí. Sambært Toll- og Skattstovuni er einki tekniskt til hindurs fyri at gera eitt middleware, sum heintar upplýsingar hjá ávísum persóni/persónum úr skattaskránni hjá Toll- og Skattstovuni, og flutti teir beinleiðis inn í eina KT-skipan hjá Almannastovuni. Neyðugt er tó, at Almannastovan og Toll- og Skattstovan semjast um, hvørjar upplýsingar Almannastovan hevur rætt til og fyri neyðini at fáa atgongd til.

*Apoteksverkið*

Apoteksverkið hevur fingið nýggja telduskipan, sum m.a. skrásetur keyp av heilivági á persónar. Apoteksverkið fær sendandi játtanaryvirlit frá Almannastovuni, sum eisini inniheldur upplýsingar um egingjald. Fyri tann partin av keypinum, sum fer upp um egingjaldið verður Almannastovan debiterað fyri upphæddina.

KT-deildin á Apoteksverkinum hevur upplýst, at Apoteksverkið hevur fingið nýggjar edv-skráir (dátagrunnur: Oracle), og at tað frá teirra síðu einki er til hindurs fyri at seta á stovn eitt on-line samband millum Apoteksverkið og nýggju KT-skipanina hjá Almannastovuni, so at upplýsingar um egingjald (játtan) frá Almannstovuni og upplýsingar um nýtslu á apotekunum (rokningar) kundu flytast millum stovnarnar. Hetta hevði verið ein fyrimunur fyri allar partar. Í menningini av einum slíkum sambandi eigur tó at havast í huga, at talan er um flyting av viðkvomum upplýsingum millum stovnarnar, so trygdin má vera í lagi.

Apoteksverkið bólkar sín heilivág eftir einum sonevndum medicinalindexi, so møguleiki skuldi verið fyri, at nýtslan av heilvági kundi verið bólkað samsvarandi hesum. Á tann hátt kundi Almannastovan bygt upp eitt hagtalsyvirlit yvir hesa nýtslu í dátuvøruhúsinum.

Niðanfyri verður lýst tey dátamarkamót, ið skipanin hjá Almannastovuni skal samskifta við.

*Heimarøktin og Serforsorgin*

Heimarøktin og Serforsorgin hava tørv á upplýsingum frá Almannastovuni um hendingar, sum hava ávirkan á teirra málsviðgerð og meting um tørv nøkur ár fram í tíðina. Á fleiri økjum er talan í stóran mun um felags

málsviðgerð. Í sambandi við avrokning av egingjaldi, sum verður trekt av pensjónini, skulu hesar framyvir avgreiðast elektroniskt yvir skipanina hjá Almannastovuni.

*Kommunurnar*
Kommunurnar skulu knýtast til skipanina serliga viðvíkjandi barnaverndarøkinum. Tað eigur at verða umhugsað at áseta krøv til kommunurnar um rapportering av dáta umframt øðrum hagtalsdáta til skipanina.

*Íbinding til fólka- og adressuskrá hjá Landsfólkayvirlitinum*
Høvuðsskipanin hjá Almannastovuni skal samskifta við komandi skipan hjá Landsfólkayvirlitinum. Almannastovan skal hava møguleika at lesa beinleiðis úr skipanini hjá Landsfólkayvirlitinum.

Tørvurin er, at Almannastovan má kenna til p-tal, navn, adressu og familjustøðu v.m. hjá viðskiftafólki.

Høvuðsskipanin á Almannastovuni hevur tørv á at fáa hesar upplýsingar frá Landsfólkayvirlitinum:

1. Eyðmerking
    a. týðandi krav um P-tal
    b. ynski um A-tal, V-tal ogn
    c. ynski um samknýti til útlendsk (fyrst og fremst norðurlendsk) persónstøl, við denti á donsk cpr-nr í fyrstu atløgu
    d. møguleikar fyri onnur altjóða eyðmerkingartøl
    e. møguleikar fyri at leggja aðrar lyklar og eyðmerkingartøl inn eftir tørvi
2. Virknisstøða og orsøk til, hví persónur/p-tal er óvirkið
    a. um persónurin er til
    b. deyður
    c. horvin
    d. fluttur úr Føroyum
    e. aðrar orsøkir.
3. Myndugleikastøða
    a. myndugur
    b. ómyndugur við áseting av møguligari orsøk fyri ómynduggerð
    c. endurmynduggjørdur
4. Borgarastøða
    a. føroyingur
    b. danskur ríkisborgari í Føroyum
    c. útlendingur í Føroyum
    d. flótti
    e. onnur borgarastøða
5. Kyn
6. Navn
    a. øll galdandi fornøvn og eftirnavn

    b. upplýsing um navnaskifti (dagfesting og orsøk)
7. Adressur
    a. galdandi postadressa, sum eisini kann vera postboksadressa
    b. galdandi Landsfólkayvirlitsadressa. Í ávísum førum kann koma fyri, at Almannastovan velur, at onnur adressa enn hendan adressan verður galdandi í málsviðgerð á Almannastovuni
    c. allar núverandi og fyrrverandi adressur fyri viðkomandi, við áseting av 1) adressustøða fyri hvørja einstaka adressu – um støðuga, fyribils ella ógilduga adressu; 2) bútíð, t.e. er áseting av byrjunar- og møguliga endadagi fyri adressu, og tíðarskeiði; 3) fyrrverandi adressur hava týdning, tí í fleiri førum hevur adressuskifti týdning fyri útrokning av veitingum; og 4) í ávísum førum hevur tað týdning at vita, hvørja kommunu, viðkomandi persónur hoyrir til, og hevur hoyrt til í farnum tíðarskeiðum
    d. serligt um útlendskar adressur. Vísandi til felags norðurlendska avtalu um fólkapensjón, krevst vitan um, um persónurin hevur búð í øðrum norðurlondum, við áseting av hvørjum londum og tíðarskeiðið fyri uppihaldum. Hetta tí, at persónurin kann fáa ein lutfalsligan part av pensjónini útgoldnað frá viðkomandi londum.
8. Tilknýti millum persónar
    a. hjúnarstøða, við áseting av hjúnardegi/-døgum og møguligum skilnaðardegi/-døgum
    b. foreldur/barn, við áseting av føðidegi og mammu-/pápatilknýti. Í ávísum førum ber til, at fleiri persónar verða dømdir at hava skyldur sum pápar
    c. adoptivbarn, við áseting av adoptiónsdegi og báðum foreldrum
    d. verji/verjar fyri viðkomandi persón, við áseting av byrjanar- og endadegi fyri ígildiskomu av verjuskyldu
    e. ynski er eisini at vita um persónar eru sambúgvandi, við áseting av byrjanar- og endadegi fyri sambýli.

Fyri allar broytingar í upplýsingum er týðandi at vita dagfesting fyri, nær upplýsingin er broytt.

Samskiftið skal fara fram elektroniskt. Hetta kann fara fram sum beinleiðis on-line samskifti, har høvuðsskipanin slær upp í skipanini hjá fólkayvirlitinum. Hendan loysnin tryggjar mest møguliga dagførdu upplýsingar, men kann verða tøkniliga trupul, og krevur nógv av on-linesambandinum.

Annar møguleiki er dagligur elektroniskur flutningur av filu, sum verður flutt frá skipanini hjá fólkayvirlitinum til høvuðsskipanina. Hendan loysnin er lættari tøkniliga, men ger at tað kunnu verða dagføringar, sum vænta. Tørvur er á minst dagligum fíluflutningi.

Fíluflutningur er støðan í dag. Beinleiðis on-line samskifti er at taka framum.

*Íbinding til skattaskipan hjá Toll- og Skattstovu Føroya*
Høvuðsskipanin hjá Almannastovuni skal samskifta við skattaskipanina hjá Toll- og Skattstovuni.

Tørvurin er, at í fleiri førum skal Almannastovan kenna neyv inntøkuviðurskifti hjá viðskiftafólki fyri at kunna staðfesta, um viðkomandi hevur rætt til veiting frá Almannastovuni. Almannastovan skal tí hava møguleika at lesa úr skipanini og sjálvvirkandi flyta viðkomandi dáta í mun til ítøkiligu málsviðgerðina inn í skipanina hjá Almannastovuni.

Í ávísum førum kann Almannastovan, um Toll- og Skattstovan ynskir tað, veita upplýsingar um broytingar í fortreytum fyri skattskyldugari inntøku. Hetta er í sambandi við veitingar av skattskyldugum veitingum til einstaklingar, og í sambandi við afturføring av skattskyldugum veitingum, har afturføringin kann broyta samanteljingar av skattskyldugari inntøku.

Talan er um hetta samskifti:

1. Fyrispurningur um inntøkuviðurskifti hjá einstaklingum, hjúnum, familjum og sambúgvandi
    a. Almannastovan vil brúka p-tal hjá viðskiftafólki
    b. Almannastovan ynskir samanteljingar frá Toll- og Skattstovuni
2. Fráboðan um lækkan av skattskyldugari inntøku
    a. ein serskild fráboðan, tá Almannastovan krevur aftur skattskyldugar veitingar frá viðskiftafólki.

Fráboðan um hækkan av skattskyldugari inntøku er ikki ein serskild fráboðan, tí Toll- og Skattstovan fær hesa óbeinleiðis við, at Almannastovan rindar út allar skattskyldugar veitingar umvegis útgjaldsskipanina hjá Gjaldstovuni, og hervið fær Toll- og Skattstovan høvið at skatta allar skattskyldugar veitingar beinleiðis.

Nærri ásetingar av dátaformati í samskiftinum verða ásett út frá skattaskipanini hjá Toll- og Skattstovuni. Sum útgangsstøði verður talan um sama markamót, sum Almannastovan hevur í dag við skattaskipanina.

Fyri allar broytingar í upplýsingum er týðandi at vita dagfesting fyri, nær upplýsingurin er broyttur.

Samskiftið skal fara fram elektroniskt, helst sum beinleiðis on-line samskifti, har høvuðsskipanin slær upp í skipanini hjá Toll- og Skattstovuni. Hendan loysnin tryggjar mest møguliga dagførdu upplýsingar, men kann verða tøkniliga trupul, og krevur nógv av on-linesambandinum.

*Íbinding til innkrevjingar- og bókhaldsskipan hjá Toll- og Skattstovu Føroya*
Debitorskipanin hjá Almannastovuni skal samskifta við innkrevjingar- og bókhaldsskipanina hjá Toll- og Skattstovuni.

Toll- og Skattstovan er innkrevjingarmyndugleiki fyri Almannastovuna. Almannastovan skal staðfesta eitt krav yvirfyri Toll- og Skattstovuni, og í aðru atløgu gevast við at umsita krøv mótvegis debitorum so hvørt sum krøvini verða flutt til Toll- og Skattstovuna at avgreiða.

Talan er um hetta samskifti:

1. Fráboðan av falnum kravi til innkrevjingar- og bókhaldsskipanina. Hetta við at krav verður flutt úr debitorskipanini í høvuðsskipanini til innkrevjingar- og bókhaldsskipanina hjá Toll- og Skattstovuni.
2. Dagføring av falnum kravi til innkrevjingar- og bókhaldsskipanina – til dømis um viðskiftafólk hevur goldið gjald beinleiðis til Almannastovuna viðvíkjandi kravi, sum er farið til innkrevjingar- og bókhaldsskipana. Rentutilskriving og panting verður framd av Toll- og Skattstovuni.
3. Dagføring frá innkrevjingar- og bókhaldsskipanini til debitorskipan hjá Almannastovuni – t.d. tá Toll- og Skattstovan fær heilt ella partvíst innkravda upphædd viðvíkjandi kravi, sum er farið til innkrevjingar- og bókhaldsskipanina.
4. Fráboðan frá innkrevjingar- og bókhaldsskipanini til debitorskipanina hjá Almannastovuni um, at krav er avgreitt – t.d. tá Toll- og Skattstovan hevur fingið fulla innkravda upphædd viðvíkjandi kravi, sum er farið til innkrevjingar- og bókhaldsskipana.
5. Fráboðan frá innkrevjingar- og bókhaldsskipanini til debitorskipanina hjá Almannastovuni um, at krav er heilt- ella partvíst avskrivað - t.d tá Toll- og Skattstovan velur at gera saneringsavtalu við viðskiftafólk, sum rakar krav hjá Almannastovuni, sum er farið til innkrevjingar- og bókhalds-skipanina.

Nærri ásetingar av dátaformati í samskiftinum verða ásett út frá innkrevjingar- og bókhaldsskipanini hjá Toll- og Skattstovuni.

Fyri allar broytingar í upplýsingum er týðandi at vita dagfesting fyri, nær upplýsingin er broytt.

Samskiftið skal fara fram elektroniskt, antin sum beinleiðis on-line samskifti, har høvuðsskipanin og innkrevjingar- og bókhaldsskipanin senda dáta sínamillum. Hendan loysnin tryggjar mest møguliga dagførdu upplýsingar, men kann verða tøkniliga trupul, og krevur nógv av on-linesambandinum.

Í aðru atløgu ber til at skipa samskiftið við dagligum elektroniskum fíluflutningi. Hendan loysnin er lættari tøkniliga, men ger at tað kunnu verða dagføringar, sum vænta. Tørvur er á minst dagligum fíluflutningi.

Beinleiðis on-line samskifti er at taka framum.

*Íbinding til Útgjaldsskipan hjá Føroya Gjaldstovu*
Útgjaldsskipanin hjá Gjaldstovuni skal samskifta við útgjaldsskipanina hjá Almannastovuni.

Tørvurin er, at Almannastovan skal fremja øll útgjøld umvegis Gjaldstovuna bæði skattskyldug og ikki-skattskyldug útgjøld. Fyri Almannastovuna verður samskiftið at rokna sum leysgevandi, tvs., at tá útgjald er farið frá Almannastovuni, skal útgjaldsskipanin ikki melda aftur til Almannastovuna, men einans fremja útgjaldið sum so.

Talan er um hetta samskifti:

Fráboðanir um ávikavist skattskyldugar og ikki-skattskyldugar veitingar til útgjaldsskipan.

1. Fráboðanir um veitingar til útgjaldsskipan
2. Fráboðanir um ætlaðar veitingar til útgjaldsskipan
3. Annullering av ætlaðum skattskyldugum og ikki-skattskyldugum veitingum til útgjaldsskipan
4. Gjaldførisfrásagnir - tað er yvirlit yvir ætlaðar skattskyldugar og ikki-skattskyldugar veitingar til útgjaldsskipan
5. Dagføring av gjaldførisfrásagnum - tað eru broytt yvirlit yvir ætlaðar skattskyldugar og ikki-skattskyldugar veitingar til útgjaldsskipan
6. Svar frá útgjaldsskipan um ikki-framd útgjøld

Nýtast skulu tey dátaformatir, sum Gjaldstovan hevur ásett til samskiftið.

Fyri allar broytingar í upplýsingum er týðandi at vita dagfesting fyri, nær upplýsingin er broytt.

Samskiftið skal fara fram elektroniskt helst sum beinleiðis on-line samskifti, har høvuðsskipanin sendir upplýsingar til útgjaldsskipanina. Hendan loysnin tryggjar mest møguliga dagførdu upplýsingar, men kann verða tøkniliga trupul, og krevur nógv av on-linesambandinum.

Í aðru atløgu ber til at skipa samskiftið við dagligum elektroniskum fíluflutningi, sum verður flutt frá høvuðsskipanini til útgjaldsskipanina. Tørvur er á minst dagligum fíluflutningi.

Beinleiðis on-line samskifti er at taka framum.

*Íbinding til Fíggjarskipan hjá Føroya Gjaldstovu*
Veitingarskipanin hjá Almannastovuni skal samskifta við fíggjarskipanina hjá Gjaldstovuni. Almannastovan skal bóka útgjøldini í høvuðsbókhaldið.

Talan er um hetta samskifti:

1. Fráboðanir um bókingar til fíggjarskipanina.

Fyri allar broytingar í upplýsingum er týðandi at vita dagfesting fyri, nær upplýsingin er broytt.

Samskiftið skal fara fram elektroniskt helst sum beinleiðis on-line samskifti, har høvuðsskipanin sendir upplýsingar til høvuðsbókhaldið. Hendan loysnin tryggjar mest møguliga dagførdu upplýsingar, men kann verða tøkniliga trupul, og krevur nógv av on-linesambandinum.

Í aðru atløgu ber til at skipa samskiftið við dagligum elektroniskum fíluflutningi, sum verður flutt frá høvuðsskipanini til høvuðsbókhaldið. Tørvur er á minst dagligum fíluflutningi.

Beinleiðis on-line samskifti er at taka framum.

*Íbinding til avrokningarskipan hjá Apoteksverkinum*
Veitingarskipanin hjá Almannastovuni skal samskifta við avrokningar-skipanina hjá Apoteksverkinum.

Almannastovan skal endurrinda heilivágsútreiðslur fyri viðskiftafólk eftir nærri ásettum reglum. Fyri at tryggja, at Almannastovan hevur møguleika at eftirkanna hesar veitingar á munadyggan hátt, er neyðugt, at dátasamskifti fer fram millum Almannastovuna og Apoteksverkið.

Talan er um hetta samskifti:

1. Játtan til Apoteksverkið um, at Almannastovan endurrindar upphæddir fyri ávíst viðskiftafólk. Játtanin inniheldur ásetingar um
    a. heilivágsslag, sum er umfatað av játtanini, upplýst við ATC-kotu
    b. egingjald hjá viðskiftafólki, upplýst í krónum ella sum slag av egingjaldi
    c. eyðmerking av viðskiftafólki, upplýst sum P-tal.
2. Fakturalinjur frá Apoteksverkinum, sum tilskila endurrindan av heilivágsútreiðslum frá Almannastovuni til Apoteksverkið.

Útgreinast skal niður á einstøku heilivágsløgini og eindir av hesum.

Allar rættingar ella broytingar í játtan, sum er givin, skal dagførast í apoteksskipanini. Fyri allar broytingar í upplýsingum er týðandi at vita dagfesting fyri, nær upplýsingin er broytt.

Samskiftið skal fara fram elektroniskt helst sum beinleiðis on-line samskifti, har høvuðsskipanin og apoteksskipanin samskifta sínamillum. Hendan loysnin tryggjar mest møguliga dagførdu upplýsingar, men kann verða tøkniliga trupul, og krevur nógv av on-linesambandinum.

Í aðru atløgu ber til at skipa samskiftið við dagligum elektroniskum fíluflutningi, sum verður flutt millum skipanirnar. Tørvur er á minst dagligum fíluflutningi.

Beinleiðis on-line samskifti er at taka framum.

*Íbinding til heilivágsyvirlit/príslistar hjá Apoteksverkinum*
Veitingarskipanin hjá Almannastovuni skal samskifta við heilivágsyvirlit hjá Apoteksverkinum.

Tørvurin er, at allar játtanir um heilivágsstuðul, sum Almannastovan ger, skulu hava eindarkostnað, tá viðskiftafólkið hevur keypt heilivágin. Tað vil siga, at tað er ikki neyðugt hjá Almannastovuni at kenna prísin áðrenn játtanin fyriliggur, men tað er umráðandi, at tað er dagsprísurin, sum er grundarlagið fyri veitingini. Hesin eindarkostnaður skal dagførast dagliga. Í aðru atløgu hevur Almannastovan tørv á prísum fyri at kunna framskriva seg fram til samlaðan fíggjartørv í komandi tíðum.

Talan er um hetta samskifti:

1. Yvirlit frá Apoteksverkinum yvir heilivág og dagsprísir á hesum.

Fyri allar broytingar í upplýsingum er týðandi at vita dagfesting fyri, nær upplýsingin er broytt.

Samskiftið skal fara fram elektroniskt við elektroniskum fíluflutningi, sum verður flutt millum skipanirnar. Tørvur er á regluligum fíluflutningi í mun til, nær prísbroytingar fara fram.

*Íbinding til talgildar læknaváttanir frá Talgildu Heilsuskipanini hjá Almanna- og heilsumálaráðnum*
Fleiri partar í høvuðsskipanini hjá Almannastovuni hava tørv á upplýsingum frá Talgildu Heilsuskipanini hjá Almanna- og heilsumálaráðnum.

Fyrsti tørvurin á talgildum læknaváttanum er fyrst og fremst í sambandi við fyrisiting av sjúkradøgum.

Talan er um hetta samskiftið:

1. Útskriving av læknaváttanum frá kommunu- og serlæknum. Týðandi upplýsingar eru m.a:
   a. p-tal hjá viðskiftafólki.
   b. p-tal hjá viðkomandi lækna.
   c. tíðarskeið, sum læknaváttanin umfatar
   d. diagnosa
   e. partvís ella full sjúkramelding
   f. barnsburður
   g. evt. frágreiðing

h. sjúku- ella skaðaorsøk.

Í skrivandi stund skrivar Heilsuskipanin læknaváttanir sum PDF-skjøl. Hetta merkir, at tað ikki er líkatil at eyðmerkja til hvørji mál, einstøku læknaváttanirnar hoyra til. Ynskiligt er at fáa dáta sum XML-format ístaðin, so til ber at nýta dáta til at greina váttanirnar beinleiðis til tey mál í høvuðsskipanini, har tær hoyra heima.

Annar tørvurin á talgildum læknaváttanum er fyrst og fremst í sambandi við fyrisiting av heilivágsstuðli.

Talan er um hetta samskifti:

1. Útskriving av læknaváttanum frá kommunu- og serlæknum. Týðandi upplýsingar eru:
   a. p-tal hjá viðskiftafólki
   b. p-tal hjá viðkomandi lækna
   c. eyðmerki og/ella ATC-koda fyri hvønn einstakan heilivág
   d. um møguleiki er fyri at gera generiskt býti
   f. hvussu leingi læknaváttanin er galdandi – í tíð og/ella tal av avheintanum.
2. Annullering av heiligvágsstuðli.

Samskiftið skal fara fram elektroniskt helst sum beinleiðis on-line samskifti, har høvuðsskipanin og heilsuskipanin samskifta sínamillum. Hendan loysnin tryggjar mest møguliga dagførdu upplýsingar, men kann verða tøkniliga trupul, og krevur nógv av on-linesambandinum.

Í aðru atløgu ber til at skipa samskiftið við dagligum elektroniskum fíluflutningi, sum verður flutt millum skipanirnar. Tørvur er á minst dagligum fíluflutningi.

Beinleiðis on-line samband er at taka framum.

*Íbinding til ALS og Barsilsskipan*
Í sambandi við innheintan av upplýsingum um fólk í Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini eigur høvuðsskipanin hjá Almannastovuni at verða íbundin hesar skipanir.

Talan er um hetta samskifti:

1. Upplýsingar um arbeiðsviðurskifti, tvs. er viðskiftafólkið skrásett sum tøkt á arbeiðsmarknaðinum. Hetta hevur týdning í mun til forsorgarlógina, serliga forsorg vegna arbeiðsloysi.
2. Inntøkuváttan frá ALS í mun til dagpengaskipanina.
3. Upptøku í barsilsskipanina og sjúkraviðurskifti, termin og læknaváttan í mun til dagpengar. Upplýsingar kunnu ganga báðar vegir.

Samskiftið skal fara fram elektroniskt helst sum beinleiðis on-line samskifti, har høvuðsskipanin og telduskipanin hjá ALS og Barsilsskipanini samskifta sínamillum. Hendan loysnin tryggjar mest møguliga dagførdu upplýsingar. Í aðru atløgu ber til at skipa samskiftið við dagligum elektroniskum fíluflutningi, sum verður flutt millum skipanirnar. Tørvur er á minst dagligum fíluflutningi.

Beinleiðis on-line samskifti er at taka framum.

*Íbinding til rokningadepil (talgildar rokningar) á Elektron*

Í sambandi við talgildan av handfaring av rokningum eigur høvuðsskipanin hjá Almannastovuni at verða íbundin til komandi rokningadepil á Elektron. Endamálið við rokningadeplinum er at samskipa samskiftið av rokningum frá kreditor til debitor.

Fyri Almannastovuni merkir tað, at kreditorskipanin skal kunna taka ímóti talgildum rokningum frá rokningadeplinum, og at debitorskipanin skal kunna senda talgildar rokningar til rokningadepilin.

Talan er um hetta samskifti:

1. Móttøka av talgildum rokningum frá rokningadeplinum.
2. Responsur uppá talgildar rokningar til rokningadeplinum.
3. Fráboðanir av talgildum rokningum til rokningadepilin.
4. Annullering av talgildum rokningum (kreditnota) til rokninga-depilin.

Fyri allar broytingar í upplýsingum er týðandi at vita dagfesting fyri, nær upplýsingin er broytt.

Víst verður til nærri lýsingar frá Elektron í hesum sambandi.

*Íbinding til talgildu Netmiðluna ella aðra tilsvarandi E-boks skipan*

Í sambandi við talgildan av samskiftinum við viðskiftarar eigur høvuðsskipanin hjá Almannastovuni at verða íbundin til Netmiðluna hjá Gjaldstovuni ella aðrar komandi E-boks skipanir í Føroyum. Endamálið við hesum er at kunna senda øll brøv og øll yvirlit til viðskiftafólk á elektroniskan hátt, og hervið fremja fyrisitingarligar sparingar.

Talan er um hetta samskifti:

1. Senda talgild skjøl til Netmiðluna ella aðra E-boks skipan.

Víst verður til nærri lýsingar frá viðkomandi veitara í hesum sambandi.

# 4.11. Ikki-funktionell krøv til skipanina

Ikki-funktionell krøv eru tey krøv, sum skulu lýsa, hvussu gott KT-skipanin skal fremja ella útinna funktiónirnar. Hetta verður eisini kallað fyri kvalitetskrøv. Víst kann í hesum sambandi verða á vegleiðing frá danska Økonomistyrelsen um talgilda umstiting (Udbud og indkøb af IT-systemer, april 2002).

Almannastovan hevur hesi ikki-funktionellu krøvini til KT-skipanina:

- Liðilig
- Brúkaravinarlig
- Ferð og "performance"
- Stabilitet
- Kapasitet
- Endurnýtsla
- Roynd

*Liðilig*
Skipanin skal vera liðilig, tvs., at hon lætt kann tillagast og integrerast við aðrar kendar standardskipanir. Skipanin skal mennast í einum umhvørvi soleiðis, at hon er løtt at víðarimenna og viðlíkahalda m.a. í sambandi við lógarbroytingar, satsbroytingar ella aðrar broytingar á almannaøkinum.

*Brúkaravinarlig*
Brúkarin skal hava lætt við at brúka skipanina og lætt við at læra at brúka skipanina. Brúkaramarkamótið skal byggja á *Windows icon terminologi*, sum er eitt kent brúkara *interface*. Í skipanini skal vera brúkaravegleiðing.

*Ferð og "performance"*
Svartíðir uppá fyrispurningar og dagføring av skermmyndum skulu vera góðar. Hetta er eisini galdandi fyri fyrispurningar niður á dátugrunnin og rapport generering. Svartíðirnar á webportalinum uppá fyrispurningar frá viðskiftafólkum og øðrum áhugabólkum skulu somuleiðis vera góðar. Talan skal verða um sekund og ikki minuttir í sambandi við t.d. rapport generering.

*Stabilitet*
Skipanin skal mennast á eitt støðugt grundarlag, og skal virka støðugt við høgum uppitíðum. Uppitíðin skal verða 99 %.

*Kapasitet*
Skipanin skal kunna handfara arbeiðið hjá 100-200 starvsfólkum í senn, og eisini megna at handfara í minsta lagi 1.000 on-line brúkarar samstundis.

*Endurnýtsla*

Dátur skulu í mest møguligan mun kunna endurnýtast millum ymisku modulini í skipanini. Hetta er millum annað fyri at tryggja, at dáturnar halda integritet og rættleika.

*Roynd*

Skipanin skal roynast í einum royndarumhvørvi, áðrenn hon verður sett í gongd á Almannastovuni.

Alment skal skipanin liva upp til ISO 2196 standardin í kravfestingini.

# 5. Skipanar- og rakstrarloysn og verkætlanartilgongd

Í hesum tátti verða tey viðurskifti, ið hava týdning fyri vali av skipan útgreinaði. Somuleiðis verður gjørd meting av, hvørjir valmøguleikar eru at velja í sambandi við rakstur undir skipanini. Sambært kommissoriinum skal metingin í báðum førum vísa á fleiri dømi um loysnir. Váðametingin síðst í hesum tátti lýsir somuleiðis viðurskifti, sum hava samband bæði við val av skipan og val av skipanarrakstri.

At enda verður uppskot til skipan av teirri víðari verkætlanini lýst saman við tíðarætlan fyri samlaðu menningartilgongdina.

## 5.1. Val av skipan

Tað er eitt avgerandi krav, at nýggja avgreiðslu- og kunningarskipanin fevnir um allar arbeiðsuppgávur, sum hoyra til høvuðsvirksemið hjá Almannastovuni. Hetta er eisini eitt krav, sum liggur í tí samskifti, sum Almannastovan hevur havt við politisku myndugleikarnar í sambandi við menning av nýggjari KT-skipan.

Skipanin skal hava eina journalskipan, sum lýkur vanligu krøvini til slíkar og eisini ásetingar í lógini um almenna fyrisiting (løgtingslóg nr. 132 frá 10.06.1993). Øll málsviðgerð, sum snýr seg um veitingar av onkrum slag, útgjaldingar og líknandi skulu lúka ásetingarnar í roknskaparkunngerðini (kunngerð nr. 114 frá 22.08.1996 um roknskaparverk landsins o. a.). Í triðja lagi skal skipanin veita ta KT-trygd, sum ásett er í løgtingslóg nr. 73 frá 08.05.2001 um viðgerð av persónsupplýsingum.

Nøkur høvuðskrøv til eina nýggja skipan eru:

1. Ein integrerað skipan, sum fevnir um allar arbeiðsuppgávur í sambandi við almannaveitingar hjá stovninum, og sum hevur nógvar funktionalitetir: skjalagoymslu, málsviðgerð, útgjald, inngjøld og innkrevjing. Skipanin fevnir eisini um undirskipanir so sum debitor- og kreditor-skipan, dátavøruhús, samskifti, kunning og intranet v.m.
2. Elektroniskar arbeiðsgongdir (workflow), sum stýra, máta og boða frá um málsviðgerðina.
3. At allar arbeiðsuppgávur í mest møguligan mun verða avgreiddar í sama markamóti, tvs. í eini portalloysn.

Skipanin skal vera fleksibul, og skjótt skal vera at stovna nýggj veitingar-sløg, tá ið tørvur er á tí.

Í sambandi við val av skipan og dømi um loysnir verða í kommissoriinum nevndir ymsir hættir at menna verandi VFS-skipan. Talan er m.a. um, at

verandi skipan verður ment við nýggjum pørtum, t.e., at nýggj skipan verður ment grundað á somu tøkni sum verandi skipan (VFS og ScanJour), ella at verandi VFS-skipan verður grundað á dagføring av ScanJour til Captia, og at tillagingar av verandi funktiónum til dagførdu journalskipanina verða gjørdar.

Annar møguleiki, ið nevndur verður í kommissoriinum, er ein nýggj serment skipan grundað á VFS og við egnari journalskipan ella grundað á aðra enn verandi journalskipan.

Ein triði møguleiki er ein nýggj serment/tillagað skipan grundað á Oracle standardkomponentar. Leggjast kann í hesum sambandi afturat, at tað kundi eisini verið talan um standardkomponentar hjá øðrum skipanum eitt nú Microsoft Dynamics, SAP CRM og Case management.

Í sambandi við útgreiningararbeiðið til val av skipan og dømi um loysnir hevur KT-bólkurin leitað fram og fingið kunning frá ymsum veitarum, herímillum Sam-teld og Formula.fo í Føroyum, og KMD, Microsoft og ScanJour í Danmark.

Niðanfyri verður mett um ymsar møguleikar. Í yvirlitinum verða vístir teir høvuðsvalmøguleikar, sum KT-bólkurin metir eru, tá ið talan er um val av skipan. KT-bólkurin skal gera vart við, at talan er um yvirskipaða viðgerð av valmøguleikum. KT-bólkurin hevur sostatt ikki viðgjørt allar tekniskar spurningar í smálutum, men hevur gjørt sær eina yvirlitsmynd í mun til krøv, veitara og skipanir v.m.

| | |
|---|---|
| **1. Ein skipan, ið byggir á verandi VFS-skipan/ScanJour** | Krav um, at forsorg, barnapengar og dagpengar verða avgreiddir í VFS (hetta er ikki galdandi í løtuni, men grunddesign til eina skipan, sum umsitur øll høvuðsveitingarsløgini, eru gjørd um so er, at VFS-skipanin verður útbygd ella dagførd til at fevna um nevndu øki eisini).<br><br>Loysnin krevur stóra nýmenning í dátavøruhús, workflow og portalskipan, og on-line samband til veitarar av dáta (t.d. Landsfólka-yvirlitið, Toll- og Skattstovuna, Apoteksverkið og Gjaldstovuna).<br><br>Útgjaldsskipan skal lagast til, so at øll útgjøld verða avgreidd gjøgnum Gjaldstovuna.<br><br>Skipanin skal lúka krøv, sum til eina |

| | |
|---|---|
| | og hvørja tíð eru galdandi fyri Búskaparskipan Landsins.<br><br>Skipanin skal tillagast, so hon lýkur nýggj krøv um KT-trygd, smb. Trygdarkunngerðina nr. 28 frá 27. februar 2003.<br><br>Neyðugt er, at sambandið millum ScanJour og VFS verður fult integrerað. |
| **2. Ein skipan, ið byggir á VFS, men aðra journalskipan** | Hendan loysnin víkir ikki nógv frá omanfyri standandi, og alt, sum er nevnt omanfyri, ger seg eisini galdandi fyri eina loysn sum hesa.<br><br>Talan kann vera um, at verandi ScanJour verður uppstiga, at farið verður yvir til nýggju journal-skipanina ScanJour Captia, ella at vald verður ein onnur journal- ella skjalahandfaringarskipan.<br><br>Spurningurin er eisini, um nøkur vissa er fyri, um nøktandi integratión fæst millum VFS í verandi líki og eina aðra journalskipan. |
| **3. Ein nýggj skipan, ið verður ment frá grundini** | Talan er her um at menna eina nýggja skipan (við støði í teimum royndum, sum eru gjørdar við VFS-skipanini/ScanJour).<br><br>Í hesum liggur, at alt, í øllum førum journal-, avgreiðslu- og útgjalds-skipan, verður ment (forritað) av nýggjum.<br><br>Talan kann verða um eina dátugrunnaloysn, ið byggir á standarskipanir (t.d. Oracle Dátugrunn, Datawarehouse, BI, Net, Workflow og Portal) í tann mun tað lættir um og er í samsvari við ætlaðu menningina av skipanini.<br><br>Talan verður helst um sera tætt |

| | |
|---|---|
| | veitaratilknýti bæði í menningar-fasuni og í sambandi við rakstur og umsiting av skipanini.<br><br>Skipanin skal lúka øll krøv um búskaparskipan, KT-trygd og integratión o.tl., sum nevnd eru í møguleika 1. |
| **4. Nýggj skipan, ið verður ment, men við mest møguligari nýtslu av standardskipanum og standardkomponentum** | Her er talan um at tillaga skipanar-uppskot og standarkomponentar til hvørt annað í eini heildarloysn.<br><br>Fyrimunirnir eru, at veitaratilknýtið verður avmarkað, men vansin er hinvegin, at onkrir av funktionali-tetunum, sum eru lýstir í hesi forkanning, mugu bendast, fyri at teir kunnu veitast við teimum valdu skipanarkomponentunum.<br><br>Møguleiki er eisini fyri, at aðrir hentleikar eru í hesum skipanum, sum KT-bólkurin ikki hevur roknað við frammanundan.<br><br>Skipanin skal lúka øll krøv um búskaparskipan, KT-trygd og integratión o.tl., sum nevnd eru í møguleika 1. |
| **5. Byggja á virkna skipan** | KT-bólkurin er kunnugur um heildarskipanir, sum eru í brúki í okkara grannalondum til at umsita almannaøkið og almannaveitingar, og sum hava allar teir funktionalitetir, ið lýstir eru í hesi forkanning. Dømi um hetta eru skipanir frá KMD.<br><br>Skipanin skal undir øllum umstøðum lúka øll krøv um búskaparskipan, KT-trygd og integratión o.tl., sum nevnd eru í møguleika 1, umframt at hon eisini skal kunna veita teir funktionalitetir, sum eru umrøddir í hesi forkanning. |

*Møguleiki 1 og 2*

Ein vansi við verandi VFS-skipan er, at hon er ikki fult integrerað við journalskipanina ScanJour, at hon fevnir ikki um allar arbeiðsuppgávur á Almannastovuni, og at hon sum ein serment skipan við tilknýti til aðra standardskipan er trupul at uppstiga. Eisini vantar henni fleksibilitet, t.d. tá ið skjótar tillagingar til nýtt lógar- og regluverk skulu gerast.

ScanJour er ein sonevnd EMSV-skipan (Elektronisk Máls- og SkjalaViðgerð). Talan er um eina standardskipan, sum á Almannastovuni verður brúkt saman við serskipanum í VFS-skipanini til m.a. umsiting av navnaupplýsingum hjá øllum viðskiftafólkum, umsiting av málsviðgerð, brúkaraumsiting og journalisering. Upplýsingar og skjøl í ScanJour verða brúktar at stuðla avgreiðsluni í serskipanum, t.d. útrokningar og ásetingar av veitingum. ScanJour inniheldur tó ikki samlaðu brúkarastýringina, men bert tann partin, sum umfatar ScanJour. VFS-skipanin hevur eina nógv útbygda og nútíðar umsiting av brúkarum, bæði hvat viðvíkir atgongdsstýring, atgongd til upplýsingar, loyniorðspolitikk og stýring av ábyrgdarøkjum (funktiónsskilnað). Tað er vert at hava í huga í sambandi við menning av eini komandi KT-skipan, at brúkarastýringin eigur ikki at verða spjadd, men liggja savnað og stýra í mun til ta samlaðu skipanina.

Sum kunnugt er bert ein serskipan í nýtslu í dag, nevniliga pensjónsskipanin. Sum skipan verður ScanJour brúkt til málstýring, uppgávustýring, skjalastýring, skanning og journalisering av skjølum, at umsita navnaupplýsingar og leiðslukunning.

ScanJour Captia er ein nýggjari útgáva enn tann, ið Almannastovan nýtir í dag. ScanJour Captia er bygd upp í trimum skipanarløgum við einum fult integreraðum web-markamóti. Skipanin hevur sambært ScanJour góðar møguleikar fyri integratión við aðrar KT-skipanir, t.d. allar Office-skipanir. Tað er eisini lætt umvegis web-markamót at fáa atgongd til ScanJour Captia bæði á arbeiðsplássinum ella á heimaarbeiðsplássum, umframt at til ber at arbeiða í øðrum markamóti. Skipanin nøktar øll vanlig trygdarkrøv um atgongd, goymslu og afturfinning av skjølum. Tekniski pallurin hjá ScanJour Captia er dátugrunnaservarin Oracle 9 RDBMS og applikatións-servarin Microsoft Windows 2003 Advanced Server.

ScanJour er undirveitari hjá Computer Sciences Corporation (CSC), sum er ein av trimum góðkendum veitarum av EMSV-skipanum til tað almenna í Danmark. Tað er tó umráðandi at gera greitt, at ScanJour sum so er ikki ein KT-skipan til avgreiðslu av almannaveitingum, men er ein týðandi stuðuls-skipan í slíkum skipanum.

Um valið av skipanarpalli til nýggja avgreiðslu- og kunningarskipan fellur á Oracle er sannlíkt, at endurnýtsla av nøkrum av verandi VFS-komponentum er møgulig, men neyðugt verður undir øllum umstøðum at fáa integrerað journal- og avgreiðslupartin í skipanini, og at menna aðrar týðandi komponentar, t.d. í sambandi við eina portalloysn, skipan av dátavøruhúsi v.m.

Fyrimunur við verandi VFS-skipan er, at talan er um eina kenda skipan, sum innan fyri sínar avmarkingar virkar væl. Við at velja verandi skipanarpall, t.d. at byggja skipanina á eina nýggjari útgávu av ScanJour/ScanJour Captia, verður helst eisini lættari at flyta skjøl og dáta og at konvertera dáta.

Tað er kortini ivasamt, um ein útbygging av verandi VFS-skipan uttan munandi tillaging og útbygging kann veita allar teir funktionalitetir, sum eru tiknir við í hesi forkanning sum krøv til eina nýggja skipan. Krav er m.a. um eitt høgt og fullfíggjað kunningarstøði í málsviðgerðini, sum ger, at málsviðgeri/sosialráðgevi/fulltrúi/leiðari í eini og somu arbeiðsgongd ella skermmynd skal hava atgongd til persóns- og familjuupplýsingar, atgongd til skjøl, dáta, seinastu avgreiðslur í teimum ymsu málunum hjá avvarðandi viðskiftafólki, øll aktiv og møguliga arkiverað mál, sum viðvíkja tí ávísa viðskiftafólkinum, øll útgjøld og veitingar, sum hoyra til ávísa málið, og atgongd til útgjaldsgrundarløgini fyri útgjøldum og veitingum.

Mett verður, at hetta kann ikki náast við víðarimenning av verandi KT-skipan uttan við stórum íløgum, samstundis sum trupult verður at menna nýggjar partar so sum dátuvøruhús, workflow og portalloysn í verandi skipan. Væntandi verður eisini trupult og kostnaðarmikið at umbyggja og víðarimenna verandi VFS-skipan, skal hon skal lúka omanfyri nevndu krøv um t.d. KT-trygd v.m.

KT-bólkurin skal viðmerkja, at Gjaldstovan hevur ongantíð góðkent VFS-skipanina sum búskaparskipan sambært roknskaparkunngerðini. Gjaldstovan hevur í skrivi dagfest 20. juni 2003 greitt boðað frá, at tað er “høpisleyst” at góðkenna skipanina so nógv ár eftir, at hon varð ment og tikin í nýtslu. Tí verður eisini mett ivasamt, um Gjaldstovan nú vil góðkenna eina víðarimenning av júst somu skipan, sum Gjaldstovan higartil ikki hevur vilja góðkent m.a. grundað á, at Gjaldstovan ikki varð tikin við í menningina av skipanini frá byrjan, og at loysnin tí uttan iva hevði verið ein onnur. At skipanin ikki hevur fingið góðkenning frá Gjaldstovuni kann tó ikki lastast veitaranum, men hevur hetta eftir øllum at døma ikki verið tikið við í nóg stóran mun í upprunaligu kravfestingini av nýggjari KT-skipan.

*Møguleiki 3*

Verður hinvegin valt at fara undir menning av nýggjari avgreiðslu- og kunningarskipan á verandi (Oracle) ella øðrum skipanarpalli (t.d. Microsoft Dynamics ella SAP CRM og Case Management), verður helst neyðugt at menna teir flestu ella allar skipanarkomponentarnar av nýggjum, um hesir ikki finnast sum standard-komponentar.

Tað verður munandi lættari at integrera allar skipanarpartarnar, t.d. journal- og avgreiðslupartin, í eini nýggjari skipan. Nógv talar eisini fyri, at ein slík skipan verður lutfalsliga bíligari í rakstri, og ein nýggj skipan kann eisini betri styðja uppundir effektivari mannagongdir (workflow).

Ein fyrimunur við eini nýggjari skipan er, at hon er dagførd (framtíðar-tryggjað), hvat funktionaliteti viðvíkur, t.d., at hon gagnnýtir webtøkni til markamót, og gevur góðar møguleikar fyri dátaflutningi, interaktiviteti og samskifti við viðskiftafólk, aðrar stovnar og samstarvspartnarar.

Hugsandi er, at hendan loysnin er tann mest optimala, hvat funktionaliteti viðvíkur, men verður ivaleyst sera dýr at menna. Hetta er eisini ein tilgongd, sum stórur váði er knýttur at.

Ein týðandi treyt fyri vali av eini loysn sum hesari er tó, at hon verður tøkniliga stuðlað í Føroyum.

*Møguleiki 4*
Ein møguleiki í hesum sambandi er at menna eina nýggja skipan og sovítt gjørligt brúka standardkomponentar antin á t.d. Oracle ella Microsoft-skipanarpalli ella SAP CRM og Case Management, heldur enn at menna alt sjálvur frá grundini.

Hesin møguleiki er tískil ein tillagað tilgongd, sum í ávísan mun kann minna um møguleika 3.

Um henda møguleika er at siga, at ein vansi við nýmenning og tillaging, um hetta verður gjørt við standardkomponentum, kann verða, at trupult er at fáa til vega allar funktionalitetir, og at skipanin í ávísan mun má lagast til funktionalitetin hjá komponentunum. Kortini er helst talan um eina lutfalsliga bíligari loysn, sum er skjót at fáa í gongd. Hetta er eisini ein tilgongd, har váðin er munandi minni enn um øll skipanin verður ment frá grundini.

Fyrimunir við standardkomponentum eru, at teir eru royndir, at lítlar útreiðslur eru til menning, og møguleikarnir at fáa support og uppstigingar eru góðir. Hesir komponentar eru ofta lættir at integrera við aðrar skipanir, og ein tillaging fer hartil uttan iva at verða bíligari, enn at fara undir at menna eina nýggja skipan frá grundini.

*Møguleiki 5*
Uppaftur annar møguleiki er at fáa til vega eina heildarskipan, sum er liðugt ment, virkin og undir støðugari víðarimenning, og sum í størri ella minni mun er ætlað ella væl egnað til umsiting í almannaverkinum í okkara grannalondum. Spurningurin er harnæst, um ein slík skipan kann takast í nýtslu á Almannastovuni antin í verandi líki ella við størri ella minni tillagingum.

Dømi um slíka lidna heildarloysn eru skipanir, sum KMD hevur ment serliga ætlað til almannaøkið. Talan er um fult integreraðar skipanir og fakskipanir, sum KT-bólkurin metir nøkta allan tørvin hjá Almannastovuni sambært hesi forkanning. Allar skipanir eru væl royndar, verða støðugt mentar og tillagaðar tørvinum, og eingin ivi er heldur um, at KMD hevur allan neyðugan førleika og kapasitet annars til at lyfta uppgávuna.

Verður ein slík heildarloysn vald, verður mælt til, at krav verður sett fram um ávíst tilknýti ella samstarv við føroyskan veitara.

***Tilmæli***
KT-bólkurin metir, at tað serliga eru tveir valmøguleikar, sum best kunnu nøkta samlaða tørvin á KT-skipanum sambært hesi forkanning.

Annar møguleikin er at menna eina nýggja høvuðsskipan, sum so vítt gjørligt byggir á standardkomponentar (møguleiki 4). Hin er at byggja á eina lidna heildarskipan, sum er ment serliga ætlað umsiting í almannaverkinum og av almannaveitingum (møguleiki 5). Ítøkiligt dømi um slíkt val er tann heildarloysn, sum KMD veitir. Tørvur verður eyðsæð á ávísum tillaginum til føroysk viðurskifti umframt tilknýti til føroyskan veitara.

Fyrimunirnir við hesum báðum møguleikunum eru eitt nú:
- Virknar og vælroyndar skipanir, sum eru tøkniliga og funktionelt sera framkomnar.
- Veitarin hevur sterka menningarkompetansu og tryggjar áhaldandi víðarimenning og uppstiging av skipanunum.
- Full integratión millum skipanirnar.

Týðandi fyrimunur við KMD-skipanunum er harafturat, at tær hava viðgerð og avgreiðslu av almannaveitingum sum ítøkiligt kjarnuvirksemisøki. Sum høvuðsveitari av skipanum til almannaøkið er KMD ein sera kompetentur sosialfakligur KT-mennari, sum við teirra stóru framleiðsluorku víðarimennir og nýmennir skipanir samsvarandi broyttum fortreytum og lóggávum á almannaøkinum.

KT-bólkurin metir, eftir at hava kunnað seg við ymsar skipanir, standardskipanir, veitarar og møguleikar annars, at skipanirnar hjá KMD liggja tættast uppat tørvinum á nýggjari KT-skipan til Almannastovuna. Skipanarligu loysnirnar hjá KMD eru fult integreraðar eins og tær eru tøkniliga og funktionelt sera framkomnar. Mett verður, at tær nøkta alla yvirskipaða funktiónstørvin hjá Almannastovuni, so sum hann er lýstur í hesi forkanning.

Tað er trupult frammanundan at siga, hvat val av skipan fer at hava við sær kostnaðarliga. KT-bólkurin hevur ikki gjørt neyvari kanningar hesum viðvíkjandi, sí eisini tátt 5.4. Kostnaður verður her eitt samanspæl av vali av skipan, skipanarpalli, krøvum um funktionalitet, í hvønn mun standard-komponentar verða brúktir ella um alt verður ment frá grundini, krøv um tillaging, hvussu nógv analysuarbeiði, design, forritan v.m. skal gerast, hvussu einføld skipanin verður at brúka o.s.fr. Talan verður altíð um at viga fyrimunir og vansar sæð yvir ávíst tíðarskeið.

Tann loysnin, antin at brúka eina frammanundan menta skipan (valmøguleika 5) ella í mest møguligan mun brúka standardkomponentar

ella standardskipanir (valmøguleiki 4), ger, at skipanin helst verður lutfalsliga bíligari, men kann gera, at hon kanska fer at hava minni fleksibilitet við sær, tvs. størri bindingar til valda skipan (system), men samstundis minni binding til ávísan veitara.

## 5.2. Val av rakstrarumhvørvi

Rakstrarumhvørvið hevur í sjálvum sær lítla og onga ávirkan á ítøkiligu nýtsluna av fakskipanini, men kann fáa stóran týdning fyri KT-umsitingina á stovninum sum heild. Kommissorium vísir á fýra ymisk dømi um rakstrarloysnir. Niðanfyri verða tríggjar høvuðsrakstrarloysnir lýstar nærri.

1) *Egin rakstur við egnari KT-deild á Almannastovuni*

Alt KT-undirstøðukervið verður umsitið innanhýsis og fakskipanin verður ment av veitarum, men umsitin og rikin innanhýsis.

*Treytir*
Stovnurin skal hava KT-fólk við førleika til at umsita bæði KT-skipanir og fakskipanir. Hetta krevur støðuga førleikamenning av KT-deildini, sum harumframt helst skal hava størri starvsfólkaorku enn í dag. Neyðugt verður við fólki við førleika á mennarastøði til víðarimenning av fakskipan, umframt KT-administrator, netumsitara og evt. superbrúkarar.

Neyðugt verður við serstøkum servarahøli og útgerð til tess, sum skal lúka øll trygdarkrøv.

*Fyrimunir*
Rakstrarumhvørvið verður óheft av uttanhýsisveitarum, sum kann hava við sær rakstrarkostnaðarligar fyrimunir. Av tí at ongin beinleiðis binding er til veitara er heldur ongin vandi fyri uppsøgn av tænastusáttmálum. Vitanin og víðarimenningin av skipanini er inni á stovninum, og gevur hetta ein hægri stabilitet. Ábyrgdin og menningar-motivini liggja á rætta stað, og vil tað hava við sær eitt betri commitment fyri skipanini inni á stovninum. Skipanarumsiting, serliga av fakskipanini, skuldi verið einfaldari, tá ið skipanin verður umsitin av fólki, sum alla tíðina er á stovninum.

*Vansar*
Uppbygd servitan kann fara út av húsinum, tá starvsfólk fara úr starvi. Tað er kostnaðarmikið at læra nýggj KT-fólk upp til fakskipanina umframt at førleikamenna KT-fólk sum heild. KT-fólkini á Almannastovuni gerast serfrøðingar í fakskipanini hjá Almannastovuni, og hóast hetta í sjálvum sær er gott, so kann tað gera bæði skipanina og Almannastovuna sárbæra, um vitanin og serførleikin er tengdur at ávísum persónum.

Eingin rakstrarsáttmáli verður við veitara av fakskipan, tá skipanin er liðug. Førleikasamansetingin á KT-deildini kann hava við sær tørv á at keypa

kompetansu uttanhýsis, sum ger, at eingin rakstrarkostnaðarligur vinningur verða, um øll KT-umsiting og allur rakstur liggur innanhýsis.

2) *Partur av umsitingini liggur innanhýsis og partur liggur uttanhýsis*

Skipanin verður ment av veitara, og raksturin verður lagdur partvís innanhýsis og uttanhýsis. Dømi um hetta kann vera (ikki úttømandi):

1. hosting liggur uttanhýsis, umsiting av fakskipanum innanhýsis
2. hosting liggur uttanhýsis, umsiting av bæði KT-skipanum og fakskipanum liggur innanhýsis
3. hosting liggur innanhýsis, umsiting av fakskipanum uttanhýsis.

*Treytir*
Neyðugt er við góðari skipan á Almannastovuni serliga í mun til veitararnar. Krevur gott og ábyrgdarfult samskifti millum veitarar og Almannastovuna, uppgávubýtið skal vera greitt og gjøgnumskygt, og tænastusáttmálar (SLA) skulu gerast, sum skulu fylgjast upp. Stovnurin skal hava førleikar at geva veitarunum aktivt mótspæl til tess at tryggja javnan og stabilan rakstur, víðarimenning av skipan og stýring av trygdini í skipanini. Verandi støða á Almannastovuni er ein skipan, sum partvís fevnir um dømi 1 og 2.

*Fyrimunir*
Stovnurin hevur ella uppbyggir vitan og førleikar í tí føri, har fakskipanin liggur innanhýsis. Skipanarumsiting, serliga av fakskipanini skuldi verið einfaldari, tá ið skipanin verður umsitin av fólki, sum alla tíðina er á stovninum.

Stovnurin hevur størri handlikraft yvirfyri veitarum. Hosting uttanhýsis gevur størri rakstrartrygd, tí veitarin hevur bundið seg til tænastustøðið sambært sáttmála, og veitarin er væntandi serfrøðingur á økinum.

*Vansar*
Vantandi gjøgnumskygni í sáttmálum millum Almannastovuna og veitarar kann hava við sær ógreitt ábyrdarbýti, tá feilir henda, serliga tá fleiri veitarar eru, og vandi er fyri longum og tungum mannagongdum. Hetta er tó í ávísan mun treytað av, hvat slag av útveiting, stovnurin velur.

*3) Heildarloysn, tvs. fulla útveiting av øllum rakstraruppgávum til veitara*

Ein heildarveitari tekur sær av menning, umsiting og hosting av KT-kervi og fakskipan. Almannastovan ella Almanna- og heilsumálaráðið kunnu hava valt veitaran.

*Treytir*
Veitari skal kunna veita trygd fyri støðugari og munadyggari tænastu. Veitari skal hava og skal avseta neyðuga orku til menning og umsiting av fakskipanini. Neyðugt er við langtíðarsáttmálum við veitara fyri í minsta lagi 5 ár í senn. Álit skal vera til staðar í mun til førleikar, support v.m.

Veitarasáttmálin skal vera nágreiniliga orðaður og gjøgnumskygdur fyri báðar partar. Til fakskipanina er alneyðugt at hava fastar persónar knýttar, sum kenna fakskipanina, og sum kunnu tryggja, at fakskipanin virkar til fulnar.

*Fyrimunir*
Menning, umsiting og hosting liggur á sama stað. Tilknýtið millum Almannastovuna og veitara verður tætt, og ábyrgdarbýtið millum partarnar greitt. Krevur minni orku til samskipan viðv. menning, broyting v.m., samskiftið verður einklari. Rakstrarútreiðslurnar eru kendar, tí tær í stóran mun eru sáttmálabundnar útreiðslur.

*Vansar*
Bindingin til heildarveitaran verður sera stór og skiftiskostnaðurin kann gerast ovurstórur. Veitarin kann skifta eigara, missa kompetansuna við frágongd av fólki, sum hava serkunnleika til fakskipanina, ella fara á húsagang. Vandi er fyri, at tilknýtið til veitaran gerst ein váði, um veitarin gerst illoyalur ella ikki livir upp til sáttmálan. Heildarveitarin hevur alla kjarnukompotansu, og um ongin innanhýsis servitan er á KT-økinum, kann tað verða trupult at geva veitara neyðuga mótspælið.

*Meting um rakstrarútreiðslur*

Tað er trupult at geva ítøkiliga meting av, um samlaðu rakstrarútreiðslurnar broytast í mun til ta einstøku rakstrarloysnina. Tað er tó givið, at útreiðslurnar í mun til val av rakstrarloysn verða býttar ymiskt millum stovn og veitara/-r.

Almannastovan hevur í dag umleið 3,3 mkr. í rakstrarútreiðslum til KT íroknað lønir um árið. Væntast má, at um verandi rakstrarloysn, har hosting og fakskipan liggur uttanhýsis hjá ymiskum veitarum, verður varðveitt, verður talan um líknandi upphædd eisini í framtíðini. Her má tó takast hædd fyri, at rakstrarútreiðslurnar mest sannlíkt fara at økjast, um funktionaliteturin í skipani eisini økist, og treytað av vali av skipan. Val av skipan hevur eisini ávirkan á, hvussu rakstrarloysnin ítøkiliga kann skipast serstakliga í sambandi við val av veitara, víðarimenning av skipan og kostnaðin av víðarimenning. KT-bólkurin hevur ikki gjørt nærri útrokningar hesum viðvíkjandi.

***Tilmæli***
KT-bólkurin mælir til, at gjørd verður ein heildarrakstrarloysn við greiðum ábyrgdarbýti millum uttanhýsis veitara/-r og stovnin. Henda loysn skal fevna um menning, hýsing og víðarimenning av fakskipan og møguliga eisini veiting og umsiting av undirstøðukervi.

Til tess at avmarka bindingina til ávísan veitara og tryggja, at ábyrgdin fyri dáta liggur á stovninum, og at førleikar eru á stovninum til at samvirka við veitara/-r, er tað av alstórum týdningi, at umsitingin og gagnnýtingin av fakskipanini í mest møguligan mun verður á Almannastovuni. Umsiting av

fakskipan vil her siga umsiting av brúkarum, umsiting av skráum og satsskráum, upplæring av brúkarum, gagnnýting av dáta í skipanini (hagtøl) og KT-trygdararbeiði.

Ein loysn sum henda krevur, at Almannastovan hevur eitt høgt KT-førleikastøði, sum fyrst og fremst miðar móti at gagnnýta allar tættirnar í nýggju fakskipanini fult út.

## 5.3. Verkætlanarlýsing og tíðarætlan

KT-verkætlanin 2006-2008 á Almannastovuni verður sett í verk eftir, at forkanning av verkætlanini er gjørd, og uppskot til verklagslóg um KT-íløgur hjá Almannastovuni fyri tíðarskeiðið 2006-2008 er lagt fyri løgtingið og samtykt, antin samsvarandi ásetingunum í forkanningini og verklagslógaruppskotinum ella í øðrum broyttum líki.

Tó at verkætlanin fevnir um at menna eina KT-skipan, sum fyrst og fremst er ætlað til at nøkta allan virksemistørvin hjá Almannastovuni, so er sannroynd, at verkætlanin fevnir um bæði stór og týdningarmikil áhugamál hjá politiska myndugleikanum, fleiri stjórnarráðum, tilhoyrandi stovnum og myndugleikum, veitarum v.m. Gott samstarv og samskifti millum hesar er av avgerandi týdningi fyri, um og hvussu øll verkætlanin og menningartilgongdin eydnast.

Verður verklagslógin um KT-íløgur hjá Almannastovuni fyri tíðarskeiðið 2006-2008 ella møguliga annað tíðarskeið samtykt samsvarandi ásetingunum í hesi forkanningini, so verður næsta stigið at fáa gjørt sáttmálar og avtalur við veitarar av KT-útbúnaði, KT-tænastum, ritbúnaði og KT-skipanarmenning. Talan kann eisini vera at bjóða hesar partarnar av verkætlanini út í útboði.

Neyðugt verður eisini at skipa alla verkætlanina bæði viðvíkjandi bygnaði (verkætlanarleiðsla og -skipan) og ítøkiliga verkætlanar- og menningararbeiðinum.

*Verkætlanarskipan*
KT-bólkurin metir av alstórum týdningi, at verkætlanin í øllum lutum og í allari menningartilgongdini verður væl og virðiliga kjølfest á Almannastovuni.

Almannastovan skal somuleiðis tryggja alt neyðuga samskiftið og samstarvið millum stovnin, Almanna- og heilsumálaráðið og aðrar viðkomandi partar í sambandi við alla verkætlanina.

Almannastovan eins væl og Almanna- og heilsumálaráðið mugu gera sær greitt, at ein KT-verkætlan av hesi stødd fer í fyrsta lagi at fáa ávirkan á stovnin og krevja nógv av bæði leiðslu og starvsfólkum. Arbeiðsgongdir

mugu leggjast um, og avgreiðsla og umsitingin verða effektiviserað. Møguleiki verður fyri at taka upp nýggjar arbeiðsuppgávur ella gera meira við uppgávur, sum í dag av onkrum ávum meir ella minni liggja á láni. Starvsfólk mugu fyrireika seg til nýggj førleikakrøv.

Í øðrum lagi fer KT-verkætlanin eisini at krevja beinleiðis luttøku av flest øllum starvsfólkum í menningartilgongdini, og leiðslan má tryggja sær, at hendan luttøka gerst møgulig.

Í triðja lagi má stovnurin gera eina skilagóða verkætlanartilgongd (projektplan), um gott úrslit skal spyrjast burturúr. Høvuðstættirnir í verkætlanartilgongdini eru:

- Tíðaráseting (herundir at vísa á vegamót í tilgongdini)
- Meting um tørv á tilfeingi (fólki, kunnleika og útbúnaði)
- Nároyndir av skipanini ella pørtum av henni
- Váðameting av verkætlanini.

Ein skipanarmenning fer fram í hesi raðfylgju:

1. Tørvslýsing
2. Kravfesting
3. Design
4. Konstruktión
5. Dokumentatión
6. Implementering
7. Royndarkoyring
8. Eftirmeting og lating
9. Viðlíkahald og víðarimenning av skipanini (hetta er í livitíðini eftir lating).

KT-bólkurin mælir til, at verkætlanarleiðslan verður skipað á henda hátt, sí myndina niðanfyri.

*Mynd 22: Verkætlanarleiðsla*




*Stýrisbólkur*
Til tess at tryggja verkætlanini gott kjølfesti á stovninum verður mælt til, at stýrisbólkur verður settur á Almannastovuni at hava eftirlit við verkætlanartilgongdini.

Av tí at KT-strategibólkur longu er á Almannastovuni, er tað natúrligt, at hesin bólkur fekk álagt hesa uppgávu. Stýrisbólkurin skal tryggja, at starvsfólk á Almannastovuni taka undir við skipanarmenningini og fáa góðar umstøður at luttaka í menningini, tá boð eru eftir teimum.

*Verkætlanarleiðari*
Verkætlanarleiðari eigur at verða settur á Almannastovuni burturav til verkætlanina í allari menningartilgongdini. Verkætlanarleiðarin hevur ábyrgd fyri verkætlanini sum heild og øllum samskifti við heildarveitara. Talan er um fíggjarliga og aðra leiðsluábyrgd, góðskustýring, at KT-skipanin ella partar av henni verða latnir til ásetta tíð, halda ásettan kostnað og lúka krøvini, sum ásett eru í kravfestingini.

*Verkætlanarleiðarabólkur*
Hesin bólkurin hevur ábyrgd av at tryggja, at allir tættirnir í skipanarmenningini verða framdir, og tryggja, at samband er millum virksemið hjá teimum trimum niðanfyri nevndu verkætlanarbólkunum.

Til at fremja verkætlanina í verki verða settir verkætlanarbólkar at taka sær av ymsum liðum í skipanarmenningini.

Mælt verður til at seta hesar verkætlanarbólkar:

*Verkætlanarbólkur 1*
Hesin bólkurin tekur sær av at gera tørvslýsing og kravfesting av skipanini.

*Tørvslýsingin* er fyrst og fremst at savna inn vitan um stovns- og brúkaratørv, lýsa áhugamálini hjá viðskiftafólkum og samstarvspartnarum í KT-skipanini og lýsa funktionellan tørv.

*Kravfesting* av skipan er fyrst og fremst at gera yvirlit yvir øll funktionell krøv og ikki-funktionell krøv. Kravfestingin skal lýsa skipanararkitektur og undirstøðukervi og tørv á KT-útbúnaði og ritvøru. KT-trygdarspurningar eru týðandi krøv at hava við í kravfestingini.

Í triðja lagi skal bólkurin lýsa og nágreina *mannagongdir*.

Limir í bólkinum eru starvsfólk á Almannastovuni, samstarvsfelagar, umboð fyri veitarar v.m.

Bólkurin er undir leiðslu av bólkaleiðara og skrivara.

*Verkætlanarbólkur 2*
Hesin bólkurin tekur sær av at standa fyri skipanarmenning: design, konstruktión og dokumentatión av skipan.

*Design* er m.a. dátabasudesign, at gera ER-diagrammir, at lýsa mannagongdir í dátaflowdiagrammum, at menna webdesign og aðrar skipanarkomponentar.

Ásetan av brúkarasløgum, bæði innanhýsis og uttanhýsis brúkarar av portalinum, er ein partur av design.

*Konstruktión* er forritan og uppsetan av servarum, hardware og netverki, so at skipanin er virkið og veruligt arbeiðsamboð.

*Dokumentatión* er nágreinilig lýsing av allari skipani og brúkaravegleiðingar til allar partar av skipanini. On-line vegleiðingar eiga at vera til allar skipanarfunktiónir, og lýsingar av mannagongdum eiga at vera tøkar og lættliga atkomiligar í skipanini.

Limir í bólkinum eru KT-menningarstarvsfólk, starvsfólk á Almanna-stovuni, samstarvsfelagar og umboð fyri veitarar v.m.

Bólkurin er undir leiðslu av bólkaleiðara og skrivara.

Ein høvuðsuppgáva hjá bólkaleiðsluni verður at stýra sambandinum við veitarar.

*Verkætlanarbólkur 3*
Hesin bólkurin tekur sær av at gera at standa fyri royndarkoyringum, at gera metingar av støðuni á vegamótum í skipanarmenningini, verkseting av skipan, og eftirmeting og góðkenning av lating.

Bólkurin stendur fyri nároyndum av skipan, brúkaraupplæring, skipan av KT-umsiting og KT-uppgávum, ger av standardskrivum, ger av sáttmálum við tænastuveitarar og avtalur við samstarvspartnarar, og góðkenning av lating av teimum ymsu pørtunum í skipanini.

Bólkurin ger eisini ætlan um viðlíkahald og víðarimenning av skipanini í livitíðini hjá henni.

Limir í bólkinum eru KT-starvsfólk, starvsfólk á Almannastovuni, samstarvsfelagar og umboð fyri veitarar.

Bólkurin er undir leiðslu av bólkaleiðara og skrivara.

*Tíðarætlan*
Hjálagda Gantt-kort vísir stigini í eini trý ára KT-skipanarmenningarætlan. Kortið vísir raðfylgjuna, talið og longdina av teimum ymsu aktivitetunum í tilgongdini. Longdin er ein meting alt eftir, hvussu stórir í vavi teir ymsu aktivitetirnir verða mettir at vera.

Nevnast kann, at í hesi uppseting er roknað við tilsamans 3.067 arbeiðsdøgum. Um vit rokna við, at í miðal 1½ starvsfólk er knýtt at hvørjum arbeiðsdegi, verður samlaða arbeiðsdagatalið saman við arbeiðstíð til verkætlanarleiðslu ikki undir 5.000 arbeiðsdagar íalt. Gerast skal vart við, at her er tó talan um eina leysliga meting.

Hóast talan bara kann verða um eina meting, so vísir kortið eisini tørvin á eini neyvari stýring, um verkætlanin skal eydnast.

*Mynd 23: Gantt-kort - tíðarætlan*

| Nr | Stig | Byrjan | Endi | Longd |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Tørvslýsing | 02-01-2006 | 28-04-2006 | 85d |
| 2 | Kravfesting | 01-03-2006 | 30-06-2006 | 88d |
| 3 | Design av dátagrunni / avgreiðsluskipan | 03-07-2006 | 29-12-2006 | 130d |
| 4 | Design av debitor- og kreditorskipan | 02-10-2006 | 29-12-2006 | 65d |
| 5 | Design av dátavøruhúsi | 03-07-2006 | 29-12-2006 | 130d |
| 6 | Design av mál- og avriksst.skipan | 03-07-2006 | 29-12-2006 | 130d |
| 7 | Design av web-markamóti til avgreiðsluskipan | 02-10-2006 | 31-01-2007 | 88d |
| 8 | Design av EDI-skipanum | 02-10-2006 | 31-01-2007 | 88d |
| 9 | Konstruktión av avgreiðsluskipan | 01-11-2006 | 31-05-2007 | 152d |
| 10 | Dokumentatión av avgreiðsluskipan | 01-11-2006 | 31-05-2007 | 152d |
| 11 | Konstruktión av EDI-skipanum | 01-01-2007 | 31-05-2007 | 109d |
| 12 | Dokumentatión av EDI-skipanum | 01-01-2007 | 31-05-2007 | 109d |
| 13 | Konstruktión av web-markamóti til avgreiðsluskipan | 01-02-2007 | 31-05-2007 | 86d |
| 14 | Dokumentatión av web-markamóti til avgreiðsluskipan | 01-02-2007 | 31-05-2007 | 86d |
| 15 | Implementring av avgreiðsluskipan, EDI-skipanum og web-markamóti til avgreiðsluskipan | 02-04-2007 | 31-12-2007 | 196d |
| 16 | Royndarkoyring av avgreiðsluskipan, EDI-skipanum og web-markamóti | 01-10-2007 | 31-12-2007 | 66d |
| 17 | Eftirmeting og lating av avgreiðsluskipan, EDI-skipanum og web-markamóti | 03-12-2007 | 31-12-2007 | 21d |
| 18 | Konstruktión av mál- og avreksst.skipan | 01-03-2007 | 31-07-2007 | 109d |
| 19 | Dokumentatión av mál- og avreksst.skipan | 01-03-2007 | 31-07-2007 | 109d |
| 20 | Implementering av mál- og avreksst.skipan | 01-05-2007 | 31-12-2007 | 175d |
| 21 | Royndarkoyring av mál- og avreksst.skipan | 01-11-2007 | 31-12-2007 | 43d |
| 22 | Eftirmeting og lating av mál- og avreksst.skipan | 03-12-2007 | 31-12-2007 | 21d |
| 23 | Konstruktión av dátavøruhúsi | 01-11-2007 | 01-04-2008 | 109d |
| 24 | Deding av portali | 01-11-2007 | 01-04-2008 | 109d |
| 25 | Implementering av dátavøruhúsi | 02-04-2008 | 31-12-2008 | 196d |
| 26 | Royndarkoyring av dátavøruhúsi | 01-09-2008 | 28-11-2008 | 65d |
| 27 | Eftirmeting og lating av dátavøruhúsi | 01-12-2008 | 31-12-2008 | 23d |
| 28 | Implementering av portali | 02-04-2008 | 31-12-2008 | 196d |
| 29 | Royndarkoyring av portali | 01-09-2008 | 28-11-2008 | 65d |
| 30 | Eftermeting og lating av portali | 01-12-2008 | 31-12-2008 | 23d |
| 31 | Eftirmerting og endi av verkætlan | 03-11-2008 | 31-12-2008 | 43d |



# 5.4. Kostnaðarmeting

Sambært kommissorium skal gerast ein kostnaðarmeting við hjálp uttanífrá. Kostnaðarmetingin skal vera grundarlag fyri teimum upphæddum, sum skulu játtast í verklagslógini. Kostnaðarmetingin skal m.a. verða útgreinað á íløgu-, íverksetingar- og rakstrarkostnaðir fyri hvørja einstaka veiting frá høvuðsveitara og øðrum veitara, og kostnaðir fyri høvuðsskipan, markamót og serfunkur í hvørjum virkisøki sær.

Kommissorium tilskilar, at tað skal avtalast nærri við stýrisbólkin, hvussu kostnaðarmetingin skal fremjast í verki. KT-bólkurin hevur í hesum sambandi fingið at vita, at kostnaðarmetingin skal fremjast at øðrum enn KT-bólkinum.

Tískil er eingin kostnaðarmetnig í hesi forkanning, sum KT-bólkurin hevur staðið fyri, men verður forkanningin ivaleyst grundarlag fyri teimum kostnaðarmetingum, sum skulu gerast í sambandi við ítøkiliga viðgerðina av verklagslógaruppskoti.

KT-bólkurin mælir til, at høvuðsskipanin sum heild – so sum hon er lýst í hesi forkanning – verður boðin út til veitarar bæði í Føroyum og uttanlands. Á hendan hátt verður tað í veruleikanum hitt besta tilboðið, ið verður valt, sum ásetur kostnaðin, og at verklagslógin og evt. aðrar raðfestingar taka støði í hesum.

# 5.5. Váðameting

Váðameting eigur at verða gjørd av øllum størri KT-verkætlanum. Váði knýtir seg at:

1. Hvussu kompleks ein verkætlan er
2. Hvussu væl hon er lýst
3. Hvussu umfatandi hon er, t.d., hvussu stór ella kostnaðarmikil hon er, um hon bara viðvíkur einum minni parti ella hevur týdning fyri meginpartin ella alt virksemið hjá stovninum v.m.

Verandi verkætlan, sum er lýst í hesi forkanning, má sigast at vera bæði kompleks og umfatandi.

Kompleksitetur er m.a. treytaður av, hvussu nógvum lutum/skipanarpørtum, ið KT-skipanin er sett saman av. Kompleksiteturin er eisini treytaður av, hvussu allir hesir lutir fáast at samvirka eftir eini ásettari ætlan. Her kann eisini vera talan um krøv um integratión av standardskipanum og skipanarpørtum, umframt krøv til fleksibilitet (tvs., at skipanin ikki er ov uppgávuspesifikk) – krøv, sum kunnu gera eina skipan kompleksa.

Krøv til lýsing av skipanini eru, at í hvussu er greið tørv- og kravfesting er gjørt til verkætlanina.

Ein háttur at avmarka avleiðingarnar av møguligum vandum í eini stórari verkætlan er at lata menningina fara fram í stigum (fasum), soleiðis at fult nýtsluvirði fæst burtur úr hvørjum stigi sohvørt tað er avgreitt, og úr tí peningi, sum tá er goldin. Hetta avmarkar stýringstørvin munandi. Kompleksitetur kann í stóran mun avmarkast strategiskt við góðari verkætlanarleiðslu, og við at brúka ráðgevarar, sum hava viðkomandi fakligar royndir og vitan.

Í hesi váðameting eru vandarnir bólkaðir eftir høvuðsøkjum, tvs. vandi mettur í mun til:

- Verkætlan
- Stovnsskipan
- KT-skipan
- Áhugamál/ -bólkar.

Í eini váðameting hevur tað týdning at kunna vísa á ávísar ítøkiligar vandar, sum vanliga vísa seg í KT-menning, og á vandar, sum eru serligir fyri ta ítøkiligu KT-verkætlanina.

Í øðrum lagi eiga vandarnir at verða mettir í mun til tann týdning teir hava, og sannlíkið fyri og avleiðingar av, at vandar veruliga henda. Avleiðingar kunnu m.a. vera, at tað verður longri enn ætlað at fáa verkætlanina at virka, at okkurt ikki virkar, sum ætlað (funktionaliteturin), og at verkætlanin verður dýrari enn upprunaliga mett.

Í triðja lagi er avgerandi at gera sær tankar um, hvussu tað í eini komandi verkætlan skal bera til av leggja upp fyri og fyribyrgja ella avmarka teir vandar, sum hava týdning fyri realiseringina av KT-verkætlanini. Hetta er ein avgerandi partur av verkætlanarleiðsluni. Í hesum sambandi hevur tað týdning, at veitari, stovnur og luttakarar í verkætlanini vita og eru samd um, hvørji eydnukrøvini til skipanina eru.

Niðanfyri er sett upp yvirlit yvir vandar, ið kunnu væntast at ávirka realiseringina av eini KT-verkætlan sum hana, sum er lýst í hesi forkanning.

Sum vegleiðing kann nevnast, at átøk og greiðar avgerðir eiga at verða tiknar, tá ið talan er um vandastig 1-2, meðan vert er alla tíðina at geva vandastigum 3-5 gætur.

| Verkætlan | Vandastig | | | | | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vandaslag | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | |
| At verkætlanar-leiðslan er ikki nóg góð. | x | | | | | Vánalig verkætlanarleiðsla kann gera, at KT-skipanin ikki verður latin til tíðina, at ikki allir funktionalitetir eru virknir í skipanini, og at menningin av skipanini verður dýrari enn ætlað. |
| At tann samlaða latingin er ikki nóg væl lýst til, at til ber at staðfesta, at øll latingin er farin fram. | | x | | | | Kann serliga stava frá, at týðandi tørvir eru ikki nóg væl ella als ikki lýstir í krav-festingini ella útboðstilfari. |
| At veitari tøkniliga, førleikaliga ella fíggjarliga megnar ikki uppgávuna. | x | | | | | Hesin vandi kann fáa stórar avleiðingar. Vandin kann tó minkast við at velja kendan veitara og meta um veitaraførleikan, áðrenn sáttmáli verður gjørdur. Ein háttur at avmarka vandan er at lata skipanarmenningina fara fram í stigum. |
| At neyðugt er at brúka fleiri veitarar. | | | x | | | Vandin við hesum er, at samskiftið millum veitarar ikki er optimalt, at ein veitari kann seinka allari gongdini, at ringt verður at staðfesta ábyrgd fyri seinkingum og feilum.<br><br>Mælt verður til at avmarka hendan vandan við at brúka ein sterkan høvuðsveitara. |
| At ósamsvar er millum játtan og skipanarkrøv til KT-ætlanina. | | x | | | | Kann í versta føri gera, at ætlaða skipanin ikki virkar til fulnar. Vandin kann avmarkast við at verkætlanin verður lagað til játtan. |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| At tíðin og tilfeingi til at gjøgnumføra verkætlanina er ikki nóg námreiniliga ásett. | | x | | | | Kann gera, at verkætlanin verður ikki fullførd ella verður dýrari (ella bíligari) enn ætlað. |

| Stovnsskipan | Vandastig | | | | | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vandaslag | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | |
| At stovurin ella ein uttanhýsis myndugleiki, virki ella veitari stýra verkætlanini. | x | | | | | Sæð úr stovnsins sjónarhorni er tað avgerandi, at stovnurin sjálvur stýrir og hevur ábyrgdina av verkætlanini, sjálvt um hetta fer fram í samstarvi við veitarar, aðrar almennar myndugleikar ella áhugabólkar. |
| Royndir við valdu teknisku loysnini. | | | x | | | Hevur týdning. Tað kann tó vera ringt at staðfesta, hvat meint verður við, tá ið vit tosa um royndir. Tað kann vera alt frá kunnleika um og til tað, at stovnurin hevur skipanir, sum eru bygdar á líknandi tøkni, sum ætlanin er at brúka í eini komandi skipan. Tær fakskipanir, sum Almannastovan brúkar, eru grundaðar á Oracle- og Microsoft-tøkni. |
| Royndir við at menna KT-loysnir. | | | x | | | Førleikar sjálvi at menna KT-loysnir eru avmarkaðir á Almannastovuni. Eisini kann sigast, at Almannastovan hevur ikki bara jaligar royndir við menning av verandi høvuðsfakskipan. Neyðugt verður tí, at nýggja KT-skipanin verður ment av einum sterkum veitara, sum |

| | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | megnar at lata eina skipan í hesum vavi. |
| Vitan um forrætningspartin av skipanini. | x | | | | | Á Almannastovuni er nágreinilig vitan um forrætningspartin av KT-skipanini. Tó eru í ætlanunum at menna eina nýggja skipan fasilitetir og funktiónir (t.d. workflow, portalloysn og dátuvøruhús), sum ikki áður eru royndir á Almannastovuni. |
| At KT-ætlanin hevur skipanarligar broytingar við sær. | | x | | | | Ein nýggj KT-skipan fer neyvan at hava stórar beinleiðis skipanarligar broytingar við sær. Hinvegin er tó væl hugsandi og ynskiligt, at onkrar arbeiðsgongdir fara at verða broyttar, og at sambandið millum fólk-tøkni-stovnsskipan, soleiðis sum vanligt er við nýmenning av KT, fer at verða ávirkað. |
| Upplæring av brúkarum. | | | x | | | Av tí at talan er um eina avgreiðsluskipan, verður tørvurin á upplæring í nýggju KT-skipanini avmarkaður og rættiliga eins fyri allar vanligar brúkarar. |

| KT-skipan | Vandastig | | | | | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vandaslag | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | |
| KT-verkætlanin umfatar integratión av fleiri standard-skipanum. | | x | | | | Vanliga er tað so, at er talan um at integrera fleiri standardskipanir, kunnu trupulleikar standast av hesum, og serligar avbjóðingar koma í sambandi við at fáa skipanir at samvirka. |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | | |
| Um skipanin er *gearað* til nýggja tekniska menning. | | x | | | | Hetta hevur við effektivu livitíðina hjá skipanini at gera, t.d., at ilt verður at veita nýggjar tænastur ella taka í brúk funktionalitetir, sum koma við nýggjum tekniskum frambrotum á KT-økinum. |
| At regluverkið, sum skipanin skal umsita, kann vera støðugt ella skiftandi. | | | x | | | Skiftandi regluverk setir krøv um fleksibilitet til skipanina. |
| Nógv konvertering av dáta gerast. | | | | x | | Tað er royndur lutur, at konvertering av dáta kann hava trupulleikar við sær. Hesin spurningur er samantengdur við val av skipan. |
| Er talan um eina kompleksa KT-verkætlan. | x | | | | | Ongin ivi er um, at talan í hesum føri er um eina kompleksa KT-verkætlan. |
| At nýggja skipanin fer at krevja nýggjar KT-førleikar. | | x | | | | Eigur at verða staðfest í sambandi við, at skipanarval fer fram. |

| Áhugamál/-bólkar | Vandastig | | | | | Viðmerkingar |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Vandaslag | 1 | 2 | 3 | 4 | 5 | |
| Áhugamál knýtt at KT-verkætlanini. | | x | | | | Um fleiri, fløkt og kanska mótstríðandi áhugamál eru knýtt at verkætlanini ella KT-skipanini, kann tað leggja meinbogar í vegin fyri menningini av henni. |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| At áhugabólkar kunnu hava bæði positivan ella negativan áhuga í verkætlanini. | | | | x | | Kann fremja ella forða fyri góðum samstarvi. Eigur at verða lýst sum partur av strategisku stýringini av verkætlanini. |
| Fyrimunir av verkætlanini - stovnurin sjálvur ella eisini uttanhýsis áhugabólkar. | | | x | | | Eigur at verða lýst. Best fyri verkætlanina er, at fleiri áhugamál/-bólkar vænta sær fyrimunir av skipanini. Eitt nú, at stovnurin kann avgreiða sínar uppgávur skjótt og væl, at kunningarstøðið verður hægri, at fólk kunnu vænta sær betri og skjótari tænastu, og at starvsfólk kunnu síggja fram til at fáa meiri áhugaverdar arbeiðsuppgávur. Hugurin at virka fyri menningini av skipanini kann hinvegin minka, um ávísir áhugabólkar ikki síggja nakrar fyrimunir við eini nýggjari KT-skipan ella kenna seg settar uttanfyri ávirkan ella í ringasta føri føla seg hóttar. Fyri undirtøku hevur tað týdning at kommunikera um fyrimunir á røttum stað og á rættan hátt. |

# 5.6. Uppskot til verklagslóg

Sambært kommissorium skal KT-bólkurin gera uppskot til orðing av lógaruppskoti til verklagslóg um KT-íløgur á Almannastovuni. Niðanfyri er uppskot til løgtingslóg um keyp av KT-høvuðsskipan til Almannastovuna.

**Uppskot**

**til løgtingslóg**

**um**

**keyp av KT-høvuðsskipan til Almannastovuna**

**§ 1**. Landsstýrismanninum verður heimilað at gera avtalur um keyp av KT-høvuðsskipan til Almannastovuna og í tí sambandi bera útreiðslurnar til verkætlanarleiðslu og at leyskeypa starvsfólk til verkætlanina. Útreiðslurnar til KT-høvuðsskipanina, verkætlanarleiðslu og starvsfólk kunnu í mesta lagi vera xx mió kr.

**§ 2**. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd, og fer úr gildi 31. desember 2009.

**1. Almennar viðmerkingar**

Endamálið við lógini er at tryggja, at málið fær eina nøktandi politiska viðgerð. Harnæst er henda lóg í samsvari við játtanarskipanina, har meginreglan er, at fyri størri íløgur, ið fevna um meira enn eitt fíggjarár, skulu lógaruppskot leggjast fyri løgtingið.

**KT-høvuðsskipanin**
Arbeiðið at fáa nýggjar høvuðsskipanir til Almannastovuna byrjaði í 1996. Fyrireikingararbeiðið endaði við útboði, har krøv til útgjalds- og málsviðgerðarskipan vórðu sett. Sam-teld vann rættin til at veita loysnina grundað á eginmenta útgjaldsskipan, stytt VFS, saman við journal- og málsviðgerðarloysn frá ScanJour. ScanJour/VFS-skipanin varð sett í verk í 1999, tó bert grundskipanir og pensjónsskipan. Miðað varð ímóti, at øll málsøki hjá Almannastovuni skuldi umsitast í nýggja skipanini, men hetta hevur ongatíð eydnast. Upprunaliga fíggjarætlanin helt ikki, og tað hevur higartil ikki verið møguligt at fáa játtan til at gera hesa ætlanina lidna.

Ì seinastu viðgerðini av umbøn um játtan til liðuggerð av skipanini bað løgtingið um eina heildarætlan fyri KT-ætlanirnar hjá Almannastovuni. Peningur varð játtaður til forprojekt at gera tørvsmeting og kravgreining av eini heildarskipan, sum kundi verða grundarlag fyri verklagslóg. Tilskilað

varð, at KT-skipanin á tryggum grundarlagi skal avgreiða allar sosialar veitingar á Almannastovuni, og at skipanin skal veita almennu umsitingini og politiska myndugleikanum neyðuga dátagrundarlagið.

Úrslitið av nevnda forprojekti er "Forkanning KT-høvuðsskipan á Almannastovuni 2006-2008" (Almannastovan, 6. juni 2006), sum byggir á kommissorium, ið stýrisbólkur við umboðum fyri leiðsluna á Almannastovuni, Gjaldstovuni og Almanna- og heilsumálaráðnum orðaðu.

Í forkanningini verður mælt til eina nýggja KT-høvuðsskipan, sum er ein integrerað heildarskipan, og sum fevnir um alt kjarnuvirksemið á Almannastovuni. KT-høvuðsskipanin, so sum hon er lýst í forkanningini, er ein tøkniliga og funktionelt sera framkomin avgreiðslu- og kunningarskipan, har viðskiftafólk, samstarvspartar, politiski myndugleikin og onnur umvegis eina portalsskipan kunnu avgreiða øll síni viðurskifti við Almannastovuna elektroniskt. Við umfevnandi automatiseringsloysnum, sjálvavgreiðslu-skipanum, fullari integratión millum ymsu deilskipanirnar, elektroniskum íbindingum til dátuskráir hjá triðja pørtum eins og øðrum effektiviseringum eru haldgóðar fortreytir skaptar fyri bæði rættari, skjótari og bíligari málsviðgerð og avgreiðslu av almannaveitingum umframt betri sosialfakligari ráðgeving og vegleiðing.

KT-høvuðsskipanin skapar eisini neyðugar fortreytir fyri einum munandi øðrvísi Almannastovu í framtíðini, har dentur skal leggjast á vitan og vitanarhandfaring. Almannastovan verður fremsta vitanar- og hagtalssavn á almannaøkinum, sum verður dygdargott grundarlag fyri eitt nú politiskari viðgerð av almannaviðurskiftum, fíggjarlóg og gransking á almannaøkinum.

Sentralar skipanir, sum eru partar av KT-høvuðsskipanini, eru eitt nú portalskipan (ið er portrið til høvuðsskipanina), journal- og málsviðgerðarskipan, veitingarskipan, gjaldingarskipan, kreditor- og debitorskipanir, hagtalsskipan við dátuvøruhúsi og íbindingarskipanir til dátuskráir hjá triðja pørtum. Skipanin fevnir sostatt um viðgerð, avgreiðslu og hagtalsskráseting av øllum sosialum veitingum á Almannastovuni.

### Tíðarætlan

Verður lógaruppskotið samtykt, er ætlanin at undirskriva avtalu við veitara fyrst í 2007. Væntandi tekur tað trý at menna og seta skipanina í verk. Verkætlanin skal verða liðug síðst í 2009.

## 2. Avleiðingar av uppskotinum

### Figgjarligar/búskaparligar avleiðingar

Endaligar samráðingar hava ikki verið við nakran veitara um KT-høvuðsskipan til Almannastovuna, men ein leyslig meting út frá vavinum og kompleksitetinum av almannaverkinum og sjálvari skipanini í uppskoti vísir, at samlaða verkætlanin fer at kosta uml. xx mió kr.

Av útreiðslunum til verkætlanina falla xx mió kr. til gjaldingar í 2007, xx mió kr. í 2008 og xx mió kr. í 2009.

Ein tílík skipan kemur at hava við sær eina betri fíggjarstýring bæði av stovnsrakstrinum og av lógarbundu játtanunum til almannaveitingar. Skipanin veitir betri hagtøl og upplýsingar annars savnaðar á einum stað. Skipanin hevur somuleiðis góð amboð til at gera betri metingar um framtíðar útreiðslutørv, rák v.m. á ymsu økjunum eins og til ber at gera simuleringar, sum kunnu verða grundarlag fyri almannapolitiskum átøkum.

Mett verður, at rakstrarútreiðslurnar av høvuðsskipanini, tá hon er liðug og sett í verk, verða nakað hægri enn í dag. Talan er um størri og kompleksari skipan, men mett verður, at hesar útreiðslur verða vunnar innaftur við teimum effektiviseringum, sum nýggja skipanin gevur.

Høvuðsskipanin skal íbindast aðrar skipanir hjá triðjapørtum eitt nú Gjaldstovuni, Toll- og Skattstovuni, Apoteksverkinum og Landsfólka-yvirlitinum. Útreiðslurnar til tillaging og menning av teirra KT-skipanum í hesum sambandi eru íroknaðar samlaða verkætlanarkostnaðinum, og verða fíggjaðar sambært hesi verklagslóg.

**Umsitingarligar avleiðingar**
Mett verður, at fyri Almannastovuna verða stórar umsitingarligar broytingar. Talan er um at seta í verk skipan, har meginparturin av tí arbeiði, sum í dag fer fram manuelt, verður gjørt automatiskt ella í mest møguligan mun sjálvvirkandi. Væntast kunnu tí umfevnandi broytingar í mannagongdunum hjá einstøkum starvsfólkabólkum. Umsitingarliga hevur tað eisini stóran týdning, at bæði stovnsleiðslan og politiska myndugleikin fáa nógv greiðari yvirlit yvir virksemið og støðuna á økinum sum heild, og kann hetta verða grundarlag fyri skilagóðum raðfestingum á øllum leiðslustigum.

Umsitingarliga verður eisini tann høvuðsbroyting, at viðskiftafólk fáa beinleiðis atgongd til egnar upplýsingar í skipanini eins og tey kunnu søkja um almannaveiting elektroniskt.

Verkætlanin kann koma at ávirka stovnin og starvsfólkini nógv, meðan menningartilgongdin og verksetingin fer fram. Tað er tí umráðandi, at stovnurin og starvsfólkini fáa nøktandi umstøður bæði til vanliga virksemið og virksemið, ið hevur samband við verkseting av nýggju skipanini.

**Umhvørvisligar avleiðingar**
Uppskotið hevur ongar umhvørvisligar avleiðingar.

**Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur**
Uppskotið hevur ongar avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur. Tó verður mett, at nýggja skipanin fer at styðja undir umsitingina av norðurlendsku konventiónunum á almannaøkinum, serstakliga viðvíkjandi sonevndu brotpensjónunum. Hetta er umsitingarligt øki, sum er í stórum vøkstri og sum harumframt kann væntast at vaksa nógv komandi árini.

**Sosialar avleiðingar**
Mett verður, at tá nýggja høvuðssipanin er sett í verk, verður samlaða avgreiðslutíðin av viðskiftafólki munandi styttri. Haruframt tryggjar skipanin eina rættari málsviðgerð. Væntandi er, at Almannastovan kann veita eina betri heildartænastu og harvið tryggja rættartrygd hins einstaka borgara betri.

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar sam-felagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | [redacted] | [redacted] | [redacted] | (Ja) | [redacted] |

**Ummæli**
Uppskotið hevur verið til løgfrøðiliga eftirkannan í Innlendismálaráðnum, ið ongar viðmerkingar hevur til uppskotið.

Uppskotið hevur ikki verið til hoyringar hjá øðrum pørtum. Fleiri myndugleikar og stovnar hava verið tiknir við uppá ráð í sambandi við forkanningararbeiðið, og verða hesir eisini tiknir við í viðkomandi partar av ítøkiliga verkætlanararbeiðinum.

## 3. Serligar viðmerkingar

**Til § 1:**
Í lógargreinini verður heimilað landsstýrismanninum at gera avtalur um keyp av telduútbúnaði til Almannastovuna í sambandi við útvegan av KT-høvuðsskipan, og at útreiðslurnar fyri útbúnaðin í mesta lagi kunnu verða xx mió kr., mvg ikki íroknað. Við útreiðslum til telduútbúnað er at skilja útreiðslur til ritbúnað (software) og tólbúnað (hardware) í sambandi við ítøkiligu útveganina av høvuðsskipanini, men ikki til annað KT-keyp á stovninum annars.

**Til § 2:**
Gildiskomuregla og úrgildiskomuregla.

**Hans Pauli Strøm**
*landsstýrismaður*

# 6. Skjøl

1. Almannaskipanir
2. KT-baksýni og tilgongd
2.1. Frágreiðing til fíggjarnevndina dagfest 29. apríl 2005
3. Arbeiðið hjá KT-bólkinum
4. Kravgreining
5. Kommissorium

# Skjal 1. Almannaskipanir

Víst verður til tátt 2.4. Niðanfyri verður stutt lýsing givin av ymsu almannaskipanunum.

*Dagpeningaskipanin*
Dagpeningur verður veittur við heimild í *løgtingslóg nr. 74 frá 8. mai í 2001 um dagpening vegna sjúku v.m.*, við seinni broytingum.

Dagpeningur verður veittur løntakarum, sum ikki hava rætt til fulla ella partvísa løn í sambandi við sjúku o.a. sambært lóg, trygging ella sáttmála, haraftrat útróðrarmonnum, sjálvstøðugt vinnurekandi, sum hava teknað sjálvbodna trygging, og øðrum. Dagpeningur verður goldin frá 1. fráverudegi og verður sum høvuðsregla roknaður eftir miðalinntøkuni tær síðstu 5 vikurnar, áðrenn viðkomandi gjørdist óarbeiðsførur. Dagpeningaveitingin er væntaða mista inntøkan, tó í mesta lagi 80 % av lønini sambært sáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag.

Í 2004 vóru 2.626 fólk í sjúkradagpeningaskipanini, 1.547 mannfólk og 1.057 konufólk. Nógv tey flestu vóru løntakarar. Goldið var fyri 3.466 sjúkraskeið, ella íalt fyri góðar 86.000 sjúkradagar.

*Forsorgarskipanin*
Forsorgarhjálp verður veitt eftir tørvi við heimild í *Lovbekendtgørelse nr. 100 frá 2. mars 1988 um almenna forsorg í Føroyum* (forsorgarlógin), við seinni broytingum. Forsorgarlógin er grundarlagið fyri sosialari hjálp í Føroyum. Tá allir aðrir møguleikar eru troyttir, virkar forsorgarlógin sum eitt trygdarnet fyri persónar, ið hava tørv á almennari hjálp.

*Vanlig forsorgarhjálp*
Fyribils uppihaldshjálp verður veitt eftir § 9 í forsorgarlógini at forða fyri, at livikorini hjá persóni og familju hansara versna munandi orsakað av eini almannahending, t.d. sjúku, hjúnarskilnaði o.l. Fyribils hjálp kann eisini verða veitt eftir § 9 vegna arbeiðsloysi.

Í 2003 fingu 1.138 fólk forsorgarhjálp eftir § 9.

Varandi hjálp eftir § 13 verður veitt, um tað ikki tykist vera møguligt hjá viðskiftafólki at gerast fíggjarliga sjálvbjargið á nakran hátt, og viðkomandi ikki hevur rætt til fyritíðarpensjón.

*Serligar fyriskipanir*
Hjálp kann eisini veitast til *stakútreiðslur* (eftir somu treytum sum í § 9) og til sjúkraútreiðslur eftir § 15 í forsorgarlógini.

Fíggjarligur stuðul kann latast til *familjur við børnum við skerdum førleika* sambært § 17. Familjur, ið uppihalda einum barni undir 18 ár heima við víðfevndum og longrivarandi skerdum førleika, kunnu frá tí almenna fáa endurgoldnar neyðugar meirútreiðslur, herundir útreiðslur til serligar viðgerðir og fyri mista arbeiðsinntøku.

Hjálp til *endurbúgving* kann veitast eftir § 18 í forsorgarlógini. Treytin fyri at fáa stuðul til endurbúgving er, at viðkomandi av sálarligum, likamligum ella sosialum ávum ikki er før/-ur fyri at uppihalda sær og sínum, og tí er neyðugt við tiltøkum, sum miða ímóti at menna og endurmenna vinnuførleikan hjá fólki.

Hjálp til hjálparamboð, heilivág o.a. kann eisini veitast við heimild í § 18 í forsorgarlógini.

Í 2003 fingu 640 fólk aðra forsorgarhjálp enn eftir § 9. Av hesum fingu 321 hjálp til stakútreiðslur, 289 til endurbúgving, og 30 fingu varandi veiting.

*Fólka- og fyritíðarpensjón*

Fólka- og fyritíðarpensjón verður veitt við heimild í *løgtingslóg nr. 48 frá 10. mai 1999 um almannapensiónir o.a.*, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 9. mai 2005. Rætt til fólkapensjón hava persónar, sum hava fylt 67 ár. Fyritíðarpensjón er antin lægsta, miðal ella hægsta fyritíðarpensjón.

Hægsta fyritíðarpensjón kann tillutast persónum, sum hava fylt 18 ár, men sum ikki hava fylt 60 ár, og sum mugu roknast sum varandi óarbeiðsførir.

Pensjónistar kunnu fáa eina viðbót eftir *løgtingslóg nr. 35 frá 16. apríl 1997 um viðbót til ávísar pensiónistar v.fl.*, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 10 frá 9. februar 2001. Viðbótin verður ásett í mun til inntøkumeting.

Aftrat pensjónini kunnu í einstøkum førum tillutast aðrar viðbøtur, t.d. avlamis-, barna-, hjálpar- og røktarviðbót og avlamisveiting, sum ikki verða útroknaðar eftir inntøku. Avlamisveiting kann tillutast persónum millum 18 og 67 ár, sum vegna ov høga inntøku ikki kunnu fáa pensjón eftir dømingini sambært § 9

Persónlig viðbót kann veitast einum pensjónisti, sum hevur serliga trupul kor.

Barnaviðbót verður veitt einum pensjónisti, sum hevur uppihalds- ella gjaldsskyldu mótvegis einum barni undir 18 ár.

Pensjónsupphæddir og viðbøturnar verða ásettar í *løgtingslóg nr. 107 frá 22. desember 1999 um áseting og javning av almannaveitingum*, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 50 frá 4. apríl 2002. Upphæddirnar verða sum er á hvørjum ári javnaðar við 4 % við kunngerð.

Í 2004 fingu 5.828 føroyingar fólkapensjón, 3.222 konufólk og 2.606 mannfólk. Av hesum fingu 1.464 bert grundarupphædd, 3.501 grundarupphædd við fullari viðbót, 613 grundarupphædd við skerdari viðbót og 250 vóru fastbúgvandi á stovni. Um somu tíð vóru 1.888 fyritíðarpensjónistar, 1.120 konufólk og 768 mannfólk. Av hesum fingu 440 lægstu, 804 miðal og 554 hægstu veiting, og 90 fingu avlamisveitingar.

Í 2004 fingu 322 pensjónistar barnaviðbót, 233 fingu persónliga viðbót, 107 fingu hjálparviðbót, og 39 fingu røktarviðbót.

*Aðrar fyriskipanir*
Umframt nevndu vetingar kunnu einsamallir uppihaldarar fáa barnagjald *løgtingslóg nr. 71 frá 20. maj 1996 um barnagjald til einsamallar uppihaldarar v. fl.*, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 6 frá 25. januar 2001.

Stuðul til uppihaldspening kann veitast eftir *løgtingslóg nr. 90 frá 6. juni 1997 um stuðul til uppihaldspening*, sum broytt við løgtingslóg nr. 69 frá 2. mai 2001. Árliga stuðulsupphæddin verður 50 % av tí uppihaldspeningi, sum persóni er álagt at gjalda.

Samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima verður játtað eftir *løgtingslóg nr. 64 frá 5. juni 1984 um samsýning fyri at ansa eldri og óhjálpnum heima* sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 52 frá 28. apríl 2000.

Reglur fyri gjald, herundir um pensjónsviðurskifti v.m., tá ið viðskiftafólk er á stovni, er ásett í *løgtingslóg nr. 108 frá 22. desember 1999 um uppihald á stovni o.l.*, sum broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 9. mai 2005.

*Løgtingslóg nr. 46 frá 9. maj 2005 um stuðul til umsorgararbeiði* kemur í gildi 1. januar 2006.

Ætlaðar broytingar í løgtingslóg um dagpening vegna sjuku og løgtingslóg um vanlukkutrygging hava við sær, at øll umsiting- og útgjaldin av dagpeningi verður løgd til Almannastovuna. Broytingin er tann, at tað í dag er Tryggingarfelagið Føroyar, sum umsitur og rindar dagpening til persónar, sum hava fingið viðurkent ein arbeiðsskaða.

Framdar broytingar í almannapensjónslógini hava við sær, at avgerðarmyndugleikin í fyritíðarpensjónsmálum er fluttur frá Vanlukku-tryggingarráðnum (FUR) til Almannastovuna, og at kærumyndugleikan í somu málum er fluttur frá Den sociale Ankestyrelse í Danmark til Kærunevndina í almannamálum (Kærustovnin).

# Skjal 2. KT-baksýni og tilgongd

Víst verður til tátt 2.7.

Niðanfyri verður lýst tilgongdin og samskiftið í tíðarskeiðinum heystið 2004 til várið 2005 millum Almannastovuna, Almanna- og heilsumálaráðið og løgtingið í sambandi umbøn um játtan til at gera lidna VFS-skipanina.

Á heysti 2004 var roynt at fáa gongd á aftur at gera VFS-skipanini lidna. Í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg fyri fíggjarárið 2005 stendur undir yvirskriftini "Nýgerð av EDV" á Almannastovuni, at:

> *"2 mió. kr. eru settar av til at víðka "viðskiftafólkaskipanina". Játtanin skal nýtast til at leggja dag- og barnapening inn í skipanina. 2 mió. kr. Eru til fyrsta stigið, men mett verður, at neyðugt eisini er við játtan til endamálið tey næstu árini."*

Í brævi dagfest 12. november 2004 sendir landsstýrismaðurin í almanna- og heilsumálum Fíggjarnevndini svar upp á spurningar frá nevndini, ið m.a. snúgva seg um hesa játtan. Spurt verður:

> *"Hevur landsstýrismaðurin gjørt eina heildarætlan fyri edv-nýtsluna á Almannastovuni?*
>
> *Svar:*
> Almannastovan hevur gjørt eina ætlan viðvíkjandi VFS skipanini, uppá umleið 10 mió. kr. yvir umleið 3 ár. Ætlanin er, at VFS skipanin eisini skal fevna um dagpeningaskipan, barna-pening, alimentatión, og forsorg. Harafturat koma tillagingar og uppgraderingar í verandi skipan umframt neyðugt hardware.
>
> *Um so er, tekur hon so eisini hædd fyri viðmerkingunum hjá landsgrannskoðaranum?*
>
> *Svar:*
> Í "Frágreiðing latin løgtingsgrannskoðarunum" frá Lands-grannskoðanini í mars 2004, stendur í niðurstøðuni um EDV-viðurskifti á Almannastovuni á síðu 113, við feitari skrift lagdari afturat:
>
> *"Eftir seinastu fundirnar við almannastjóran í januar 2003 hildu vit samanumtikið, at Almannastovan og Almannamálaráðið hava bøtt um viðurskiftini á summum økjum, men á týðandi økjum vóru ikki framdar nøktandi ábøtur samsvarandi tilmælum okkara frá juli 2000.*
>
> *Frammanfyri hava vit víst á, at fleiri reglur um KT-trygd nú eru ásettar, og sostatt eru krøvini til KT-trygd økt munandi síðani 2000.* ***Hóast tiltøk***

***eru sett í verk at bøta um nøkur viðurskifti, er í dag nógv longri á mál enn í 2000***.

*Vit halda framvegis, at skipanin er ikki nóg trygg, og vit halda tað verða lítið sannlíkt, at Almannastovan lýkur allar treytirnar í § 31, stk. 3 í lógini um viðgerð av persónsupplýsingum og kunngerðini um trygdartiltøk."*

Avgjørt er, at VFS skipanin skal byggjast út, so hon eisini fevnir um dagpengaskipan. Ein kravfesting er í 2002 gjørd til hesa broyting, men kravfestingin verður í næstum dagførd sambært seinni lógarbroytingum. Her verður víst til síðu 129 í frágreiðingini frá Landsgrannskoðanini:

*"Í sambandi við fíggjarlógaruppskotið fyri 2004 hevði Almannastovan biðið Almannamálaráðið seta 10 mió. kr. av til EDV yvir 3 ár, m.a. fyri at dagpeningur kann verða lagdur yvir í VFS. Í juni 2003 kunnaði almannastjórin um, at fær Almannastovan í 2004 játtan til EDV, fer hon at ganga gjøllari ígjøgnum uppskotið til kravfesting av nýggju dagpeningaskipanini, ið veitarin hevur gjørt. Sambært viðmerkingunum til uppskotið til løgtingsfíggjarlóg 2004, ið datt burtur, tá val varð útskrivað 5. desember 2003, vóru 2 mió. kr. ætlaðar til eina nýggja útgjaldingarskipan til dagpening. Í uppskotinum til løgtingsfíggjarlóg 2004, sum varð lagt fram 25. mars 2004, er eingin upphædd sett av til EDV."*

Almannastovan vísti í skrivi dagfest 18. august 2004 á tørv á tkr. 1.500 fyri at nøkta krøvini í kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum og krøvini frá KT forum.

Almannastovan hevur fingið longt freistina fyri at heiðra krøvunum í trygdarkunngerðini til 1. apríl 2005. Landsstýrið hevur samtykt, at Vinnumálaráðið skal samskipa hetta arbeiðið, og tí er ikki lagt upp til at játta pening til Almannastovuna.

Talan er soleiðis um herd krøv til KT trygd seinastu árini, umframt at tørvur er fyri menning av VFS skipanini til at fevna um umsiting av dagpeningi, alimentatión, forsorg og barnapeningi. Sjálvt um lagt er upp til at játtað tkr. 2.000 til EDV í FLU2005, verður neyðugt, at peningur verður játtaður til endamálini árini frameftir, tí roknað verður við, at tann parturin kostar umleið 10 mió. kr.

Sum sæst, metir Landsgrannskoðanin at langt er á mál, áðrenn EDV viðurskiftini á Almannastovuni eru í lagi, og er Almannastovan samd við Landsgrannskoðanini í hesum."

Trivnaðarnevndin hjá løgtinginum ger 22. oktober 2004 eisini viðmerkingar til fíggjarlógaruppskotið og hevur hesar viðmerkingar um KT-viðurskiftini á Almannastovuni:

> *"Nevndin er komin eftir, at síðan 1986 eru góðar 30 mió. kr. brúkar til íløgur og viðlíkahald av teldutøkni. Hóast hetta, eru drúgvar viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum. Nú hevur landsstýrismaðurin skotið upp at gera enn fleiri íløgur á teldukervið á Almannastovuni, uttan at ein heildarætlan er gjørd um, hvussu samlaða kervið hjá Almannastovuni kann virka nøktandi."*

Trivnaðarnevndin sigur, at hon fer at kunna Fíggjarnevndina um hetta.

Í sínum áliti dagfest 13. desember 2004 ger Fíggjarnevndin hesa niðurstøðu um uppskotið um "Nýgerð av EDV" á Almannastovuni:

> *"Trivnaðarnevndin vísir í sínum ummæli til fíggjarnevndina á, at "Nú hevur landsstýrismaðurin skotið upp at gera enn fleiri íløgur í teldukervið á Almannastovuni, uttan at ein heildarætlan er gjørd um, hvussu samlaða kervið hjá Almannastovuni kann virka nøktandi."*
>
> *Nevndin er samd við trivnaðarnevndini og heldur, at landsstýrismaðurin eigur fyrst at gera eina heildarætlan fyri økið og síðani at koma í Løgtingið við eini verklagslóg."*

Henda niðurstøða verður gjørd Almannastovuni kunnug í brævi frá Almanna- og heilsumálaráðnum dagfest 21. januar 2005, har upplýst verður, at løgtingsfíggjarlógin fyri 2005 er samtykt uttan nakra játtan til "Nýgerð av EDV" á Almannastovuni, og at Almanna- og heilsumálaráðið ætlar at leggja uppskot til verklagslóg fyri tingið í hesi tingsetuni.

Almanna- og heilsumálaráðið sigur víðari í brævinum:

> *"Almannastovan verður biðin um at koma við eini væl útgreinaðari frágreiðing viðvíkjandi verkætlanini. Frá-greiðingin skal snúgva seg um:*
>
> - *Innihaldið, hví er tað neyðugt, hvørjir eru fyrimunirnir og hvørjir eru vansarnir, um einki verður gjørt*
> - *Tíðarætlan*
> - *Kostnaður, eisini árini frameftir*
>
> *Harumframt ynskir Almanna- og heilsumálaráðið, at frágreiðingin eisini inniheldur eina stutta frágreiðing um samskiftið við Gjaldstovuna viðvíkjandi góðkenning av verandi skipan og møguligari góðkenning av hesi skipan, um Gjaldstovan ikki góðkennir verandi skipan."*

Almanna- og heilsumálaráðið vil hava hesa frágreiðing í seinasta lagi 31. januar 2005.

Í eykajáttanarlógaruppskotinum fyri mars 2005 legði landsstýrið fram uppskot um játtan 800.000 kr. til eitt forprojekt, "sum kann nýtast til at gera

uppskot til eina verklagslóg at leggja fyri Løgtingið í heyst." Hesa umbøn játtar løgtingið.

Í viðmerkingunum til hesa umsókn verður sagt:

> *"Almannastovan arbeiðir við at fáa eina KT heildarskipan fyri alt almannaverkið, soleiðis sum upprunaliga ætlað. Ætlanin er, at skipanin á tryggum grundarlagi kann avgreiða allar sosialar veitingar, ið Almannastovan hevur ábyrgdina av. Skipanin skal eisini kunna veita almennu umsitingini og politiska myndugleikanum neyðuga dátagrundarlagið í sambandi við hagtøl og leiðslukunning.*
>
> *Játtanin skal nýtast til tørvsmeting og kravfesting. Endamálið er at gera eitt forprojekt, sum kann nýtast til at gera uppskot til eina verklagslóg at leggja fyri Løgtingið í heyst."*

Hetta málið varð beint í fíggjarnevndina, sum tann 10. mai 2005 legði fram soljóðandi álit:

> *"Nevndin hevur eftir umbøn fingið eina frágreiðing frá landsstýrismanninum um edv-ætlanir á Almannastovuni. Meirilutin er av teirri áskoðan, at tað er umráðandi, at hesi viðurskifti eru nøktandi, vísandi til at Almannastovan umsitur útgjald fyri stórar upphæddir. Meirilutin metir ikki, at gongdin hevur verið nøktandi, sum frágreiðing landsstýrismansins eisini greitt vísir. Meirilutin tekur undir við, at nevnda arbeiði fer í gongd, men metir, at tað er alneyðugt, at Løgtingið nú fær eina rætta mynd av edv-ætlanum fyri hetta økið, so at tað ikki framhaldandi koma umbønir um edv-játtanir, ið ikki eru liðir í eini samlaðari ætlan.*
>
> *Meirilutin leggur stóran dent á, at landsstýrismaðurin nú heldur galdandi ásetingar um búskaparskipanir, og at Gjaldstovan er við í arbeiðinum frá byrjan.*
>
> *Meirilutin metir, at sum ein partur av arbeiðinum eigur løgmaður/landsstýrismaðurin at umhugsa, um tað er rætt, at uppgávan við útgjaldi framhaldandi eigur at liggja hjá Almannastovuni, ella henda uppgávan eigur at verða løgd saman við øðrum útgjaldsskipanum landsins."*

Tann frágreiðingin, sum Fíggjarnevndin sipar til omanfyri, er "*Frágreiðing til fíggjarnevndina um KT-verkætlanina á Almannastovuni í samband við viðgerð av eykajáttan*", sum Almanna- og heilsumálaráðið sendir nevndini í skjali dagfest 29. apríl 2005 (J.nr.: 0.21-200500086/8). Í hesi frágreiðingini verður staðfest, at:

> *"Tað er avgerandi neyðugt, at gongd kemur á aftur fyri at fremja edv-verkætlanirnar.*

> *Gomlu skipanirnar eru ótíðarhóskandi og nærum ikki uppgraderaðar síðani 1986. Dagpeninga- og alimentatiónsskipanirnar lúka ikki treytirnar um funktiónsskilna. Skipanirnar geva ikki møguleika fyri at veita relevant hagtøl. Og tær lúka als ikki treytirnar um trygd, eins og tær heldur ikki kunnu veita tað neyðugu leiðslukunningina, ið nútíðin krevur.”*

Í frágreiðingini verður upplýst, at ”Almannastovan er av teirri fatan, at skilabest er at halda áfram við víðari at menna kjarnuskipanina VFS/ScanJour.”

Frágreiðingin er hjáløgd sum skjal 2.1., sí næstu síðu.

Um gongdina eftir hetta verður víst aftur til tátt 2.7.

# Skjal 2.1. Frágreiðing til fíggjarnevndina

### Frágreiðing til fíggjarnevndina um KT-verkætlanina á Almannastovuni í samband við viðgerð av eykajáttan – dagfest 29. apríl 2005

Ætlanin er at leggja eina verklagslóg fyri Løgtingið um KT-verkætlanina á Almannastovuni. Almanna- og heilsumálaráðið bað tí Almannastovuna um at útvega grundarlagið til hetta. Almanna- og heilsumálaráðið hevur mett, at tilfarið ikki var nóg nágreiniligt til at kunna gera eina verklagslóg útfrá. Millum annað ynskir Almanna- og heilsumálaráðið at tilfarið er greiðari viðvíkjandi orku, tíð og kostnaði, umframt hvussu VFS-skipanin kann samskipast við skipaninar hjá Gjaldsstovuni.

Almannastovan hevur fingið boð um, at broytingar í VFS-skipanini skulu sampakka við skipanirnar hjá Føroya Gjaldstovu. Almannastovan hevur fingið nakrar fyribils viðmerkingar frá Føroya Gjaldstovu til tað sum er skrivað, og hevur Almannastovan gjørt Almanna- og heilsumálaráðið varugt við, at tikið verður hædd fyri hesum.

Almanna- og heilsumálaráðið hevur tí skotið upp, at ein forkanning verður gjørd at veita nágreiniligt grundarlag fyri gerð av verklagslóg. Í hesum sambandi verður søkt um eina eykajáttan til forkanningina. Fíggjarnevndin hevur biðið um at fáa fleiri upplýsingar í hesum sambandi.

Her verður sent partur av tilfari um forkanningina og ein frágreiðing um verkætlanina, sum Almannastovan hevur útvegað Almanna- og heilsumálaráðnum.

### Forkanning

Almannastovan hevur sent hetta uppskotið til eina forkanning í samband við verklagslóg fyri KT-verkætlanina á Almannastovuni. Ein nærgreining av forkanningini er hjáløgd í skjali 1. Uppskotið er tilevnað av Almannastovuni í samstarvi við P/F Sam~teld.

Mettur kostnaður av forkanningini verður soleiðis kr. **798.000**, bólkaður eftir standarkonti sum niðanfyri:

**Talva 1: Lønarútreiðslur, standarkonta 11**

| Stovnur | Heiti | Í alt kr. | Konto |
|---|---|---|---|
| Almannastovan | Starvsfólk | 300.000 | 11 |
| **Almannastovan í alt** | | **300.000** | **11** |

**Talva 2: Rakstrarútreiðslur, standarkonto 14**

| Stovnur | Heiti | Eindir | Eindar-kostanður | Í alt | Konto |
|---|---|---|---|---|---|

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Veitari | Konsulenthjálp | 83 dagar | 6.000 | 498.000 | 14 |
| **Í alt standardkonta 14** | | | | **498.000** | |

## Tíðarætlan

Almannastovan metir, at forkanningin í sambandi við verkætlanina kann verða liðug tíðliga í heyst, um peningur verður settur av til endamálið í eini eykajáttan tíðliga í vár, soleiðis at ein verklagslóg í sambandi við KT-verkætlanina á Almannastovuni kann berast niðan í Løgtingið í heyst.

## Grundarlag

Byrjað var at menna kjarnuskipanina á Almannastovuni, VFS/ScanJour, har ið VFS stendur fyri ViðskiftaFólkaSkipanin, í 1998 og fyrsta fasan í menningini var tikin í nýtslu í desember 1999.

Frammanundan hesum var ein kravfesting gjørd til kjarnuskipanina á Almannastovuni í 1997, og biðið var um tilboð frá 3 føroyskum veitarum: P/F Elektron, P/F Sam~teld og P/F Formula.fo (tá P/F Formula Føroyar) .

P/F Sam~teld vann uppgávuna.

Menningin av kjarnuskipanini hjá Almannastovuni er frá byrjan skipað í 4 fasur:

1. **Journal- og málsviðgerðarskipanir, felags útgjalds-skipan og serskipan fyri umsiting av fólka- og fyritíðar-pensjónum**
2. **Serskipan fyri umsiting av dagpeningi**
3. **Serskipan fyri umsiting av forsorg**
4. **Serskipan fyri umsiting av barnapeningi**

Fasurnar 2-4 eru ikki framdar enn, tí neyðug játtan er ikki fingin til hesar. Viðmerkjast skal, at í fasu 1 er gjørt nógv arbeiði, ið skal nýtast av skipanunum í fasu 2, 3 og 4 og at hetta arbeiði skal ikki gerast umaftur.

## Stutt um VFS/ScanJour

ScanJour skipanin er ein standard máls- og journalskipan og í samband við VFS-skipanina, verður hon m.a. nýtt til:

- Umsiting av navnaupplýsingum hjá øllum klientum og viðskiftafólki
- Umsiting av allari málsviðgerð hjá klientum
- Journalumsiting í samb. við samskifti millum Almannastovuna og aðrar stovnar

VFS-skipanin er soleiðis ein føroyskt ment skipan, ið er ætlað sum kjarnuskipan til allar sosialar veitingar í Føroyum. Kring kjarnuskipanina, verða serskipanir (modulir) mentar til tey ávísu økini. Hesar serskipanir nýta upplýsingar úr kjarnuskipanini, til at stuðla útrokningar og ásetingar av veitingum innan serøkini. Í løtuni er bert ein serskipan í nýtslu og tað er pensjónsserskipanin.

## Framyvir

Almannastovan er av teirri fatan, at skilabest er at halda áfram við víðari at menna  kjarnuskipanina VFS/ScanJour.

Nógv tilfeingi liggja í skipanini

- Hon er skræddaraseymað til føroysk viðurskifti
- Um allar fasurnar verða framdar sum ætlað, metir Almannastovan, at kjarnuskipanin kemur at nøkta henda tørvin framyvir
  - herundir hagtalsgrundarlag
  - samskifti við FSL
  - viðmerkingar frá Landsgrannskoðaranum
  - trygdarkunngerðina
- skipanin hevur verið í nýtslu í 4 ár, og tað er ein fyrimunur við einari kjarnuskipan, við serskipanum í sama umhvørvi

Almannastovan metir eisini, at tað er ein bíligari loysn at halda áfram við at menna fasurnar 2-4, heldur enn at skula undir at menna eina heilt nýggja skipan til føroysk viðurkskifti.

# Frágreiðing í sambandi við ætlaða verklagslóg – KT verkætlanin á Almannastovuni

## I. Innleiðing – baksýni og status

Í 1997 varð avgjørt, at Almannastovan kundi fara undir útskiftan og nýgerð av síni edv-skipan. Yvir eitt 3-ára skeið skuldu játtast 10 mió kr., sum man metti, nýgerðin fór at kosta. Tær 10 mió. Kr. vórðu nýttar yvir eitt 4 ára skeið 1998-2001, men rukku ikki til at dekka allan tørvin. Einans 1. fasu – sí niðanfyri. Hinar fasurnar eru ikki framdar enn, tí neyðug játtan er ikki fingin til hesar. Viðmerkjast skal, at í fasu 1 er gjørt nógv arbeiði, ið skal nýtast av skipanunum í fasu 2, 3 og 4. Hetta arbeiði skal ikki gerast umaftur.

Ætlanin varð býtt sundur í hesar 4 fasur:

### Fasa 1 – Kjarnuskipanin VFS/ScanJour, íroknað Pensjóns-skipan

Menning av VFS (ViskiftaFólkaSkipanini)
Keyp av Scanjour, máls- og journalskipan licensum
Keyp av Oracle databasu licensum
Keyp av Misrosoft licensum
Keyp av Servarateldu
Keyp av teldum til arbeiðsplássini
Menning av Pensjónsskipani

### Fasa 2 - Dagpengar

Menning av Dagpeningaskipani

### Fasa 3 - Forsorg

Menning av Forsorgarskipani

### Fasa 4 - Alimentatión

Menning av Alimentatiónsskipani

Verkætlanarbólkar, samansettir av internum edv-kønum og umboðum fyri tær ymsu fakdeildirnar á Almannastovuni vórðu í 1997 settir at lýsa/nágreina umsitingina, lógargrundarlagið og uppgávurnar og gera kravfestingar til eina nýggja telduskipan. Konsulenthjálp varð útvega frá edv-virki uttanífrá.

Gamla telduskipanin hjá Almannastovuni, sonevnda fip-skipanin (fólka- og invalidapensjónsskipanin), ið var innførd í 1987 var blivin ótíðarhóskandi og tung at arbeiða við. At nýggj pensjónslóg var á veg og at roknað varð við, at komandi ártúsundskiftið fór at skapa trupulleikar við dagfestingum vm, skundaði undir ætlanirnar.

Gamla skipanin var fyrst og fremst útskift fyri at effektivisera og rationalisera arbeiðsgongdirnar, fáa eina tryggari skipan og bøta um tænastuna við viðskiftafólkið. Nýggja skipanin skuldi vera opin, trygg og smidlig.

Upprunaliga var ætlanin at lýsa og kravfesta øll umsitingarøkini (serøkini), sum Almannastovan hevði ábyrgd av, fyri síðan at fara í gongd við at kanna tøkniligu møguleikarnar, útvega hard-ware, programmera o.s.fr., øki fyri øki.

Í sjálvum kravfestingararbeiðinum bleiv tó skjótt greitt, at neyðugt var at skipa verkætlanina í 4 fasur. Hetta komst millum annað av, og kanska serliga tí, at orka var ikki til at gera alt nágreiningararbeiðið yvir so stutta tíð. Tað var ikki praktiskt gjørligt at frítaka tey starvsfólk, sum máttu vera við í útgreiningararbeiðinum, frá vanligu arbeiðsuppgávunum.

Ætlanin var sum nevnt omanfyri í 4 fasum:

5. **Journal- og málsviðgerðarskipanir, felags útgjalds-skipan og serskipan fyri umsiting av fólka- og fyritíðar-pensjónum**
6. **Serskipan fyri umsiting av dagpeningi**
7. **Serskipan fyri umsiting av forsorg**
8. **Serskipan fyri umsiting av alimentatión**

Í samband við journal- og málsviðgerðarskipanina var standardskipanin ScanJour keypt.

Journal- og málsviðgerðarskipanirnar, felags útgjaldsskipanin VFS og serskipanin fyri fólka- og fyritíðarpensjónir, vórðu tiknar í nýtslu í desember 1999.

Aðrar serskipanir eru ikki innførdar enn. Dagpeningur og barnapeningur koyra á skipanini, ið varð ment í 1986 og einans smávegis ábøtur eru gjørdar

hesi farnu 20 árini. Harumframt kann nevnast, at menningin av stýriskipanini, ið dagpeningaskipanin koyrir á, varð steðgað í ár 2000. Forsorgarveitingarnar verða viðgjørdar manuelt (rokniark), men útgoldnar yvir VFS.

Ávíst útgreiningararbeiði er gjørt viðvíkjandi dagpeningi og forsorg.

Soleiðis fyriliggur ein frágreiðing/kravfesting frá 2001 til dagpeningaøkið. Henda má endurskoðast og tillagast ávísar broytingar, sum hava verið gjørdar í lógini síðan.

Forsorgarøkið er lutvíst kannað og lýst, men ongin samlað frágreiðing er gjørd.

Ein kanning av barnagjaldsøkinum varð útvegað í 1996 av Almannastovuni og Gjaldstovuni í felag. Henda kann vera grundarlag undir nærri kanningum og kravfestingum fyri alimentatiónsøkið.

Síðan 2001 er, orsakað av at ongin peningur hevur verið avsettur á fíggjarlógini til endamálið, so at siga onki útgreiningararbeiði gjørt.

M.a. krøvini í trygdarkunngerðini hava síðan havt við sær, at tørvurin á ábótum og tillagingum, sum hava við trygdina at gera, eru vorðin størri og sjónligari. Neyðugt er tí at víðka upprunaligu verkætlanina í mun til hesi krøv.

Tað er avgerandi neyðugt, at gongd kemur á aftur fyri at fremja edv-verkætlanirnar.

Gomlu skipanirnar eru ótíðarhóskandi og nærum ikki uppgraderaðar síðani 1986. Dagpeninga- og alimentatiónsskipanirnar lúka ikki treytirnar um funktiónsskilna. Skipanirnar geva ikki møguleika fyri at veita relevant hagtøl. Og tær lúka als ikki treytirnar um trygd, eins og tær heldur ikki kunnu veita tað neyðugu leiðslukunningina, ið nútíðin krevur.

## II. Kjarnuskipanin VFS/ScanJour – stutt lýsing

Kjarnuskipanin á Almannastovuni er samansett av standardskipanini ScanJour og eini skræddaraseymaðari skipan, sum P/F Sam~teld hevur ment frá grundini av: VFS-skipanin. Skipanin var ment til Almannastovuna í tíðarskeiðnum 1998 – 2000.

ScanJour skipanin er ein standard skipan í modulum, og Almannastovan nýtir journal, málsviðgerðar- og skanningsmodulini. ScanJour skipanin verður í samband við VFS-skipanina m.a. nýtt til:

- Umsiting av navnaupplýsingum hjá øllum viðskiftafólki

- Umsiting av allari málsviðgerð í samband við viðskiftafólk
- Umsiting av fyrisitingini á Almannastovuni, herundir journal-umsiting í samband við samskifti millum Almannastovuna og aðrar stovnar
- Skanning av øllum inngangandi posti

VFS-skipanin er ein føroysk ment skipan, ið er ætlað sum kjarnuskipanin til allar sosialar veitingar í Føroyum. Sí mynd 1.




**Mynd 1 Kjarnuskipanin VFS/ScanJour – integrerað við FSL**




**Mynd 2 Kjarnuskipanin VFS/ScanJour upprunaliga ætlanin frá 1997. Kelda: Kravfesting – Nýggj ViðskiftaFólkaSkipan til Almannastovuna (1997), síða 39.**

Kring kjarnuskipanina verða serskipanir (modulir) mentar til tey ávísu økini. Hesar serskipanir nýta upplýsingar úr kjarnuskipanini, til at stuðla undir útrokningar og ásetingar av veitingum innan serøkini. Í løtuni er sum nevnt omanfyri, bert ein serskipan í nýtslu og tað er pensjónsserskipanin, ið umsitir fólka- og fyritíðarpensjónir, sí undir fasu 1.

Veitingar til forsorgarklientar, verða útroknaðar manuelt (rokniark) og síðani skrásettar manuelt inni í VFS-skipanini. Ein serskipan innan forsorgarøki er tó í nýtslu, og tað er umsitingin av heilivágsjáttanini eftir § 18 og § 17. Henda skipan er automatiserað á Almannastovuni, meðan hon bert partvís er automatiserað hjá Apoteksverkinum.

VFS-kjarnuskipanin inniheldur m.a.

- Satsskráir, ið verða nýttar til at áseta upphæddir fyri ávísar veitingar
- Umsiting av veitingum innan tey ymsu serøkini, t.d. Fólkapensjón, Hægsta- , Miðal og Lægsta fyritíðarpensjón o.s.fr. og hvussu hesar skulu ”tulkast” av skipanini
- Umsiting av inntøkusløgum og hvussu inntøkur skulu ávirka pensjónsásetingar
- Umsiting av tilknýti millum ScanJour málssløg og slag av veitingum
- Útrokning av veitingum
- Útgjaldsavgreiðslur
- Skrásetingar av ”hendingum” beinleiðis inn í ScanJour málsskipanina, t.d. tá fyritíðarpensjónistur skiftur status til fólkapensjónist.
- Upplýsingar um allar útgoldnar veitingar
- Samskifti við aðrar stovnar
- Brúkaraumsiting
- Loyniorðspolitikk og stýring

ScanJour skipanin og VFS-skipanin eru síðani knýttar saman (integreraðar), so at brúkarar nýta ScanJour málsviðgerðarskipanina sum útgangsstøði fyri at finna og umsita upplýsingar í VFS- skipanini.

Í stuttum kann sigast, at ScanJour málsviðgerðarskipanin inniheldur allar hendingar (samskifti við viðskiftafólkini, avgerðir, broytingar í pensjónsviðurskiftum), meðan VFS-skipanin inniheldur allar upplýsingar um útgjaldingar og grundarløgini undir hesum, so sum inntøkuviðurskifti, giftur/ógiftur, børn o.s.fr.

Sum nevnt omanfyri er í dag bert fasa 1 av VFS-verkætlanini gjøgnumførd, og tí inniheldur VFS-skipanin ikki serskipanir til áseting av dagpeninga-, forsorgar- og alimentatiónsveitingum. Men kjarnu-skipanin er fyrireikað til hesar og liggur menningin av teimum í fasunum 2-4.

## II. Verkætlanin – fasa 2-4

Niðanfyri verður greitt frá teim ymsu pørtunum av verkætlanini, sum partvís eru gjøgnumførdir, og sum Almannastovan metir, mugu fremjast innanfyri tey næstkomandi umleið 3 - 4 árini, saman við víðari menning av øðrum økjum, ið kunnu vera við til at rationalisera arbeiðsgongdirnar á Almannastovuni og hækka tænastustøðið mótvegis borgarunum og mótvegis øðrum almennum myndugleikum.

# A. Fíggjarskipan landsins og samskifti við Føroya Gjaldstovu

Ávíst samskifti hevur verið millum Almannastovuna og Føroya Gjaldstovu, bæði viðvíkjandi fasu 1 og fasunum 2-4.

Upplýsast skal, at Føroya Gjaldstova hevur ikki góðkent fasu 1 skipanina á Almannastovuni, men ítøkiligt samskifti hevur verið millum partarnar um at fáa skipanina góðkenda.

Føroya Gjaldstova og Almannastovan eru samd um at samstarva í menningini av skipanunum í fasunum 2-4.

Mett verður, at møguleiki er fyri at at samskipa telduskipanina hjá Almannastovuni við Fíggjarskipan Landsins.

Tað er sambært P/F Sam~teld, sum hevur ment skipanina, møguligt at útbyggja og integrera VFS hjá Almannastovuni við Búskaparskipan Landsins (BSL).

Ein møguleiki er, at tað í samstarvi við Føroya Gjaldstovu verður kannað og ásett, hvørjar møguligar broytingar skulu gerast í VFS skipanini, fyri at Føroya Gjaldstova kann góðkenna skipanina og at skipanin verður knýtt tættari at FSL. T.d.

- VFS skipanin kann hava beinleiðis samband við kontoætlanina í FSL skipanini
- Kontoætlanin í VFS-skipanini kann verða umsitin elektroniskt, umvegis FSL kontoætlanina
- Útgjaldingar til klientar og kreditorar kunnu verða avgreiddar elektroniskt umvegis útgjaldsskipanina hjá Føroya Gjaldstovu
- Útreiðslubókingar til høvuðsbókhaldið í FSL kunnu verða fluttar elektroniskt til høvuðsbókhaldið í FSL skipanini

Fyrimunir við einum elektroniskum sambandið millum skipanina á Almannastovuni og Fíggjarskipan Landsins eru fleiri, m.a. kunnu nevnast:

- Hetta er eitt trygt samskifti, har upplýsingarnir verða fluttar beinleiðis. Onki "fílsamskifti" verður gjørt.
- Bókingar og útgjaldingar kunna "validerast" mótvegis FSL skipanini, áðrenn tær endaliga verða fluttar til avgreiðslu og harvið verða feilmøguleikarnir færri.
- Transaktiónssporið verður betri, tí hvør útgjalding frá Almannastovuni fær tillutað eitt transaktiónsnummar frá FSL útgjaldsskipanini. Hetta førir við sær, at møguligt er at fylgja eini útgjalding frá "føðing" og til hon er flutt til peningastovnin.
- Møguleiki fyri at allar útgjaldingar verða samlaðar á Føroya Gjaldsstovu, áðrenn tær endaliga verða fluttar peningastovnunum og møguligt er at leggja útgjaldingar til avgreiðslu fram í tíðina

- Her er eisini talan um eitt funktiónsbýti, tí Almannastovan skapar útgjaldsgrundarlagið, kannar hetta og stemmar av, meðan Føroya Gjaldstova hevur møguleika fyri at avgreiða flytingarnar víðari.
- Talan er ikki um grundleggjandi broytingar í VFS-skipanini, men tillagingar. Tær flestu upplýsingar, ið krevjast, eru longu tilstaðar í VFS-skipanini

### Uppskot til arbeiðsætlan

Stýrisbólkur verður settur. Projektbólkur verður settur at

- útgreina, hvørji krøv FGJ setur Almannastovuni
- lýsa hvørjar broytingar eru neyðugar, bæði viðv. samskifti við klientar og samskifti við Postverkið
- lýsa ætlan fyri tillagingar í VFS-skipanini

síðani verða

- tillagingar gjørdar og skjalfestar
- nároyndarætlan gjørd
- nároyndir

og skipanin verður tikin í nýtslu.

## B. Dagpengaskipan

Tá VFS-skipanin varð ment, var hædd tikin fyri, at Dagpeninga- og Forsorgarskipanin skuldu knýtast til skipanina seinni. Grundbygnaðurin verður tann sami, t.v.s. klientar verða skrásettir í ScanJour-skipanini, sama navnaskrá, peningasamskifti o.s.fr. Útgjaldingin og útreiðslu-bókingin verður at fara fram í sama umhvørvi og á sama hátt sum fyri pensjónistar, so her er talan um at nýta facilitetir, ið longu eru tilstaðar.

Tað sum skal gerast serstakt afturat VFS-skipanini er m.a.

- Útrokningarmodul av dagpeningi eftir dagpeningalógini, ið út frá skrásettum upplýsingum ásetur dagsatsin fyri ein dagpeninga-móttakara og hvat hann kann móttaka fyri alt sjúkraskeiðið, tá hædd er tikin fyri karens- og halgidøgum, møguligum øðrum sjúkraskeiðum og hvønn status dagpeningaumsøkjarin hevur. Her verður hugsa um vanligar móttakarar, sjálvbodnar tryggingar-takarar og fólkapensjónistar
- Uppkrav til arbeiðsgevarar fyri fyrsta og annan sjúkradag
- Umsiting av sjálvbodnum tryggingartakarum, ið m.a. inniheldur umsiting av sjálvbodum, tryggingaruppkrøvum til tryggingar-takara, bóking av inngjøldum, rykkjarar
- Læknaváttanir, herundir rindan av læknaváttanum

Fyrimunir at knýta hesa skipan til VFS-skipanina eru m.a.

- Allar útgjaldingar og øll umsiting av klientum er í somu skipan og mannagongdin viðv. skráseting er tann sama, bæði viðv. dagpeningaumsøkjarum og pensjónistum.
- Dagpengaskipanin nýtur í stóran mun forrit, ið longu eru í nýtslu.
- Øll útgjøld verða avgreidd á sama hátt
- Hagtalsgrundarlagið hjá Almannastovuni verður væl betri, tá allar veitingar verða goymdar á sama stað og í sama formi
- Starvsfólk skulu ikki læra at nýta tvær skipanir
- Møguleiki er fyri funktiónsbýti

### Uppskot til arbeiðsætlan

Stýrisbólkur verður settur. Projektbólkur tekur sær m.a. av

- Kravfestingin/nærlýsingin frá 2002 verður endurskoðað
- Menningin verður sett í gongd
- Umleggingarætlan verður gjørd
- Skjalfestan av loysn og brúkaravegleiðingar verða dagførdar
- Nároyndarætlanir verða gjørdar
- Íverksetan

## C. Forsorgarskipan

Her er støðan nøkulunda tann sama sum við Dagpeningaskipanini. Ein innbygd forsorgarskipan í VFS-skipanina, vil gera nýtslu av flest øllum skráum, ið longu eru í VFS-skipanini. Á sama hátt sum Dagpeninga-skipanini tørvar eitt forrit, ið kann áseta dagpening, tørvar forsorgar-skipanin eitt forrit, ið út frá skrásettum tørvsmetingum, inntøku-viðurskiftum o.l. kann áseta forsorgarveitingar.

Grundbygnaðurin verður tann sami sum í VFS-skipanini, t.v.s. klientar verða skrásettir í ScanJour málsskipanini, sama navnaskrá, peninga-samskifti o.s.fr. Útgjaldingin og útreiðslubókingin verða at fara fram í sama umhvørvi og á sama hátt sum fyri fólkapensjónistar, so her er talan um at nýta facilitetir, ið longu eru tilstaðar.

M.a. fylgjandi skal gerast

- Tørvsmodul, ið kann útrokna peningaligan tørv hjá forsorgarklientum
- Skráseting av forsorgarveitingum til útgjaldingar

Út frá hesum, verður møguligt at automatisera forsorgarveitingar og tað vil altíð finnast ein tørvslýsing, ið lýsur grundarlagið fyri útgjøldum til forsorgarklientar. Tørvslýsingin vil verða ein partur av skipanini, og verður

sostatt goymd í VFS databasuni undir tryggum umstøðum. Hetta vil umframt at lætta um sjálvt forsorgararbeiðið, eisini kunna nýtast til hagtalsligt grundarlag, um tørvur er á tí.

Av tí at kravfestingin/nærlýsingin ikki er liðug, er møguliga eisini tørvur á øðrum modulum.

### Uppskot til arbeiðsætlan

Stýrisbólkur verður settur. Projektbólkur verður settur, ið m.a. tekur sær av

- Kravfestingin/nærlýsingin frá 2002 verður gjørd liðug
- Menningin verður sett í gongd
- Skjalfestan av loysn og brúkaravegleiðingar verða dagførdar
- Nároyndarætlanir verða gjørdar
- Íverksetan

## D. Barnapeningaskipan (alimentatión)

Tá VFS-skipanin varð ment, varð atlit havt at, at Alimentatiónsskipanin skuldu knýtast til skipanina seinni. Grundbygnaðurin verður tann sami, t.v.s. klientar verða skrásettir í ScanJour málsskipanini, sama navnaskrá, peningasamskifti o.s.fr.v. Útgjaldingin og útreiðslubókingin verður at fara fram í sama umhvørvi og á sama hátt sum fyri pensjónistar, so her er talan um at nýta facilitetir, ið longu eru tilstaðar.

Tað sum skal gerast serstakt afturat VFS skipanini er m.a.

- Uppgerð til móttakara
- Uppgerð pr. mál til T&S
- Bókingarlisti til T&S
- Listi yvir krøv til T&S
- Nýggj mál til T&S
- Innheintingar pr. mál til FG J
- Upprættan av gjaldsmóttakara og gjaldsskylduga í sama VFS-máli

Fyrimunir at knýta hesa skipan til VFS-skipanina eru m.a.

- Allar útgjaldingar og øll umsiting av klientum er í somu skipan og mannagongdin viðv. skráseting er tann sama, bæði viðv. barnapeningaumsøkjarum og pensjónistum.
- Barnapeningaskipanin nýtur í stóran mun forrit, ið longu eru í nýtslu.
- Øll útgjøld verða avgreidd á sama hátt, tó skal hædd takast fyri at gjaldskyldugi samstundis skal skuldskrivast
- Hagtalsgrundarlagið hjá Almannastovuna verður væl betri, tá allar veitingar verða goymdar á sama stað og í sama formi

- Starvsfólk skulu ikki læra at nýta tríggjar útgjaldsskipanir (DPS, Alim. og VFS)
- Møguleiki er fyri funktiónsbýti

### Uppskot til arbeiðsætlan

Stýrisbólkur verður settur. Projektbólkur verður settur m.a at taka sær av

- Kravfestingin/nærlýsing, m.a. við støði í kanningini, ið varð bíløgd av Almannastovuni og Føroya Gjaldstovu í felag (Kommunedata 1996)
- Menningin verður sett í gongd
- Umleggingarætlan verður gjørd
- Skjalfestan av loysn og brúkaravegleiðingar verða dagførdar
- Nároyndarætlanir verða gjørdar
- Íverksetan

## E. Aðrar uppgávur í samband við VFS-skipanina

Lýsa VFS-skipanina og mannagongdir við atliti til trygd, sporbæri og rættleika

- Innbygdar kontrollir
- Hvussu skipanin ásetir veitingar (Parametrar ið ávirka veitingar og hvussu innanhýsis tilknýti er millum hesar)
- Lýsa transaktiónsspor í skipanini
- Lýsa ”logningsfaciliteter”
- Samskifti við aðrar stovnar
- Atgongdarstýring, loyniorðspolitikk, funktiónsskilnaða
- Manuellar og maskinellar mannagongdir í samband við útgjøld og samskifti við aðrar stovnar

Talan er ikki um eina brúkaravegleiðing, men um eina lýsing, ið lýsir møguleikar í skipanini og hvørjar manueller arbeiðs- og mannagongdir Almannastovan nýtir saman við EDV skipanini.

## F. TESS

Í samband við mobilu arbeiðsmegina hava londini innan ES og tey fyrrverandi EFTA-londini gjørt eina avtalu um sociala trygd – EØS-forordning 1408/71. Hetta ger, at stórur tørvur er á at skifta um upplýsingar millum londini. Fyri at lætta um tað arbeiðið, eru m.a. Finland og Svøríki farin undir at menna eina skipan TESS, sum er ætlað til at lata upplýsingar elektroniskt millum londini.

Føroyar eru ikki við í hesum arbeiði enn, men við tað, at Føroyar hava tikið undir við Nordisk Konvention om Social Sikring, ber í løtuni ikki til at tosa um nakrar beinleiðis avleiðingar. Men tá skipanin er liðugt ment og hini norðurlondini, sum Almannastovan hevur nógv samskifti við, fara at arbeiða við TESS-skipanini, kann væntast at Almannastovan ger tað sama. Tá er tað umráðandi, at Almannastovan hevur eina skipan, sum kann arbeiða saman við skipanunum í hinum londunum.

**Hans Pauli Strøm**
landsstýrismaður

**Skjal 1**

# Víðari menning av

# EDV skipan hjá Almannastovuni

# Uppskot, 14/2-2005

Uppskot til arbeiðsætlan viðv. tørvs- og kravesting og nærri lýsing av ávísum økjum av EDV skipani hjá Almannastovuni.

Fyri at gjøgnumføra hesi arbeiði, er neyðugt, at arbeiðsbólkarnir verða mannaðir við umboðum, ið hava neyðuga vitan um hvørt øki sær og at tey eru tøk til, tá arbeiðið verður sett í gongd.

Út frá fyribilsmetingum, uppgávan gerast innanfyri uml. 83 arbeiðsdagar.

Uppgávur:

| | | |
|---|---|---|
| 1.1 | Samskifti og góðkenning av skipan í samband við FSL | 26 |
| 1.2 | Dagpengar | 27 |
| 1.3. | Forsorg | 28 |
| 1.4 | Barnapengar | 29 |

## *Samskifti og góðkenning av skipan í samband við FSL*

Stýrisbólkur verður skipaður, við umboðum fyri Almanna- og heilsuráðið, Føroya Gjaldstovu, Almannastovuni og Sam~teld.
Verkætlanarbólkur verður skipaður, við umboðum fyri Føroya Gjaldstovu, Almannastovuni og Sam~teld.

Verkætlanarbólkurin skal lýsa hesi viðurskifti:

- Hvat krevur FGJ fyri at góðkenna VFS-skipanina
- Uppskot til møguligar broytingar, fyri at skipanin verður góðkend av FGJ og lýsa hvussu hetta verður framt í verki, grundað á VFS-skipanina
- Í hvønn mun kann Almannastovan gera nýtslu av serskipanum hjá FGJ, t.d. útgjaldsskipan, kreditorskipan, debitorskipan og høvuðsbókhaldsskipan.
- Tíðar- og kostnaðarætlan

Manning í verkætlanarbólki og meting at tíðarnýtslu

| | | |
|---|---|---|
| Almannastovan | | |
| | 1-2 persónar við innliti í VFS-skipanina og samskifti við aðrar stovnar (PVF) | 17 dagar |
| Sam~teld | | |
| | 1-2 persónar við innliti í VFS-, FSL-skipanir og samskifti við aðrar stovnar | 17 dagar |

## Dagpengar

Stýrisbólkur verður skipaður, við umboðum fyri Almanna- og heilsuráðið, Føroya Gjaldstovu, Almannastovuni og Sam~teld.
Projektbólkur verður skipaður, við umboðum fyri Almannastovuni og Sam~teld.

Verkætlanarbólkurin skal:

- Endurskoða fyribils kravfestingina, ið var gjørd í 2002.
- Tíðar- og kostnaðarætlan

Manning í verkætlanarbólki og meting at tíðarnýtslu

| | | |
|---|---|---|
| Almannastovan | | |
| | 1-2 persónar við innliti í dagpengaviðurskifti og við kunnleika til VFS-kjarnuskipanina | 24 dagar |
| Sam~teld | | |
| | 1-2 persónar við innliti í VFS-kjarnuskipanina og dagpeningaøki | 24 dagar |

## Forsorg

Stýrisbólkur verður skipaður, við umboðum fyri Almanna- og heilsuráðið, Føroya Gjaldstovu, Almannastovuni og Sam~teld.
Verkætlanarbólkur verður skipaður, við umboðum fyri Almannastovuni og Sam~teld.

Verkætlanarbólkurin skal lýsa hesi viðurskifti:

- Kravfestingin verður gjørd liðug
- Tíðar- og kostnaðarætlan

Manning í verkætlanarbólki og meting at tíðarnýtslu

| | | |
|---|---|---|
| Almannastovan | | |
| | 1-2 persónar við innliti í forsorgarviðurskifti og við kunnleika til VFS-kjarnuskipanina | 19 dagar |
| Sam~teld | | |
| | 1-2 persónar við innliti í VFS-kjarnuskipanina og forsorgarøki | 19 dagar |

## *Barnapengar*

Stýrisbólkur verður skipaður, við umboðum fyri Almanna- og heilsuráðið, Føroya Gjaldstovu, Almannastovuni og Sam~teld.
Verkætlanarbólkur verður skipaður, við umboðum fyri Føroya Gjaldstovu, Almannastovuni og Sam~teld.

Verkætlanarbólkurin skal lýsa hesi viðurskifti:

- Kanna tilfar, ið fyrr er skrivað um økið
- Lýsa samskifti, sum ”Alimentatión´s deildin hevur við aðrar stovnar og hvussu ”flowið” er.
- Kravfesta og lýsa tørvin sum deildin hevur
- Tíðar- og kostnaðarætlan

Manning í verkætlanarbólki og meting at tíðarnýtslu

| | | |
|---|---|---|
| Almannast ovan | | |
| | 1-2 persónar við innliti í Alimentatiónsskipanina og samskifti við aðrar stovnar | 19 dagar |
| Sam~teld | | |
| | 1-2 persónar við innliti í VFS- og núverandi Alimentatiónskipanina | 19 dagar |

# Skjal 3. Arbeiðið hjá KT-bólkinum

Víst verður til tátt 2.7.

Niðanfyri verður arbeiðið hjá KT-bólkinum lýst í stuttum.

KT-bólkurin hevur valt at skipa sítt útgreiningararbeiði á tann hátt, at fyrst gera eina so nágreiniliga lýsing av verandi støðu sum til ber. Hetta er gjørt við at lesa tilfar og lýsingar av verandi telduskipan. Fundir hava verið við umboð fyri allar deildir á Almannastovuni, sum hava fylt út spurnarbløð, og fleiri hava latið KT-bólkinum workflow- og dátaflowdiagrammir.

Við støði í hesum, fundum og skrivligum samskifti við uttanhýsis sambond, tøkum uttanhýsis tilfari og við teimum royndum og førleikum, sum limirnir í KT-bólkinum hava havt, hevur bólkurin roynt at lýsa eina í alla mátar optimala KT-loysn.

Yvirlit yvir fundir:

*Innanhýsis:*

- Tænastudeildin 1. november 2005
- Serdeildin fyri børn og vaksin 2. november 2005
- Arbeiðsmarknaðardeildin 4. november 2005
- Økisdeildin í Tórshavn 7. november 2005
- Roknskapardeildin 8. og 29. november 2005
- Hjálpartólamiðstøðin 9. november 2005
- Veitingardeildin 10. november 2005
- Leiðslu- og stjórnarskrivstovan, 11. november 2005
- Økisdeildin í Eysturoy 18. januar 2006
- Økisdeildin í Suðuroy 26. januar 2006

Fundir hava eisini verið við Veitingardeildina, Økisdeildina í Tórshavn og við Arbeiðsmarknaðardeildina um lýsing av veitingarsløgum. Jan A. Joensen á Vitanardeildini hevur eisini luttikið í nøkrum av fundunum.

*Uttanhýsis:*

- Føroya Gjaldstovu 21. november 2005 og 12. januar 2006
- Toll- og Skattstovu Føroya 24. november 2005
- KT-deildin á Tjaldurs Apoteki 29. november 2005
- Føroya Tele 30. november 2005 um nýggju kundaskipanina Nøglina
- Almanna- og heilsumálaráðið 1. desember 2005
- Dátueftirlitið 2. desember 2005
- Rakstrardepilin 2. desember 2005
- Heimarøktin og Serforsorgin 12. januar 2006
- Sam-teld 1. februar 2006 um VFS-skipanina
- Formula.fo 9. februar 2006 um Microsoft Dynamics

- KMD 20. apríl í Føroyum og 16. mai 2006 í Ballerup um heildarskipanir til almannaøkið
- Microsoft Danmark 15. mai 2006 í Hellerup um portalloysnina SharePoint Portal Server

Erhard Jacobsen vitjaði saman við limunum í KT-stýrisbólkinum Den sociale Ankestyrelse í Keypmannahavn 3. november 2005 í sambandi við teirra royndir at seta í verk ScanJour Capita, og hagfrøðistovnin STAKES í Helsinki 4. november 2005 í sambandi við Dátavøruhús v.m. á sosialhagfrøðiliga økinum.

Hans Petur Joensen á Gjaldstovuni hevur greitt frá royndum við arbeiðinum at gera dátuvøruhús á Gjaldstovuni.

Hjørleif Hjaltalin, konsulentur frá Sam-teld, hevur luttikið í ávísum pørtum av arbeiðinum í sambandi við útgreining av veitingar- og útgjaldsskipan.